# Endurskoðan
# av
# punktgjøldunum og MVG-skipanini

*so tey verða meira brúkara- og vinnuvinarlig*

**Upprit**
**frá**
**Fíggjarmálaráðnum**

www.fmr.fo

**Oktober 2004**

## *Innihald*

1. Inngangur og høvuðsniðurstøður við tilmælum ... 3
1.1 Arbeiðssetningur ... 3
1.2 Høvuðsniðurstøða 1: Tilmæli um føroysk avgjøld frameftir ... 4
1.3 Høvuðsniðurstøða 2: Tilmæli um lógaruppskot alt fyri eitt ... 5
1.4 Høvuðsniðurstøða 3: Tilmæli um lógaruppskot sum frá líður ... 6
1.5 Høvuðsniðurstøða 4: Tilmæli um skrásetingargjaldið á bilum ... 6
1.6 Aðrar niðurstøður ... 7
1.7 Viðmerkingar frá vinnu, brúkarum o.ø. ... 8
2. Avgjøld ... 10
2.1 Meirvirðisgjald ... 11
2.2 Tollavgjøld ... 13
2.3 Punktgjøld ... 13
2.4 Lønhæddargjald ... 15
2.5 Brennioljugjald ... 15
2.6 Framleiðsluavgjøld ... 16
2.7 Skrásetingargjald ... 16
2.7 Vegskattur (Vektgjald) ... 17
2.8 Ferðaavgjald ... 18
2.9 Umhvørvisavgjald á smyrjiolju ... 18
2.10 Inntøkur landskassans av avgjøldunum ... 19
2.11 Niðurstøða um avgjaldslógirnar og tilmæli ... 21
3. Punktgjøld ... 23
3.1 Punktgjaldssatsir ... 23
3.2 Inntøkur landskassans av punktgjøldum ... 25
3.3 Niðurstøða um punktgjøldini og tilmæli ... 25
4. Meirvirðisgjaldslóg ... 26
4.1 Avgjald í einum liði ... 28
4.2 Avgjald í fleiri liðum ... 29
4.2.1 Kumulativt avgjald ... 29
4.2.2 Meirvirðisgjald ... 30
4.3 Meirvirðisgjaldsneutralitetur ... 31
4.4 Niðurstøða um meirvirðisgjaldslógina og tilmæli ... 32
5. Undantøk sambært § 12 í meirvirðisgjaldslógini ... 33
5.1 Søla í sambandi við útflutning ... 33
5.2 Meirvirðisgjaldsfrí søla, sum ítøkiliga er nevnd í lógini ... 34
5.3 Meirvirðisgjaldsfrí søla har inngangandi avgjald ikki kann roknast ... 35
5.4 Kunngerðir við heimild í § 12 í meirvirðisgjaldslógini ... 35
5.5 Undantøk undir § 12 eftir 1993 ... 36
5.6 Avgjaldsfrítøka annars ... 39
6. Samlað tilmæli um punktgjøld og undantøk o.a. í mvg-lógini ... 41
7. Skrásetingargjald á bilum o.a. ... 43
7.1 Eykaútgerð ... 45
7.2 Vinnubilar o.a. ... 45
7.3 Vegskattur ... 46

# 1. Inngangur og høvuðsniðurstøður við tilmælum

Eitt av høvuðspunktunum undir skatta- og avgjaldspolitikkinum í samgonguskjalinum er, at punktgjøldini og meirvirðisgjaldsskipanin skulu endurskoðast, so tey verða meira brúkara- og vinnuvinarlig.

Síðan stóru broytingarnar í føroysku avgjøldunum í 1993, tá meirvirðisgjaldslógin kom í gildi, eru ikki gjørdar stórvegis broytingar í føroysku avgjaldslógunum. Tað er tí tiltrongt, at ein endurskoðan verður gjørd, soleiðis at føroysku avgjaldslógirnar verða eftirmettar og dagførdar.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði tí fram upprit á landsstýrisfundi 27. apríl 2004, har landsstýrismaðurin mælti til at seta síni egnu embætisfólk at lýsa føroysku avgjaldslógirnar og koma við tilmælum um, hvørjar broytingar skulu gerast á føroyska avgjaldsøkinum og hvussu føroyski avgjaldspolitikkurin frameftir eigur at verða lagdur tilrættis. Eftir at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fingið politiska undirtøku fyri, hvørji tilmæli skulu fylgjast, verða lógaruppskot við broytingunum løgd fyri Løgtingið.

Arbeiðssetningurin varð eisini lagdur fyri á landsstýrisfundinum og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fekk undirtøku frá landsstýrinum fyri sínum ætlanum.

## 1.1 Arbeiðssetningur

Arbeiðssetningurin, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fekk undirtøku fyri á landsstýrisfundinum 27. apríl 2004, var soljóðandi:

> *Punktgjøldini og meirvirðisgjaldsskipanin skulu endurskoðast, so tey verða meira brúkara- og vinnuvinarlig.*

Endurskoðanin skal m.a. lýsa og viðgera hesi viðurskifti:

- Lýsa hvørjar løgtingslógir eru galdandi á føroyska avgjaldsøkinum.
- Lýsa endamál og onnur viðurskifti við galdandi punktgjøldum, og hvussu stórar inntøkur hesi geva landskassanum.
- Gera tilmælir um, hvussu ótíðarhóskandi punktgjøld v.m. verða strikað og umskipað, soleiðis at loysnin verður so útreiðsluneutral sum gjørligt fyri landskassan.
- Lýsa endamálið við meirvirðisgjaldslóggávu yvirhøvur, hvussu meirvirðisgjaldsskipan virkar og hvussu stórar inntøkur landskassin hevur av meirvirðisgjaldinum.
- Lýsa møguligar trupulleikar við føroysku meirvirðisgjaldslógini og hvussu hesir eiga at verða loystir.
- Lýsa hvørji atlit eiga at verða tikin frameftir, tá ið føroysk avgjaldslóggáva verður løgd til rættis.

Uppritið við endurskoðanini er sent vinnu, brúkarum og øðrum, sum verða rakt av tilmælunum til ummælis, áðrenn tað verður lagt fyri á landsstýrisfundi til politiska viðgerð.

Tað skal eisini viðmerkjast, at samgongan ætlar at fremja skattalættar í inntøkuskattinum næstu árini. Tí er endamálið við endurskoðanini av avgjaldslógunum ikki at fremja lættar ella at skapa fleiri inntøkur til landskassan. Tilmælini til broytingar í avgjaldslógunum skulu tí helst vera útreiðsluneutral.

Hóast ásetingin í samgonguskjalinum tekur høvuðsatlit at meirvirðisgjaldsskipanini og punktgjøldunum, so verða eisini gjørdar lýsingar og tilmælir til hinar avjgaldslógirnar, sum eru galdandi í Føroyum í dag.

Løgtingslógirnar um avgjøld eru hesar:

- Meirvirðisgjald.
- Tollavgjøld.
- Punktgjøld.
- Lønhæddargjald.
- Brennioljugjald.
- Framleiðsluavgjøld.
- Skrásetingargjald.
- Vegskattur (Vektgjald).
- Ferðaavgjald.
- Umhvørvisgjald á smyrjiolju.

Tað eru sostatt fleiri lógir galdandi á føroyska avgjaldsøkinum í dag, men meirvirðisgjaldslógin er nógv tann mest umfatandi og næstan 70% av avgjaldsinntøkum landskassans stava frá meirvirðisgjaldinum.

Fyri 1993, tá ið føroyska meirvirðisgjaldslógin kom í gildi, vóru føroysku avgjaldslógirnar í høvuðsheitinum tollur og punktgjøld, sum vórðu løgd á innflutning. Tá ið Føroyar gjørdu nýggja handilsavtalu við ES í 1992 var tað eitt krav frá ES, at Føroyar ikki gjørdu mismun á innfluttum vørum og vørum framleiddum í Føroyum. Hetta er høvuðsorsøkin til meirvirðisgjaldslógina. Tað er lítið at ivast í, at tað framhaldandi verður eitt krav í sambandi við altjóða handilssamráðingar, at Føroyar hava eina avgjaldsskipan, sum ikki virkar kappingaravlagandi.

## 1.2 Høvuðsniðurstøða 1: Tilmæli um føroysk avgjøld frameftir

Fyrsta høvuðstilmæli er, at Føroyar frameftir halda seg til eina meirvirðisgjaldslóg við so breiðum avgjaldsgrundarlag sum gjørligt. Umsitingarliga er lættast fyri allar partar við sama avgjaldssatsi fyri allar vørur og tænastur og undantøk eiga í høvuðsheitunum ikki at verða gjørd í meirvirðisgjaldslógini.

Sokallaðir eiturevnis-, umhvørvis- og heilsuskattir eiga at verða álagdir við punktgjøldum við serligum lógum. Tí verður mælt til at taka av tey punktgjøld, sum ikki eru eiturevnis-, umhvørvis- og heilsuskattir samstundis sum fleiri ótíðarhóskandi undantøk í meirvirðisgjaldslógini verða tikin av.

## 1.3 Høvuðsniðurstøða 2: Tilmæli um lógaruppskot alt fyri eitt

Mælt verður til, at lóguruppskot verða løgd fyri Løgtingið skjótast gjørligt, ið strika undantakið í meirvirðisgjaldslógini, sum frítekur lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði fyri meirvirðisgjald, samstundis sum punktgjøldini á hvítvørum, radiotólum, sjónvarpstólum, lampum og parfumu verða strikað.

Fíggjarligu avleiðingarnar í 2005 verða mettar soleiðis:

| **Punktgjøld íroknað MVG: Kapittul og vøruslag** | **Kr.** |
|---|---|
| 84 Hvítvørur | -4.000.000 |
| 85 Radiotól, sjónvarpstól o.a. | -12.000.000 |
| 94 Lampur | -5.000.000 |
| 33 Parfuma o.a. | -5.000.000 |
| **Undantak í meirvirðisgjaldslógini** | **Kr.** |
| § 12, 1. stk., litra l. Lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði | 30.000.000 |
| **Tilsamans** | **4.000.000** |

Mettu fíggjarligu avleiðingarnar fyri landskassan í 2005 av teimum báðum nevndu lógaruppskotunum er samanlagt ein inntøka uppá 4 mió. kr. At strika punktgjøldini á hvítvørum, radiotólum, sjónvarpstólum, lampum og parfumu verður mett at kosta landskassanum 26 mió. kr. í 2005. At strika mvg-frítøkuna av lønum til bygging og umvæling av egnum bústaði verður mett at kosta 30 mió. kr. í 2005.

Fíggjarligu avleiðingarnar av tilmæltu broytingunum í avgjaldslóggávuni eru ymiskar fyri ymiskar samfelagsbólkar. Tilmæltu broytingarnar í hesum lógaruppskotinum fara at gera tað nakað dýrari at byggja og umvæla hús, men lógaruppskotið um at taka av punktgjøld av hvítvørum, radiotólum, sjónvarpstólum og lampum fer harafturímóti at gera tað bíligari at keypa húsarhaldstól, sum øll húsarhald keypa. Hetta seinna fer tí at raka ein væl breiðari skara av borgarum, t.e. bæði tey, sum byggja og umvæla hús og eisini øll onnur húsarhald, sum skifta húsarhaldsvørur út, tá ið tær eru niðurslitnar.

At taka av punktgjøldini av parfumu o.ø. er ein dagføring af lóggávuni, sum hevur til endamáls at gera føroyska handilsvinnu betur kappingarføra. Punktgjøldini á parfumu hevur við sær, at sølan av parfumu er lítil í Føroyum, tí føroyingar keypa heldur parfumu o.a. uttanlands. Við at taka av punktgjøldini á parfumu verður møguligt at flyta hesa sølu til Føroyar, umframt at hetta eisini stimbrar søluna generelt.

## 1.4 Høvuðsniðurstøða 3: Tilmæli um lógaruppskot sum frá líður

Í meirviðisgjaldslógini verður mælt til at strika meirvirðisgjaldsfrítøkuna av

- sjóklæðum,
- bókum,
- tíðindabløðum og prenting fyri tíðindabløð
- útleigan av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.t. og
- reseptskyldugum heilivági.

Ásetingin um at frítaka sjóklæðir fyri meirvirðisgjald er ógjørlig at umsita, tí sølubúðirnar skilja ikki ímillum, um talan er um sjóklæðir ella ikki, tá tær selja til sjómenn. Tað finst eingin allýsing av sjóklæðum. Kunngerðin skapar tí skeivleikar, tí sjómenn í veruleikanum kunnu keypa øll síni klæðir uttan meirvirðisgjald.

Tað finst eingin góð grundgeving fyri, at bøkur skulu frítakast fyri meiriviðisgjald. Hetta er ein óbeinleiðis stuðul til bókasølu umvegis meirvirðisgjaldslógina, sum ikki er ætlað at vera ein stuðulslóg. Bøkur er ein vanlig vøra, eins og disklar og ljóðbond, sum eru meirvirðisgjaldsskyldug. Sama er galdandi fyri tíðindabløð og prenting fyri tíðindabløð.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fyri útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi er eisini ein óbeinleiðis stuðul til føroysku gistingarhúsini umvegis meirvirðisgjaldslógina. Av tí at ein stórur partur av hesi útleigan er til ferðafólk, høvdu útlendsk ferðafólk givið størri inntøkur í landskassan, um hetta undantakið ikki var í meirvirðisgjaldslógini.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fyri reseptskyldugan heilivág er óbeinleiðis stuðul umvegis meirvirðisgjaldslógina til reseptskyldugan heilivág, sum sjúkrakassarnir og almannastovan annars rinda stóran part av. Tað hevði verið rættari at tikið hetta undantakið av og rinda allan stuðulin til reseptskyldugan heilivág beinleiðis umvegis sjúkrakassan og almannastovuna.

## 1.5 Høvuðsniðurstøða 4: Tilmæli um skrásetingargjaldið á bilum

Mælt verður til at broyta skrásetingargjaldið á bilum frá einum avgjaldi, sum verður lagt á CIF-virðið á bilinum til eitt avgjald, sum verður roknað eftir, hvussu nógvar kilometrar bilurin koyrir fyri hvønn litur av brennievni. Skrásetingargjaldið verður soleiðis broytt frá einum lítið gjøgnumskygdum avgjaldi til eitt avgjald, sum er fullkomuliga gjøgnumskygt, tí allir bilar hava í dag eitt ES-normtal, ið vísir, hvussu nógv bilurin brúkar av brennievni við blandaðari koyring.

ES-normtalið kann nýtast sum grundarlag fyri einum frymli at rokna nýggja grøna avgjaldið, soleiðis at landskassin fær á leið somu inntøku sum av skrásetingargjaldinum, men har avgjaldið verður tengt at, hvussu umhvørvisvinarligur bilurin er. Bilar, ið nýta nógv brennievni og sostatt dálka umhvørvið meira enn bilar, ið nýta minni brennievni, koma at rinda lutfalsliga størri avgjald. Inntøkur landskassans av grøna avjgaldinum fara

at minka sum frálíður, tí bilar verða alsamt gjørdir meira umhvørvisvinarligir. Tað finnast eisini bilar og fara at komar bilar, sum nýta annað brennievni enn bensin og diesel. Atlit má eisini verða tikið at hesum í sambandi við eitt nýtt grønt avgjald.

ES-normtalið vísir, hvussu nógvar kilometrar bilurin koyrir fyri hvønn litur av brennievni. Fyri at fáa eina passaliga spjaðing, kann hetta talið roknast um til, hvussu nógvar litrar av brennievni bilurin brúkar fyri hvørjar 100 kilometrar, sum verður lyft upp í ein potens og faldað við einum konstanti. Frymilin fyri nýggja grøna avgjaldið kemur sostatt at síggja soleiðis út:[1]

$$\text{Grønt avgjald} = (\text{l}/100\ \text{km})^{\text{p}} * \text{k}$$

Innfluttir brúktir bilar skulu eisini rinda grønt avgjald sambært hesum frymli. Ellisakfør eiga tó framvegis at verða frítikin fyri avgjald.

Ásetingarnar í skrásetingarlógini eiga at verða gjørdar fullkomuliga greiðar, soleiðis at bilar, ið bert verða nýttir til vinnuligt virksemi, eiga ikki at rinda skrásetingargjald.

Viðvíkjandi skrásetingargjaldinum á motorsúkklum eiga atlit at verða tikin at ferðslutrygdini. Stórar motorsúkklur, sum í dag rinda høgt skrásetingargjald, kunnu vera sera vandamiklar um t.d. ungir dreingir lættliga kunnu fáa slíkar súkklur at spæla við. Atlit eigur at verða tikið at hesum, áðrenn nakað verður gjørt við høga skrásetingargjaldið á motorsúkklum.

Viðvíkjandi vegskattinum verður mælt til, at vegskatturin verður lagdur yvir á bensin- og dieselprísirnar, soleiðis at vegskatturin verður tengdur beinleiðis at nýtsluni av bilinum og harvið eisini, hvussu nógv hvør einstakur bilur slítir vegirnar. Hetta hevði herumframt spart nógva umsiting, umframt at útlendskir bilar eisini koma at rinda fyri slit á føroysku vegirnar.

## 1.6 Aðrar niðurstøður

Í nøkrum førum taka fólk seg sjálvboðin saman um at gera eitthvørt vælgerandi arbeiði, t.d. at varðveita eitthvørt fornminni, sum annars hevði forfarist. Talan er ikki um stórt virksemi, ið hevur stórvegis týdning fyri landskassan ella meirvirðisgjaldsneutralitetin. Slíkt sjálvboðið arbeiði kann harafturímóti hava stóran samfelagsligan týdning. Mælt verður tí til at seta eina áseting í meirivirðisgjaldslógina, har landsstýrið í samráð við skatta- og avgjaldskærunevndini, undir heilt serligum umstøðum kann loyva avgjaldsfrítøku í sambandi við slíkt arbeiðið. Hetta verður gjørt eftir sama leisti, sum tá

[1] Endalig tøl eru enn ikki sett inn í frymilin, tí mælt verður til rættiliga umfatandi broytingar viðvíkjandi avgjøldunum á motorakførum. Lógaruppskotini hesum viðvíkjandi er ein verkætlan í sær sjálvum, men tað er týdningarmikið longu nú at fáa greiðu á, um hetta er leisturin politiski myndugleikin ynskir at fylgja.

landsstýrið í samráð við skatta- og avgjaldskærunevndina í dag, undir heilt serligum umstøðum loyva avgjaldsfríum innflutningi av vørum, sum annars eru avgjaldsskyldugar.

Niðurstøðurnar og tilmælini um hinar avgjaldslógirnar eru soljóðandi:

Av tí at tollavgjøldini so líðandi hvørva, so hvørt Føroyar gera fríhandilsavtalur við fleiri og fleiri lond, verður mælt til ikki at gera nakað annað við hesi avgjøld.

Eingin nærri viðgerð hevur verið av lønhæddargjaldinum, sum er eitt gjald, ið verður álagt a-inntøkuni hjá einum parti av tí virksemi, ið ikki er skyldugt at gjalda meirvirðis-gjald.

Brennioljugjaldið og umhvørvisgjaldið á smyrjiolju eru umhvørvisgjøld, sum verða áløgd við serligum lógum. Hesi avgjøld kundu eins væl verið kravd inn umvegis punktgjøldini, eins og t.d. avgjaldið á bensini. Tí átti at verið umhugsað, at flutt hesi avgjøld undir punktgjøldini.

Framleiðsluavgjøldini eru punktgjøld, sum verða áløgd ávísari framleiðslu í Føroyum. Framleiðslugjøldini koma tí undir viðgerðina av punktgjøldum.

Ferðaavgjaldið stavar frá einum fíggjarpolitiskum tiltaki í 1980-árunum. Føroyska ferða-avgjaldið er ikki av teimum hægstu samanborið við ferðaavgjaldið í nógvum øðrum londum. Ein stórur partur av ferðaavgjaldinum verður rindað av útlendskum ferðafólkum, sum á henda hátt leggja nakað av peningi eftir seg í landskassan. Mælt verður tí til ikki at gera nakað við ferðaavgjaldið.

## 1.7 Viðmerkingar frá vinnu, brúkarum o.ø.

Dentur er lagdur á, at vinna, brúkarar og onnur, sum verða rakt av tilmælunum í uppritinum, hava fingið høvi at gera viðmerkingar til tilmælini, áðrenn landsstýrið tekur politiska støðu til tilmælini. Uppritið er tí sent arbeiðsgevarafeløgum, løntakarafeløgum og øðrum viðkomandi til viðmerkingar, áðrenn tað varð lagt fyri landsstýrið.

Niðanfyri nevndu feløg, stovnar og aðalráð hava havt uppritið til viðmerkingar:

Vinnuhúsið, Føroya Reiðarafelag, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmanna-felag, Føroya Fiskimannafelag, Skipara- og navigatørfelagið, Starvsmannafelagið, Føroya Pedagogfelag, Føroya Handverkarafelag, Maskinmeistarafelagið, Føroya Lærarafelag, Sjúkrasystrafelag Føroya, Landsfelag Pensjónistanna, Brúkarasamtakið, LISA, Toll- og skattstova Føroya, Løgmansfyrisitingin, Fiskimálaráðið, Vinnumálaráðið, Mentamála-ráðið, Almanna- og heilsumálaráðið, Innlendismálaráðið, Føroya Forngripafelag, Bileftir-lit Føroya, Gistingarhúsfelagið, Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, Felagið Føroysk Bóka-forløg og Skatta- og avgjaldskærunevndin.

Niðanfyri nevndu feløg, stovnar og aðalráð hava gjørt skrivligar viðmerkingar til uppritið:

Føroya Fiskimannafelag, Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag (Vinnuhúsið), Brúkarasamtakið, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, LISA, Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya, Ferðaráð Føroya, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Bileftirlit Føroya, Føroya Forngripafelag, Vinnumálaráðið, Mentamálaráðið, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Starvsmannafelagið, Almanna- og heilsumálaráðið, Sjálvsognarstovnurin Berjabrekka 3.

Allar viðmerkingarnar eru viðheftar sum fylgiskjøl.

# 2. Avgjøld

Avgjøld verða løgd á framleiðslu og sølu og eru beinleiðis knýtt at vøru- og tænastuumsetninginum. Avgjøldini kunnu verða áløgd í ymiskum liðum í framleiðsluni og søluni. Tey kunnu vera generell fyri allar vørur og tænastur, t.d. meirvirðisgjald, ella serlig, t.e. áløgd serligum vørum og tænastum, t.d. punktgjøld á tubbakki og rúsdrekka ella kann talan eisini vera um toll, tá tað eru vørur av serligum uppruna.

Endamálið við avgjøldum er bæði at fáa inntøkur til vega, at fíggja virksemið hjá landskassanum og at ávirka nýtsluatburðin hjá fólki. Tað verða til dømis stór avgjøld løgd á tubbakk og rúsdrekka við teimum grundgevingum, at tað er skaðiligt at roykja og drekka. Tað er sostatt ætlanin, at avgjøldini skulu tálma nýtsluna av tubbakki og rúsdrekka. Slík avgjøld verða eisini kallað giftskattir ella eiturevnisskattir.

Fyrr var vanligt at leggja hægri avgjøld á marglætisvørur, tí hugburðurin var, at fólk, ið ynsktu at liva í marglæti, eisini áttu at hava ráð at rinda fyri tað. Í dag er fatanin av marglætisvørum nógv øðrvísi. Nógvar av teimum vørum, sum fyrr vórðu hildnar at vera marglætisvørur, verða nú mettar sum vørur, ið lætta nógv um í strævna gerandisdegnum. Nú er hugburðurin í flestu framkomnum londum harafturímóti, at fólk, sum dálka umhvørvið og liva heilsuskaðiligt, skulu rinda eyka avgjøld.

Stórar broytingar vórðu gjørdar í føroysku toll- og avgjaldsskipanini í 1992 í sambandi við, at Føroyar gjørdu nýggjan handilssáttmála við ES. Fyrsta stóra broytingin var, at Føroyar ikki longur kundu nýta innflutningsgjøldini, sum vórðu galdandi áðrenn 1992, tí nú skuldi ikki longur gerast munur á, um vørur og tænastur vóru framleiddar í landinum ella fluttar inn. Hetta hevði eisini við sær, at nú vórðu allar vørur skrásettar í altjóða toll- og vøruskránni. Onnur stóra broytingin var, at meirvirðisgjaldsskipan varð sett í gildi 1. januar 1993.

Síðan stóru broytingarnar í 1992 og 1993 eru ikki gjørdar stórvegis broytingar í føroysku avgjaldslógunum. Tað er tí tiltrongt, at ein endurskoðan og eftirmeting verður gjørd við høvuðsatliti at teimum broytingum, sum vórðu gjørdar í 1992.

Hóast ásetingin í samgonguskjalinum tekur høvuðsatlit at meirvirðisgjaldsskipanini og punktgjøldunum, so verða eisini gjørdar lýsingar og tilmælir til hinar avgjaldslógirnar, sum eru galdandi í Føroyum í dag.

Tað eigur fyrst av øllum at verða viðmerkt, at tað oftani verður sagt, at nógvar vørur eru dýrar í Føroyum, tí at punktgjøldini eru høg. Hetta er bert rætt viðvíkjandi teimum vørum, sum verða áløgd punktgjøld. Fleiri aðrar vørur eru nógv dýrari í Føroyum enn í Danmørk, hóast tær bert verða álagdar meirvirðisgjald, og merivirðisgjaldssatsurin er tann sami í Føroyum og Danmørk. Billutir og amboð eru fleiri ferðir dýrari í Føroyum enn í Danmørk, hóast avgjøldini eru tey somu. Orsøkin til hetta er óivað, at hesar handilsvinnur lítla og onga kapping fáa her heima og uttanífrá. Tað er t.d. lítil og eingin munur á prísunum á klæðum í Føroyum og í Danmørk. Høvdu klæðini verið nógv dýrari í

Føroyum, høvdu føroyingar keypt klæðini uttanlands ella úr útlendskum príslistum, sum verða sendir føroyskum húsarhaldum.

Føroysku avgjaldslógirnar[2] verða lýstar niðanfyri:

- Meirvirðisgjald.[3]
- Tollavgjøld.[4]
- Punktgjøld.[5]
- Lønhæddargjald.[6]
- Brennioljugjald.[7]
- Framleiðsluavgjøld.[8]
- Skrásetingargjald.[9]
- Vegskattur (Vektgjald).[10]
- Ferðaavgjald.[11]
- Umhvørvisgjald á smyrjiolju.[12]

## 2.1 Meirvirðisgjald

Løgtingslógin um meirvirðisgjald[13] kom í gildi 1. januar 1993 og var ein fylgja av, at Føroyar høvdu gjørt nýggja handilsavtalu við ES. Føroyska meirvirðisgjaldslógin er ein beinleiðis avskrivft av donsku meirvirðisgjaldslógini frá 1993. Í dag er samsvar fingið í meirvirðisgjaldslóggávuni í øllum ES, og tað eru bert smærri møguleikar fyri frávikum í einstøku londunum. Føroyar og Danmørk eru einastu londini, har sami meirvirðisgjalds-satsur, sum er 25%, verður nýttur til allar vørur. Í øðrum londum eru ymiskir satsir fyri ymiskar vørur. Sami satsur fyri allar vørur og tænastur ger lógina lættari at umsita.

Eitt av høvuðsendamálunum við meirvirðisgjaldslóggávu er, at lond ikki skulu kunna nýta avgjaldslóggávu til at verja egna framleiðslu. Meirvirðisgjaldssatsurin kann tí vera ymiskur fyri ymiskar vørur, men tað kunnu ikki vera fleiri satsir fyri somu vøru alt eftir, hvar hon er framleidd, og hvør hevur framleitt hana. Meirvirðisgjaldslógin skal við

[2] Føroyskar avgjaldslógir eru her avmarkaðar til avgjøld, sum verða løgd á vørur og tænastur. Á inntøkusíðuni hjá landskassanum eru hetta tær kontur, ið koma undir avgjøld og toll.
[3] Løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum.
[4] § 2 í løgtingslóg nr. 120 frá 23. desember 1991 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við tilhoyrandi frumskjali 1.
[5] § 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við tilhoyrandi frumskjali nr. 1, 2 og 3.
[6] Løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønhæddargjald.
[7] Løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju.
[8] § 2 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við tilhoyrandi frumskjali nr. 1.
[9] Løgtingslóg nr. 175 frá 18 desember 1992.
[10] Løgtigslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vegskatt av motorakførum v.m.
[11] Løgtingslóg nr. 37 frá 26 mai 1988 um ferðaavgjald.
[12] Løgtingslóg nr. 75 frá 3. mai 1992.
[13] Meirvirðisgjaldslógin er gjølligari viðgjørd í kapittul 5.

øðrum orðum ikki vera kappingaravlagandi. Støddin á meirvirðisgjaldssatsinum ella satsunum er tí ein politiskur spurningur, men tað er lítið at ivast í, at tað framhaldandi verður eitt krav í sambandi við altjóða handilssamráðingar, at Føroyar hava eina avgjaldsskipan, sum ikki virkar kappingaravlagandi.

Sambært § 1 í meirvirðisgjaldslógini skal avgjald rindast í landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutningi úr útlondum.

Av tí at vinnan dregur avgjaldið av keyptum vørum og tænastum frá, veksur avgjaldið ikki við talinum av søluliðum. Avgjaldsgrundarlagið er sostatt samlaða søluavgjaldið minus keypsavgjaldið í øllum liðum, og talan verður tí um eitt avgjald á virðisøkingini í hvørjum einstøkum søluliði. Hetta verður nærri lýst í kapitli 5 um meirvirðisgjaldslógina.

Meirvirðisgjaldið verður tí rindað av ikki meirvirðisgjaldsskrásettum keyparum, sum keypa vørur og tænastur uttan at kunna draga keypsavgjaldið frá. Hetta er í høvuðsheitinum privat nýtsla, men eisini annað virksemi, sum ikki er meirvirðisgjaldsskyldugt og tí ikki er meirvirðisgjaldsskrásett.

Næstan alla vørur og tænastur eru meirvirðisgjaldsskyldugar, og er árliga sølan hjá einum virki ella einstaklingi større enn 20.000 kr., skal viðkomandi meirvirðisgjaldsskrásetast, sí § 4 í meirvirðisgjaldslógini.

Í § 2, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini er ásett, hvørjar tænastur eru undantiknar avgjaldsskyldu. At tænasturnar eru undantiknar avgjaldsskylduni merkir, at tænasturnar verða seldar uttan meirvirðisgjald. Seljarin av hesum tænastum kann harafturímóti ikki draga meivirðisgjaldið av keyptum vørum og tænastum frá. Talan er tí um ikki meirvirðisgjaldsskrásett virksemi.

Herumumframt er sambært § 12 í meirvirðisgjaldslógini í nøkrum førum eisini talan um meirvirðisgjaldsskrásett virksemi, har sølan er frítikin fyri meirvirðisgjald. Hetta merkir við øðrum orðum, at meirvirðisgjaldssatsurin viðvíkjandi søluni er null. Seljarin skal í hesum førum ikki leggja meirvirðisgjald afturat søluni, men kann draga meirvirðisgjaldið av keyptum vørum og tænastum frá.

Upprunaliga varð § 12 í meirvirðisgjaldslógini kallað útflutningsgreinin, tí hon var ætlað fiskivinnuni, sum flytur næstan alla sína framleiðslu út. Hetta var fyri at sleppa undan, at fiskivinnan bant ov nógvan kapital, tí útflutningsvinnan fær meirvirðisgjaldið endurgoldið kortini. Meirvirðisgjald verður vanliga avroknað við landskassan kvartalsvís, og fiskivinnan kundi sostatt komið at bundið kapital upp í 3 mánaðir. Meirvirðisgjaldslógin varð sett í gildi, tá búskaparkreppan var ringast, tí var hetta serliga atlitið tikið at fiskivinnuni.

Síðan 1993 eru fleiri undantøk komin undir § 12 í meirvirðisgjaldslógini, sum einki hava við útflutning at gera, og hvørt ár koma fleiri uppskot í Løgtinginum um fleiri undantøk undir hesa grein. Tað eru serliga hesi undantøkini, sum úthola meirvirðisgjaldsskipanina, sí kapittul 5.

Meirvirðisgjald er nógv tann størsta avgjaldsinntøkan hjá landskassanum. Í 2003 vóru meirvirðisgjaldsinntøkur landskassans góðar 968 mió. kr. Hetta vóru meiri enn 2/3 av avgjaldsinntøkum landskassans, sí talvu 2.1.

## 2.2 Tollavgjøld

Tollavgjøld er GATT[14]-tollur, sum verður lagdur á vørur, ið verða fluttar inn úr ikki ES- og EFTA-londum og londum, sum Føroyar ikki hava fríhandilsavtalu við. Grundarlagið undir GATT-tollinum minkar sostatt, so hvørt føroyingar gera fríhandilsavtalur við fleiri lond. Sambært handilssáttmálanum við ES kann heldur eingin nýggjur innflutningstollur og einki nýtt avgjald við somu ávirkan sum tollur ásetast í samhandlinum millum felagsskapin og Føroyar.

GATT-tollur er ásettur fyri hvørt vørunummar sær í toll- og vøruskránni, og tí er tað vøran, ið er avgerandi fyri tollsatsin og ikki landið, vøran kemur frá. Føroyar hava í sáttmála við WTO[15] bundið seg til at halda GATT-tollsatsirnar. Hetta merkir, at Løgtingið ikki kann hækka satsirnar, men bert lækka og taka teir av.

Endamálið við tollavgjøldum hevur upprunaliga verið at útvega fígging til almennar útreiðslur og at verja heimaframleiðsluna ímóti kapping frá útlondum. Hugburðurin í dag er, at frælsur handil uttan tollforðingar gagnar heimsbúskapinum best, og høvuðsstevnumiðið hjá millumtjóðað handilsfelagsskapum og við millumtjóðað handilsavtalum er tí at strika allar tollforðingar og sostatt stimbra heimshandilin.

Undir verandi umstøðum fer GATT-tollurin sostatt at hvørva heilt burtur sum frálíður. Inntøkur landskassans av tollavgjøldum vóru í 2003 góðar 33,5 mió. kr. Hetta eru umleið 2,2% av avgjaldsinntøkum landskassans, sí talvu 2.1.

## 2.3 Punktgjøld

Punktgjøld eru avgjøld, ið verða løgd á serligar vørur. Endamálið við punktgjøldum er umframt at fáa til vega inntøkur at fíggja almennar útreiðslur, eisini at ávirka atburðin og nýtsluvalið hjá fólki. Til dømis verða høg punktgjøld løgd á tubakk og rúsdrekka, tí at fólk skulu roykja og drekka minni. Hetta er við teimum grundgevingum, at tað er sera skaðiligt at roykja og drekka.

[14] Altjóða felagskapurin GATT varð stovnaður í 1948 við tí endamáli at taka av forðingar fyri frælsum handli millum limalondini. Stórt sæð øll lond við marknaðarbúskapi vóru limir í GATT, sum gjørdi karmar fyri tollsastum, ið limalondini bundu seg til at halda. GATT er ein stytting fyri *General Agreements on Tariffs and Trade,* sum leysliga verður umsett til vanligar avtalur um toll og uttanlandshandil.

[15] WTO varð stovnað í 1995 við tí uppgávu at fyrisita avtalur og reglur um handil millum limalondini. Høvuðsendamálið við WTO er at stimbra frælsan handil í heiminum. WTO var úrslit av seinastu samráðingunum um altjóða handilin, Uruguay runduni, og kom ístaðin fyri GATT. WTO er stytting fyri *World Trade Organization,* sum leysliga verður umsett til Heimshandilsfelagsskapurin.

Punktgjøld verða kravd sambært lógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi, sum upprunaliga er frá 1992, tá Føroyar høvdu gjørt nýggjan handilssáttmála við ES, sum hevði við sær, at føroyingar nú ikki bert kundu leggja toll á innflutning.

Sambært handilssáttmálanum við ES kann eingin nýggjur innflutningstollur og einki nýtt avgjald við somu ávirkan sum tollur ásetast í samhandlinum millum felagsskapin og Føroyar.

Í dagligari talu hava flest øll avgjøld, sum hava verið kravd til landskassan verið kallað tollur, men tað er ikki rætt. Munurin á tolli og avgjaldi er, at tollur verður kravdur av so at siga øllum vørum, ið verða fluttar inn á tolløkið. Tað sama ger seg galdandi fyri avgjald. Avgjald verður kravt av so at siga øllum vørum, ið verða fluttar inn á tolløkið, men haraftrat skal avgjald eisini krevjast av framleiðslu, ið fer fram á tolløkinum.

Fortreytirnar við at áleggja toll á innfluttar vørur broyttust tí munandi við hesi nýggju handilsavtaluni við ES. Áður høvdu føroysku avgjøldini næstan bert verið tollur á innfluttar vørur, men nú vórðu møguleikarnir at áleggja toll skerdir. Tó kundu Føroyar gera eina skipan við nýtslugjaldi, ið verður lagt javnt á innanlands framleiðslu og innfluttar vørur.

Tí var neyðugt at gera eina nýggja lóg, sum fekk heitið løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Henda lóg kom í staðin fyri løgtingslóg um innflutningsgjald v.m. Avgjaldssatsirnir komu at verða teir somu í nýggju lógini. Tó komu vørurnar, ið ikki hava uppruna í ES, at gjalda hægri avgjald, tí GATT-tollur varð lagdur afturat hesum vørum.

Munurin á nýggju lógini og gomlu lógini um innflutningsgjald er, at skuldi Løgtingið gjørt av at hækka avgjald á vørum, ið koma undir nýggju lógina um avgjald á framleiðslu og innflutningi, so skal avgjald eisini hækkast av tilsvarandi vøru, ið verður framleidd í Føroyum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at landsstýrið metti ikki, at lógin kom at hava nakran veruligan týdning, tí vørurnar vóru longu í løgtingslógini um innflutningsgjald, sum var galdandi. Tær flestu av hesum vørum vórðu ikki framleiddar í Føroyum, tá lógin kom í gildi. Skuldi tað tó hent, at hesar vørur fara at verða framleiddar í Føroyum, so skal avgjald rindast fyri framleiðslu av sovorðnum vørum, og hetta avgjald skal vera tað sama, sum avgjaldið um sama vøra verður flutt inn.

Til endamálið við lógini er at viðmerkja, at lógin var úrslit av fríhandilsavtaluni við ES, har tað var eitt krav frá ES, at føroysku myndugleikarnir ikki kunnu geva føroyskt framleiddum vørum fyrimun framum somu vørur framleiddar í útlondum, við bert at leggja avgjøld á útlendskt framleiddu vørurnar.

Síðan lógin kom í gildi eru onkrar smærri broytingar gjørdar, t.d. er punktgjaldið á bensini lækkað, punktgjaldið á spariperum er tikið av og eisini eru onkrar tekniskar

broytingar gjørdar í lógini. Inntøkur landskassans av punktgjøldunum vóru 158,5 mió. kr. í 2003, sí talvu 2.1.

## 2.4 Lønhæddargjald

Lønhæddargjaldið er eitt gjald, ið verður álagt a-inntøkuni hjá einum parti av tí virksemi, ið ikki er skyldugt at gjalda meirvirðisgjald. Avgjaldsskyldan fevnir um niðanfyri-standandi virksemi, ið annars er frítikið fyri at gjalda meirvirðisgjald:

1. Læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.
2. Tryggingarvirksemi.
3. Banka-, sparikassa- og annað fíggjarvirksemi.

Avgjaldsgrundarlagið er útgoldna A-inntøkan í avgjaldstíðarskeiðnum pluss avlop, um talan er um persónliga rikið vinnuvirki. Tryggingarvirksemi, banka-, sparikassa- og annað fíggjarvirksemi rinda 5% árliga, meðan annað virksemi rindar 2,5% árliga.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um lønhæddargjald frá 1993 stendur ikki nógv um endamálið við lógini um lønhæddargjald. Føroyska samfelagið var í svárari búskapar-ligari kreppu í 1993, og landskassin hevði stórar gjaldføristrupulleikar og trupulleikar við at útvega fígging til sítt virksemi. Høvuðsendamálið við lógini hevur tí uttan iva verið at útvega fígging til landskassanum frá einum parti av tí virksemi, ið ikki var skyldugt at gjalda meirvirðisgjald.

Inntøkur landskassans av lønhæddargjaldinum vóru næstan 12 mió. kr. í 2003, sí talvu 2.1.

## 2.5 Brennioljugjald

Lógin um serligt avgjald á brenniolju er upprunaliga frá 1986. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið vóru grundgevingarnar, at prísirnir á oljumarknaðinum vóru óvanliga lágir, og roknast kundi tí við, at nýtslan av olju og øðrum vørum fór at økjast og orkusparingin at minka. Afturat hesum kom, at peningaríkiligheit var í samfelagnum og fóru nýtslumøguleikarnir, sum vóru í samfelagnum tí at økjast enn meira við lágu olju-prísunum. Hetta fór at geva trupulleikar fyri gjaldsjavnan, tá prísirnir fóru upp aftur. Ætlanin var at bøta um hesa gongd við at áleggja gjald á brenniolju. Uppskotið var tí fíggjarpolitiskt at tálma nýtsluni í samfelagnum.

Í 1992 varð lógin avloyst av nýggjari lóg um serligt gjald á brenniolju. Í nýggju lógini vórðu gjørdar nakrar broytingar í mun til lógina frá 1986. Broytingarnar snúði seg í høvuðsheitinum um at taka av gjaldið fyri tungolju fyri at lætta um hjá SEV og øðrum stórum framleiðslufyritøkum í landinum. Í viðmerkingunum vóru grundgevingarnar, at nýggja lógin fór at lætta um hjá okkara framleiðslufyritøkum, sum framleiða til

útflutnings, og at elprísirnir fóru at lækka. Gjaldið varð eisini broytt úr 70 oyrum upp í 95 oyru og gjørt variabult.

Endamálið við nýggju lógini var tí í høvuðsheitinum at veita óbeinleiðis stuðul til SEV og aðrar stórar framleiðslufyritøkur, sum framleiddu til útflutnings. Lógin varð aftur broytt í 2000, men tann broytingin snúði seg bert um at fastfrysta oljugjaldið til 80 oyru liturin. Tað eru so at siga bert privat húsarhald, sum rinda brennioljugjald. Vinnan er við kunngerðum við heimild í lógini stórt sæð frítikin fyri at rinda oljugjald

Hóast oljugjald kann metast at vera eitt umhvørvisavgjald, hevur endamálið við brennioljugjaldinum ongantíð verið at taka serligt atlit at umhvørvinum. Endamálið við oljugjaldinum var upprunaliga fíggjarpolitiskt at tálma nýtsluni. Inntøkur landskassans av brennioljugjaldinum vóru næstan 60 mió. kr. í 2003, sí talvu 2.1.

## 2.6 Framleiðsluavgjøld

Framleiðsluavgjøld eru eisini puntkgjøld, ið eru ásett í løgtingslógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi frá 1992, sí punkt 2.3 um punktgjøld. Framleiðsluavgjøld eru punktgjøld, sum verða løgd á vørur framleiddar í Føroyum.

Orsøkin til at hesi punktgjøldini eru skrásett fyri seg sjálvi undir høvuðskontuni framleiðslugjøld í landsroknskapinum og fíggjarlógini er, at tað skal vera møguligt at greina sundur, hvussu nógv punktgjøld stava frá innfluttum vørum og hvussu nógv stava frá vørum framleiddum í Føroyum.

Nógv tann størsta inntøkan av framleiðsluavgjøldunum eru punktgjøldini av framleiðsluni av sterkum øli. Tað er lítið av aðrari framleiðslu í Føroyum, sum rindar punktgjøld av framleiðsluni. Inntøkur landskassans av framleiðsluavgjøldum vóru 18 mió. kr. í 2003, sí talvu 2.1.

## 2.7 Skrásetingargjald

Í 1986 samtykti Løgtingið lóg um skráseting av motorakførum. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at lógin var partur av arbeiðinum hjá landsstýrinum at gera uppskot til nýggja og nútímans tolllóg. Sum ein liður av hesum arbeiði var mælt til, at akfør vórðu tikin burtur úr tolllógini í tann mun, at punktgjøldini í staðin vórðu løgd um til eitt skrásetingargjald av motorakførum. Inntøkur landskassans og ávirkanin á einstøku bilasløgini skuldu verða nøkunlunda óbroytt. Skrásetingargjaldið skuldi hereftir byggja á eitt vektgjald og eitt virðisgjald.

Høvuðsorsøkin til at punktgjøldini vórðu tikin úr tolllógini og flutt yvir í nýggja lóg, sum varð nevnd lóg um skrásetingargjald av motorakførum var, at føroysku tollmyndugleikarnir vóru farnir at nýta vørunummur í altjóða vøruskránni at tolla eftir. Høgu

føroysku avgjøldini á bilum kundu ikki nýtast í hesum sambandi, og tí vórðu tey flutt yvir í nýggja lóg um skrásetingargjald av motorakførum, eins og í Danmørk.

Endamálið var tí at varðveita høgu avgjaldsinntøkurnar av motorakførum, eftir at tolllógin varð broytt.

Í sambandi við at lóg um meirvirðisgjald varð sett í gildi, varð lógin frá 1986 avloyst í 1992 av nýggjari lóg um skrásetingargjald á motorakførum. Broytingarnar í nýggju lógini um skrásetingargjald á motorakførum snúðu seg í høvuðsheitinum um at broyta gomlu lógina soleiðis, at hon svaraði til broyttu umstøðurnar í avgjaldsskipanini, eftir at Føroyar høvdu gjørt nýggja handilsavtalu við ES. Aðrar smávegis broytingar vórðu eisini gjørdar í nýggju lógini.

Onkrar aðrar broytingar eru síðan gjørdar í lógini, men avgjaldsgrundarlagið er framvegis virðið á akfarinum, har avgjaldið er lutfalsliga hægri tess hægri avgjaldsskylduga virðið á akfarinum er. Skrásetingargjaldið má tí metast at vera eitt fíggjaravgjald,[16] har fólk verða eggjað at keypa bilar, sum eru bíligir at framleiða.

Hetta er rættiliga ótíðarhóskandi og hevur óivað upprunaliga verið ætlað sum eitt slag av marglætistolli, har tey, ið høvdu betur ráð, rindaðu lutfalsliga meira í skrásetingargjaldi. Í dag er tað soleiðis, at bilur er ein vanlig nýtsluvøra, sum t.d. er dýrari at framleiða meira umhvørvisvinarligur og tryggur bilurin er. Lógin um skráseting av motorakførum eggjar í slíkum førum fólki at keypa minni umhvørvisvinarligar og tryggar bilar. Harafturat er sera lítið gjøgnumskygni á føroyska bilamarknaðinum.

Inntøkur landskassans av skrásetingargjaldinum vóru 75,7 mió. kr. í 2003, sí talvu 2.1.

## 2.7 Vegskattur (Vektgjald)

Fyri 1982 varð vektgjald kravt kvartalsvís við heimild í tveimum lógum. Í 1982 varð vektgjaldið samlað í eina lóg um vegskatt av motorakførum og kravt inn hálvárliga. Grundgevingin fyri lógini var at lætta um umsitingarliga. Vektgjaldið er eitt fíggjaravgjald, sum er ásett soleiðis, at tungir bilar rinda meir enn léttir bilar, somuleiðis sum diesel bilar rinda meir enn bensindrivnir bilar. Tungir bilar slíta veganetið meir enn léttir bilar og bensin er væl dýrari orkukelda enn diesel. Møguliga er hetta grundgevingin fyri, at allir bilar ikki rinda sama vegskatt.

Onkrar broytingar eru síðan gjørdar í lógini um vegskatt av motorakførum, t.d. er innkrevjingin flutt frá Gjaldstovuni til Bileftirlitið. Inntøkur landskassans av vegskattinum vóru góðar 48,6 mió. kr. í 2003, sí talvu 2.1.

[16] Fíggjaravgjald er avgjald, hvørs einasta endamál er at útvega inntøku til landskassan.

## 2.8 Ferðaavgjald

Upprunaliga lógin um avgjald á ferðaseðlum kom í 1979, tá Løgtingið samtykti lóg um avgjøld av ferðaseðlum til og úr Føroyum.[17] Avgjaldið var 30,- kr. av hvørjum uttanlandsferðaseðli. Í 1986 varð lógin broytt til bert at galda fyri ferðir úr Føroyum og avgjaldið varð hækkað til 200,- kr. Seinni er avgjaldið broytt, og er í dag 120,- kr. fyri hvønn ferðaseðil úr Føroyum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið frá 1986 vóru grundgevingarnar fyri at leggja avgjald á ferðaseðlar úr Føroyum, at ferðafólkatalið til og úr Føroyum var støðugt vaksandi, og tíanverri vísti tað seg soleiðis, at "ferðafólkaójavnin", t.e. munurin millum tað, útlendingar leggja eftir seg í Føroyum, og tað føroyingar leggja eftir seg í útlandinum, vísti stórt hall. Við at leggja avgjald á ferðir úr Føroyum, var ætlanin at minka um hugin til uttanlandsferðing føroyinga, minka um peningin teir høvdu til taks at nýta í útlandinum, samstundis sum økt varð um ta upphædd, sum útlendingar løgdu eftir seg í Føroyum.

Tað framgongur tí heilt greitt av viðmerkingunum til lógaruppskotið, at endamálið við lógini var fíggjarpolitiskt at minka um nýtslu føroyinga við at skerja møguleikarnar at ferðast og nýta pening uttanlands, samstundis sum ætlanin var at fáa fleiri inntøkur í landskassan frá útlendingum.

Føroyska ferðaavgjaldið er ikki av teimum hægstu samanborið við ferðaavgjaldið í nógvum øðrum londum. Ein stórur partur av ferðaavgjaldinum verður rindað av útlendskum ferðafólkum, sum á henda hátt leggja nakað av peningi eftir seg í landskassan.

Inntøkur landskassans av ferðaavgjaldinum vóru 11 mió. kr. í 2003, sí talvu 2.1.

## 2.9 Umhvørvisavgjald á smyrjiolju

Lógin um umhvøvisavgjald á smyrjiolju er frá 1992, tá Løgtingið samtykti, at latast skuldi 1 kr. fyri liturin í avgjaldi í landskassan av innfluttari ella her í landinum framleiddari smyrjiolju.

Í viðmerkingunum vóru grundgevingarnar fyri hesum avgjaldinum, at alt ov lítil mongd av spilloljuni í Føroyum varð latin inn til umhvørvisvinarliga viðgerð til endurnýtslu. Ein orsøk til at so lítil mongd varð latin til viðgerðar var mett at vera, at tað var ov kostnaðarmikið at lata spillolju inn til umhvørvisvinarliga viðgerð. Skotið varð tí upp at gera sum í øðrum norðanlondum, har tað var ókeypis at lata spillolju inn til viðgerðar. Ístaðin varð gjaldið lagt á framleidda ella innflutta smyrjiolju, sum skuldi fíggja viðgerðina til endurnýtslu, tá oljan var nýtt.

[17] Løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 1979 um avgjøld av ferðaseðlum frá og til Føroyar.

Sambært lógaruppskotinum skuldi eitt umhvørvisgjald leggjast á smyrjioljuna, tá hon varð flutt inn. Ætlanin var, at gjaldið skuldi svara til útreiðslurnar við eini innsavningarskipan og rakstur av reinsiverki. Landsstýrinum varð heimilað at gera nærri avtalur við innsavnarar og viðgerar um, hvussu innsavningin og burturbeiningin skuldu fara fram og gjaldið fyri hetta.

Umhvørvisgjaldið á smyrjiolju var tí eitt umhvørvis politiskt tiltak, sum skuldi fíggja eina umhvørvisvinarliga viðgerð av spillolju, soleiðis at hon kann endurnýtast. Inntøkur landskassans av umhvørvisgjaldinum vóru 2,2 mió. kr. í 2003, sí talvu 2.1.

## 2.10 Inntøkur landskassans av avgjøldunum

*Talva 2.1: Inntøkur landskassans av avgjøldum, 1997-2003.*

| *tús. kr.* | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **Býtið** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Meirvirðisgjald | 600.521 | 657.641 | 707.487 | 796.550 | 836.064 | 924.296 | 968.047 | 69,8% |
| Tollavgjøld | 18.686 | 24.166 | 29.124 | 24.925 | 28.854 | 30.086 | 33.547 | 2,4% |
| Punktgjøld | 149.371 | 152.844 | 153.425 | 163.687 | 159.291 | 167.857 | 158.478 | 11,4% |
| Lønhæddargjald | 8.586 | 8.967 | 9.596 | 9.912 | 10.669 | 10.688 | 11.892 | 0,9% |
| Brennioljugjald | 62.893 | 71.162 | 71.468 | 62.278 | 63.101 | 65.068 | 59.777 | 4,3% |
| Framleiðsluavgjøld | 15.599 | 16.144 | 16.094 | 14.933 | 16.327 | 17.538 | 18.049 | 1,4% |
| Skrásetingargjald | 60.441 | 68.711 | 73.044 | 63.397 | 77.723 | 80.250 | 75.669 | 5,5% |
| Vegskattur (Vektgjald) | 30.755 | 33.079 | 36.176 | 38.516 | 41.692 | 45.335 | 48.586 | 3,5% |
| Ferðaavgjald | 7.417 | 8.095 | 8.734 | 9.103 | 9.874 | 10.555 | 11.093 | 0,8% |
| Umhv. gj. á smyrjolju | 2.034 | 1.984 | 2.012 | 2.588 | 2.474 | 2.175 | 2.193 | 0,2% |
| **Tilsamans** | **956.303** | **1.042.793** | **1.107.160** | **1.185.889** | **1.246.069** | **1.353.848** | **1.387.331** | **100%** |

Í talvu 2.1 sæst gongdin í avgjaldsinntøkum landskassans frá 1997 til 2003, og hvussu lutfalsliga býtið var í 2003. Meirvirðisgjaldið er nógv tann størsti parturin við yvir 2/3 av avgjaldsinntøkunum. Síðan koma punktgjøldini, skrásetingargjaldið, brennioljugjaldið, vegskatturin, tollavgjøldini o.s.fr.

Frá seinnu helvt av 1990-árunum til í dag er tað merivirðisgjaldið, sum hevur staðið fyri vøkstrinum í avgjaldsinntøkum landskassans. Inntøkurnar frá hinum avgjøldunum saman-lagt, hava verið rættiliga støðugar, sí mynd 2.1.

*Mynd 2.1: Meirvirðisgjald og onnur avgjøld, 1997-2003.*



## 2.11 Niðurstøða um avgjaldslógirnar og tilmæli

Fleiri lógir eru í dag galdandi á føroyska avgjaldsøkinum, men meirvirðisgjaldslógin er nógv mest umfatandi, og næstan 70% av avgjaldsinntøkum landskassans stava nú frá meirvirðisgjaldinum.

Fyri 1993, tá ið føroyska meirvirðisgjaldslógin kom í gildi, vóru føroysku avgjaldslógirnar í høvuðsheitinum tollur og punktgjøld, sum vórðu løgd á innflutning. Tá ið Føroyar gjørdu nýggja handilsavtalu við ES í 1992 var tað eitt krav frá ES, at Føroyar ikki gjørdu mismun á innfluttum vørum og vørum framleiddum í Føroyum. Hetta er høvuðsorsøkin til meirvirðisgjaldslógina. Tað er lítið at ivast í, at tað framhaldandi verður eitt krav í sambandi við altjóða handilssamráðingar, at Føroyar hava eina avgjaldsskipan, sum ikki virkar kappingaravlagandi.

Fyrsta høvuðstilmæli verður tí, at Føroyar frameftir halda seg til eina meirvirðisgjaldslóg við so breiðum avgjaldsgrundarlag sum gjørligt. Tí eiga undantøk ikki at vera í meirvirðisgjaldslógini uttan at ómetaliga góðar grundgevingar eru fyri teimum. Undantøkini máa grundarlagið undan meirvirðisgjaldsskipanini, sí kapittul 5.

Niðurstøðurnar og tilmælini um hinar avgjaldslógirnar eru soljóðandi:

Av tí at tollavgjøldini so líðandi hvørva, so hvørt Føroyar gera fríhandilsavtalur við fleiri og fleiri lond, verður mælt til ikki at gera nakað annað við hesi avgjøld.

Samstundis sum mælt verður til at breiðka meirvirðisgjaldsgrundarlagið, verður mælt til at strika fleiri ótíðarhóskandi punktgjøld. Mælt verður tí til at strika tey punktgjøld, sum ikki eru sokallaðir umhvørvis- og giftskattir, sí kapittul 3. Hetta merkir sostatt eisini, at punktgjøld eisini frameftir fara at verða nýtt til at ávirka atburðin hjá brúkarum til frama fyri umhvørvi og heilsu.

Eingin nærri viðgerð hevur verið av lønhæddargjaldinum, sum er eitt gjald, ið verður álagt a-inntøkuni hjá einum parti av tí virksemi, ið ikki er skyldugt at gjalda meirvirðisgjald.

Brennioljugjaldið er eitt umhvørvisgjald, sum verður álagt við serligari lóg. Tað nýtist ikki at vera ein serlig lóg til hetta avgjaldið, tí tað kundi eins væl verið kravt inn umvegis punktgjøldini, eins og t.d. avgjaldið á bensini. Tí átti møguliga at verið umhugsað, at flutt hetta avgjaldið undir lógina um punktgjøld.

Framleiðsluavgjøldini eru punktgjøld, sum verða áløgd ávísari framleiðslu í Føroyum. Framleiðslugjøldini koma tí undir viðgerðina av punktgjøldum.

Lógin um skrásetingargjald av motorakførum er rættiliga fløkjaslig við lítlum gjøgnumskygni. Inntøkur landskassans frá skrásetingargjaldinum svara í dag til umleið 6% av

avgjaldsinntøkunum. Mælt verður tí til at gera umfatandi broytingar av skrásetingargjaldinum, soleiðis at skrásetingargjaldið verður gjørt um til eitt grønt avgjald, har avgjaldsgrundarlagið verður, hvussu nógv brennievni bilurin brúkar. Hervið verður fullkomuligt gjøgnumskygni viðvíkjandi skrásetingargjaldinum. Hetta tilmæli er nærri viðgjørt í kapitli 7.

Mælt verður eisini til at broyta lógina um vegskatt í sambandi við tilmæli um broytingar í lógini um skrásetingargjald, sí kapittul 7.

Ferðaavgjaldið stavar frá einum fíggjarpolitiskum tiltaki í 1980-árunum. Føroyska ferðaavgjaldið er ikki høgt samanborið við ferðaavgjaldið í nógvum øðrum londum. Ein stórur partur av ferðaavgjaldinum verður rindað av útlendskum ferðafólkum, sum á henda hátt leggja nakað av peningi eftir seg í landskassan. Mælt verður tí til ikki at gera nakað við ferðaavgjaldið.

Eins og brennioljugjaldið kundi umhvørvisgjaldið á smyrjiolju møguliga verið flutt undir punktgjøldini, har aðrar slíkar vørur eru skattaðar.

# 3. Punktgjøld

## 3.1 Punktgjaldssatsir

Í 1992 vórðu stórar broytingar gjørdar í føroysku toll-og avgjaldsskipanini. Orsøkin til broytingina var fyrst og fremst nýggi handilssáttmálin við ES og EFTA,[18] har ið Føroyar høvdu:

1. bundið seg til frá 1. januar 1992 at gera eina tollskipan, ið var í samsvar við GATT skyldurnar hjá Danmørk, og sum veitir vørum við uppruna í ES tollfrítøku.
2. bundið seg til frá 1. januar 1993 at taka núverandi skipan við fíggjar-innflutningsgjøldum og framleiðslugjøldum av fyri í staðin at gera eina nýggja skipan við óbeinleiðis skattum grundað á:

    a) eitt meirvirðisgjald grundað á somu meginreglur sum tær, sum felags-skapurin tilmælir sínum limalondum, herundir ikki at gera mismun á inn-fluttum vørum, og
    b) eina skipan við nýtslugjaldi, lagt javnt á innlendis framleisðlu og innfluttar vørur.

Fyrsta stóra broytingin, sum varð gjørd í 1992, var at skráseta allar vørur við vørunumrum sambært altjóða toll- og vøruskránni. Punkt 1 omanfyri varð eisini sett í gildi 1. februar 1992.

Í toll- og vøruskránni eru allar vørur flokkaðar í kapitlar, har vørurnar aftur eru deildar upp í vørusløg við einum hópi av vørunumrum. Í talvu 3.1 er yvirlit yvir, hvørjar vørur verða álagdar punktgjøld og hvussu stórir punktgjaldssatsirnir eru.

Punktgjøldini eru ógvuliga ymisk, bæði í støðd og hvussu avgjaldið verður álagt. Í nøkrum førum verður ein prosentsatsur lagdur á virðið umframt at avgjald verður lagt á hvørja eind. Tað skal viðmerkjast, at oljan, ið verður áløgd punktgjald, ikki er sama oljan, sum verður áløgd brennioljugjald sambært løgtingslógini um brennioljugjald; talan er ikki um sama vørunummar.

Tað eru ymiskir umsitingarligir trupulleikar, sum skapa skeivleikar við punktgjøldunum. Til dømis verða vanligri cd-spælarir álagdir 30% í punktgjaldi pluss 25% í meirvirðis-gjaldi, samstundis sum cd-spælarar til teldur ikki skulu rinda punktgjald, tí teldur og telduútgerð verða ikki áløgd punktgjøld, men bert meirvirðisgjald.

[18] EFTA er ein evropeiskur samstarvsfelagsskapur, sum varð stovnaður við tí sokallaðu Stokholmsavtaluni í 1959. Limalondini vóru Danmørk, Bretland, Noreg, Portugal, Sveis, Svøríki og Eysturríki. Seinni er limalistin broyttur, m.a. tí lond, ið eru vorðin limir í ES, samstundis eru farin úr EFTA, t.d. Danmørk og Portugal. EFTA er eitt sokallað fríhandilsøki, har londini innanhýsis hava avtalað allar sínamillum tollsatsir. Landbúnaðarvørur eru undantiknar. EFTA er stytting fyri *European Free Trade Association,* leysliga umsett til tað evropeiska fríhandilsøkið.

*Talva 3.1: Punktgjøld landskassans 2002.*

| Kapittul | Vøruslag | Avgjald |
|---|---|---|
| **17 Sukurvøra** | Sukurvøra | 30% + 12,00 kr./kg. |
| | Sukurvøra | 30% + 12,00 kr./kg. |
| **18 Sjokuláta** | Kakao | 30% + 12,00 kr./kg. |
| | Sjokuláta | 30% + 12,00 kr./kg. |
| **22 Rúsdrekka** | Øl - klassi A | 10,00 kr./ltr. |
| | Øl – klassi I | 7.60 kr./ltr. |
| | Gosvín | 24,00 kr./ltr. |
| | Heitvín | 41,00 kr./lt. |
| | Borðvín | 24,00 kr./ltr. |
| | Heitvín | 41,00 kr./ltr. |
| | Borðvín | 24,00 kr./ltr. |
| | Heitvín | 41,00 kr./ltr. |
| | Vín | 24,00 kr./ltr. |
| | Rúsdrekka | 330,00 kr./ltr. reint alkohol |
| **24 Tubbaksvørur** | Sigarir | 100 stk. 100,00 kr. |
| | Seruttir | 100 stk. 90,00 kr. |
| | Sigarettir | 100 stk. 80,00 kr. |
| | Tubbak | 120,00 kr./kg. |
| | Skrá og snús | 80,00 kr./kg. |
| **27 Motorbensin og olja** | Blýfrítt bensin | 2,30 kr./ltr. |
| | Bensin v/blýggj | 3,50 kr./ltr. |
| | Olja | 0,70 kr./ltr. |
| | Petroleum | 0,50 kr./ltr. |
| | Smyrjiolja | 0,70 kr./ltr. |
| | Tungar oljur | 0,70 kr./ltr. |
| **33 Parfuma o.a.** | Luktilsi, vakurleikarøkt, evni til hárrøkt | 20% |
| | Smyrsl o.t. | 20% |
| | Smyrsl o.t. | 20% |
| **36 Fýrverkarí** | Fýrverkarí | 100% |
| **48 Sigarettpappír** | Sigarettpappír | 0,05 kr./stk. |
| | Sigarettpappír | 0,05 kr./stk. |
| **84 Hvítvørur** | Ymisk húsarhaldstól | 20% |
| | Deilir til húsarhaldstól | 20% |
| | Gassvatnhitarar | 20% |
| | Sentrifugur | 20% |
| | Uppvaskimaskinur til húsarhaldsbrúk | 20% |
| | Vaskimaskinur | 20% |
| | Turkimaskinur | 20% |
| **85 Radio-, sjónvarpstól o.a.** | Dustsúgvarar o.a. | 20% |
| | Húsarhaldstól | 20% |
| | Rakimaskinur | 30% |
| | Lummalyktir o.t. | 30% |
| | Elektriskir vatnhitarar o.t. | 20% |
| | Hárturkarar | 30% |
| | Komfýrar o.o. húsarhaldstól | 20% |
| | Plátuspælarar | 30% |
| | Ljóðendurgevarar av kassettutypu | 30% |
| | Bandupptakarar | 30% |
| | Videobandupptakarar | 30% |
| | Mótakarar til radiotelefoni | 30% |
| | Móttakarar til persónkalli- og leitianlegg | 30% |
| | Sjónvarpstól | 30% + 300,00 kr./stk. |
| | Videomonitorar | 30% + 300,00 kr./stk. |
| | Lyktir, perur o.t. | 30% |
| | Deilir | 30% |
| **94 Lampur** | Lampur | 30% |
| | Ljósskeltir o.a. | 30% |

*Talva 3.2: Inntøkur landskassans av punktgjøldum í 2003.*

| Kapittul og vøruslag | Punktgjald | Mvg | Punktgjald og mvg í alt |
|---|---|---|---|
| 17 Sukurvøra | 8.397.351 kr. | 2.099.338 kr. | 10.496.689 kr. |
| 18 Sjokuláta | 9.935.581 kr. | 2.483.895 kr. | 12.419.476 kr. |
| 22 Rúsdrekka | 47.922.317 kr. | 11.980.579 kr. | 59.902.896 kr. |
| 24 Tubbaksvørur | 51.869.998 kr. | 12.967.500 kr. | 64.837.498 kr. |
| 27 Motorbensin og olja | 35.268.352 kr. | 8.817.088 kr. | 44.085.440 kr. |
| 33 Parfuma o.a. | 3.656.954 kr. | 914.239 kr. | 4.571.193 kr. |
| 36 Fýrverkarí | 1.233.988 kr. | 308.497 kr. | 1.542.485 kr. |
| 48 Sigarettpappír | 701.101 kr. | 175.275 kr. | 876.376 kr. |
| 84 Hvítvørur | 3.066.311 kr. | 766.578 kr. | 3.832.889 kr. |
| 85 Radiotól, sjónvørp o.a. | 9.684.726 kr. | 2.421.182 kr. | 12.105.908 kr. |
| 94 Lampur | 4.083.744 kr. | 1.020.936 kr. | 5.104.680 kr. |
| **Tilsamans** | **175.820.423 kr.** | **43.955.106 kr.** | **219.775.529 kr.** |

Endamálið við punktgjøldum er umframt at fáa til vega inntøkur, at fíggja almennar útreiðslur, eisini at ávirka atburðin og nýtsluvalið hjá fólki. Hetta sæst til dømis aftur við, at høg punktgjøld verða løgd á tubbakk og rúsdrekka, tí at fólk skulu roykja og drekka minni. Hetta er við teimum grundgevingum, at tað er sera skaðiligt at roykja og drekka.

Atlit skulu tí eisini takast at, hvussu nýtsluvalið hjá brúkarunum verður ávirkað, um punktgjøldini verða broytt.

## 3.2 Inntøkur landskassans av punktgjøldum

Í 2003 vóru inntøkur landskassans av punktgjøldunum 175,8 mió. kr.,[19] men av tí at meirvirðisgjald verður lagt omaná punktgjøldini, vórðu samlaðu inntøkurnar av punktgjøldunum pluss meirvirðisgjald 219,8 mió. kr. í 2003, sí talvu 3.2. Nógv tær stórstu punktgjaldsinntøkurnar stava frá tubbakki, rúsdrekka og bensini. Síðan kemur elektroniskur útbúnaður, radio- og sjónvarpsútgerð og sjokuláta og sukurvørur.

## 3.3 Niðurstøða um punktgjøldini og tilmæli

Tað eru ikki so nógv vørusløg, sum í dag verað áløgd punktgjøld, men tað er ein hópur av vørum undir hvørjum vøruslagi, sum í fleiri førum gera punktgjøldini trupul at umsita. Mælt verður til at punktgjøldini, sum koma undir vørusløgini lampur, radiotól, sjónvarpstól, hvítvørur og parfumu verða tikin av, samstundis sum undantøk í meirvirðisgjaldslógini verða strikað, soleiðis at loysnin verður so útreiðsluneutral fyri landskassan sum gjørligt.

Mælt verður eisini til, at punktgjøldini, sum koma undir vørusløgini sukurvørur, sjokuláta, rúsdrekka, tubbaksvørur, bensin, olja, fýrverkarí og sigarettpappír verða órørd, tí ein lækking av punktgjøldunum vil stimbra nýtlsuna av hesum vørum.

[19] Tað skal viðmerkjast, at inntøkur landskassans av punktgjøldunum, ið verða løgd á føroyskt framleiddar vørur, sum í høvuðsheitinum er øl, ikki eru tiknar við í talvuna. Hesar inntøkur vóru 17,5 mió. kr. í 2002.

# 4. Meirvirðisgjaldslóg

Løgtingslóg um meirvirðisgjald var annar og seinni partur av stóru broytingini í føroysku avgjaldsskipanini í 1992.

Meirvirðisgjaldsskipanin snýr seg í stuttum um, at tann, ið selur vørur ella tænastur, sum ikki eru fevndar av § 2, 3. stk., í meirvirðisgjaldslógini, skal skrásetast hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Tá ið viðkomandi selur ein vøru ella tænastu, skal meirvirðisgjald krevjast inn. Verður vøran ella tænastan útflutt, skal einki meirvirðisgjald krevjast inn. Harafturímóti er meirvirðisgjald eisini á vørum, sum virkið hevur keypt ella flutt inn. Tað eru sostatt tey meirvirðisgjaldsskrásettu virkini, sum krevja meirvirðisgjald inn fyri landskassan.

Við endan á hvørjum avgjaldstíðarskeiði, sum vanliga eru 4 um árið,[20] ger virkið upp, hvussu nógv er keypt, og hvussu stórur partur av hesum er meirvirðisgjald. Virkið ger eisini upp, hvussu nógv er selt, býtt sundur á innanlanda sølu og útflutning, og hvussu stórur partur av hesum er meirvirðisgjald. Við at draga tølini frá hvørjum øðrum fæst so at vita, um virkið hevur keypt fyri meir, enn tað hevur selt, ella øvugt.

Er meirvirðisgjaldið á søluni størri enn meirvirðisgjaldið á keypinum, skal virkið rinda henda munin í landskasssan. Harafturímóti fær virkið meirvirðisgjald endurgoldið úr landskassanum, um meirvirðisgjaldið av keypinum er størri enn meirvirðisgjaldið av søluni í einum avgjaldstíðarskeiðið. Hetta er vanliga, tá ið eitt virki er undir stovnan, tí tað tá ikki hevur nakra sølu, ella í førum tá ið virkið flytur út alla sína framleiðslu. Í sovorðnum førum verður meirvirðisgjald ikki kravt av søluni, og alt tilfakturerað meirvirðisgjald verður endurgoldið.

Tað var ein nýggj uppgáva og stór broyting í bókhaldsskipanunum hjá vinnuligu virkjunum, at tað nú var álagt teimum at føra meirvirðisgjaldsroknskap.

Kjarnin í meirvirðisgjaldslóg er, at sama avgjald verður kravt av einari innfluttari vøru sum av vøru, ið verður framleidd og seld innanlanda. Tað merkir, at hetta er ein skipan, ið kann nýtast í einari fríhandilsavtalu við onnur lond og felagsskapir.

Samsvar er fingið á meirvirðisgjaldslógirnar í ES-limalondunum. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst, at londini skulu kappast á jøvnum føti, og at tað tí er umráðandi, at tey virka undir somu avgjaldsskipanum. Tó hava fleiri lond fleiri meirvirðisgjaldssatsir, og meirvirðisgjaldssatsirnir eru ikki eins í teimum einstøku limalondunum, hóast ES-kommisiónin í 1987 samtykti, at stig skuldu takast til eisini at fáa meirvirðisgjaldssatsirnar at samsvara.

[20] Avgjaldstíðarskeiðið kann eisini vera styttri.

Í Føroyum varð avgjørt at seta eina meirvirðisgjaldsskipan í gildi við einum avgjaldssatsi. Hetta var tað sama sum Ísland gjørdi, tá Ísland setti sína meirvirðisgjaldsskipan í gildi 1. januar 1990. Annars skal viðmerkjast, at meirvirðisgjaldslóggávan í teimum londum, ið ikki eru limir í ES, t.d. Noregi og Íslandi, líkist nógv lóggávuni í ES.

Tað vóru eisini aðrar orsøkir enn handilssáttmálin við ES, sum gjørdu at neyðugt var at broyta óbeinleiðis skattaskipanina. Grundarlagið undir avgjaldsskipanini, sum var galdandi áðrenn meirvirðisgjaldsskipanina, var lóg um serligt innflutningsgjald frá 1961 og lóg um eyka innflutningsgjald frá 1979. Hetta vóru sokallað fíggjarinnflutningsgjøld, sum vórðu áløgd fyri at landskassin skuldi fáa nakrar inntøkur. Avgjøldini vórðu bert løgd á vørur, ið vórðu fluttar inn. Eingin óbeinleiðis skattur varð tí lagdur á tænastur.

Fyri at føroysk framleiðsla kundi kappast við útlendska framleiðslu, var gamla skipanin sett saman soleiðis, at virki, ið fluttu vørur inn til framleiðslu, kundu fáa tær til ein lægri toll. Eisini var tilfar til fiskivinnuna í summum førum tollfrítt.

Av tí at avgjaldið bert varð kravt av vørum, ið vórðu fluttar inn, var avgjaldsgrundarlagið rættiliga lítið. Tað vóru lutfalsliga fáar vørur, ið rindaðu avgjaldið, og avgjaldið á hesum vørum var rættiliga høgt. Matvørur vórðu til dømis tollaðar við 33% og samlaða avgjaldið á klæðum var 48%.

Avgjaldið varð harnæst kravt av fakturaprísinum, soleiðis at virðisgrundarlagið, tað ið avgjald skal roknast av, var rættiliga lítið. Við meirvirðisgjaldsskipanini varð hetta broytt, tí her skuldi bæði gjaldast meirvirðisgjald fyri innfluttar vørur og tænastur. Vinningurin var somuleiðis ein partur av virðisgrundarlagnum, sum meirvirðisgjald skuldi roknast av.

Broytingin í føroysku toll- og avgjaldslóggávuni, eftir at meirvirðisgjaldslógin kom í gildi, hevði eisini til endamáls at skapa nýggjar karmar hjá føroyska vinnulívinum at virka undir. Av tí at føroyska vinnan eftir 1. januar 1993 ikki longur varð vard av einum tollmúri, hevði landsstýrið við meirvirðisgjaldslógini lagt dent á at geva føroyskari vinnu somu avgjaldssømdir, sum grannalondini góvu teirra vinnulívi.

Tað var útflutningsvinnan, sum kom at hava størsta fyrimunin av broytingunum. Fyri vanliga brúkaran kom broytingin við meirvirðisgjaldslógini at merkja, at tænasturnar komu at rinda avgjald. Meirvirðisgjaldslógin hevði eisini við sær, at fleiri komu at gjalda tað, ið skuldi í landskassan, soleiðis at avgjaldstrýstið varð spjatt út yvir eitt størri øki. Harnæst kom insitamentið hjá virkjum at seta prísin niður, t.d. tá ið útsøla er, at verða størri, av tí at meirvirðisgjald varð roknað av søluprísinum.

Tá tað altíð er brúkarin, sum í síðsta enda kemur at rinda avgjaldið, komu tað at verða teir brúkarar, sum brúka mest av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, ið komu at rinda mest í avgjaldi, eftir at meirvirðisgjaldslógin avloysti gomlu avgjaldsskipanina.

Um Føroyar skuldu hava onnur avgjøld enn meirvirðisgjald, so høvdu Føroyar í handilsavtaluni við ES bundið seg til eina skipan við nýtslugjaldi, lagt javnt á innlendis framleiðslu og innfluttar vørur. Tí vórðu tey punktgjøld, sum framvegis vórðu galdandi,

eftir at meirvirðislógin kom í gildi, og sum áðrenn 1. februar 1992 vóru ásett í løgtingslóg um innflutningsgjøld, t.d. gjald á rúsdrekka, sigarettum, sjónvarpstólum og luktilsi, eisini broytt soleiðis, at hesi komu at fylgja uppbýtingini í toll- og vøruskránni. Neyðugt var eisini at gera eina nýggja lóg, og fekk henda lóg heitið “løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi”, sum eisini var galdandi eftir 1. januar 1993. Tað ger sostatt tað sama um ein vøra, sum skal rinda punktgjald, er framleidd í Føroyum ella um hon er flutt inn, vøran skal rinda sama avgjald.

Tá ið umskipanin av toll- og avgjaldsskipanini var liðug og meirvirðisgjaldslógin kom í gildi 1. januar 1993, fevndi føroyska toll- og avgjaldsskipanin um eina løgtingslóg um toll, eina løgtingslóg um meirvirðisgjald og eina løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Haraftrat kom so løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum og løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju. Síðan tá eru aðrar broytingar gjørdar og onkur nýggj lóg er komin á økinum, t.d. umhvørvisgjald á smyrjiolju.

Meirvirðisgjaldið er eitt sølugjald. Munurin á einum innflutningsgjaldi og einum sølugjaldi er, at innflutningsgjaldið er eitt gjald, ið verður kravt, tá ið vørur verða fluttar inn, meðan sølugjald er eitt gjald, ið verður kravt, tá ið selt verður innan vøru- og tænastuøkið.

Sølugjald hevði ikki verið nýtt í Føroyum, áðrenn meirvirðisgjaldslógin kom í gildi. Framleiðslugjald var tó á øli og mineralvatni. Munurin á framleisðlugjaldi og sølugjaldi er, at framleiðslugjaldið er eitt gjald, ið verður goldið, tá ið ávísar vørur verða framleiddar, men sølugjaldið verður goldið, tá ið vørurnar verða seldar. Sølugjaldið kann tí sigast at vera betri fyri gjaldførið hjá virkjum enn framleiðslugjaldið.

Sølugjald kann annaðhvørt innkrevjast í einum einstøkum søluliði, t.d. framleiðslu-, heilsølu-, ella smásøluliði (avgjald í einum liði), ella tað kann verða kravt inn í øllum søluliðum (avgjald í fleiri liðum).

## 4.1 Avgjald í einum liði

Tað eru nógvir ivaspurningar um, hvussu eitt avgjald skal leggjast til rættis, um avgjaldið av einari vøru bert verður kravt einaferð, áðrenn hon kemur til brúkaran.

Tað hevði t.d. verið ein stórur praktiskur trupulleiki, um avgjald bert hevði verið kravt av rávøru, tí ein vøra, sum í einum liði verður roknað sum liðugtvøra, gott kann vera rávøra í einum øðrum liði. Haraftrat hevði rávøruavgjald givið rættiliga lítlan vinning í mun til støddina á avgjaldssatsinum, og orsakað av skiftandi rávøruforbrúki hevði tað givið eitt sera skiftandi avgjald á lidnar brúkaravørur. At enda hevði tað verið trupult at ásett avgjald á innfluttar liðugtvørur.

Fyri at sleppa undan omanfyri nevndu trupulleikum, eigur avgjald ikki at verða lagt á vørur, fyrr enn vørurnar eru lidnar til forbrúk. Avgjaldið kann sostatt verða kravt í einum av hesum liðum:

a) framleisðlu- ella innflutningsliði
b) heilsøluliði
c) smásøluliði (síðsta liði)

Avgjaldsálegging í framleiðsluliði hevur við sær, at vørur verða avgjaldsavgreiddar, tá ið tær verða seldar frá framleiðsluvirkinum. Vørur, ið verða fluttar inn, mugu tí undir hesi skipan verða avgjaldsavgreiddar, tá ið tær verða fluttar inn.

At avgjald verður kravt í heilsøluliði merkir, at avgjaldsavgreiðslan vanliga fer fram í næstseinasta søluliði, áðrenn vøran kemur til brúkaran, tað er, tá ið hon verður seld smásøluni.

At enda merkir avgjald í smásøluliði, at avgjaldsavgreiðslan ikki fer fram, fyrr enn vøran verður seld brúkaranum.

Verður avgjald lagt í heilsølu- ella smásøluliðinum, má avgjaldseftirlit ikki bert fremjast á virkjum í viðkomandi liði, men eisini á virkjum í undanfarnu liðum, tí tær vørur, ið avgjald skal leggjast á, prinsipielt verða avgjaldsskyldugar í tí løtu tær eru liðugt framleiddar. Hetta hevur so við sær, at framleiðandi virki, ið selja vørur sínar ella ein part av teimum beinleiðis til brúkarar, t.d. handverkarar, altíð skulu krevja avgjald av hesari sølu og avrokna tað við avgjaldsmyndugleikarnar.

Tá meirvirðisgjaldslógin kom í gildi í Føroyum vóru flestu lond farin frá avgjaldi í einum liði. Í Føroyum varð tí valt, at fara beinleiðis til meirvirðisgjald.

## 4.2 Avgjald í fleiri liðum

### 4.2.1 Kumulativt avgjald

Avgjald í fleiri liðum kann vera kumulativt avgjald ella meirvirðisgjald. Kumulativt avgjald er soleiðis, at avgjald í hvørjum einstøkum søluliði skal krevjast av fulla søluprísinum. Avgjald verður sostatt lagt á hvørja einstaka vøru ella tænastu fleiri ferðir á vegnum fram til endaliga brúkaran. Niðanfyri er víst, hvussu kumulativt avgjald virkar, har avgjaldssatsurin er 25%.

| | Søluprísur u/avgjald | Avgjald |
|---|---|---|
| Rávøruframleiðsla (t.d. ull) | 100 kr. | 25 kr. |
| Hálvfabrikatframleiðsla (tógv) | 200 kr. | 50 kr. |
| Liðugtvøruframleiðsla (meturvørur) | 280 kr. | 70 kr. |
| Heilsøla | 320 kr. | 80 kr. |
| Smásøla | 420 kr. | 105 kr. |

Brúkaraprísur, íroknað avgjald, verður sostatt 525 kr. Samlaða avgjaldið goldið av vøruni er 330 kr., sum er umleið 63% av brúkaraprísinum, íroknað avgjald. Samlaða avgjaldið verður sostatt eftir kumulativu skipanini munandi hægri enn avgjaldið, við sølu í síðsta liði, t.e. av brúkaraprísinum.

Hesin avgjaldsháttur verður av somu orsøk ikki hildin at vera nýtiligur í sambandi við nútímans sølugjald.

### 4.2.2 Meirvirðisgjald

Meirvirðisgjald liggur ímillum einliðaravgjald og kumulativt avgjald. Meirvirðisgjald ber í sær, at avgjald skal roknast av søluprísinum við eina og hvørja sølu eins og við kumulativum avgjaldi, men munurin er, at virki kunnu draga frá avgjaldið, sum tey gjalda, tá ið tey keypa vøruna. Hvørt einstakt virki skal soleiðis bert inngjalda avgjaldið av virðisøkingini, sum er farin fram í virkinum. Tað verður tí endaligi brúkarin, sum ikki er meirvirðisgjaldsskrásettur, sum rindar fult meirvirðisgjald. Niðanfyri er víst, hvussu meirvirðisgjald virkar, meirvirðisgjaldssatsturin er 25%.

| | Prísur uttan avgjald | Inngangandi avgjald | Útgangandi avgjald | Avgjald at rinda í landskassan |
|---|---|---|---|---|
| **Rávøruframleiðsla** | | | | |
| Keyp | 0 | 0 | | |
| Søla | 80 | | 20 | 20 kr. |
| **Liðugtvøruframleiðsla** | | | | |
| Keyp | 80 | 20 | | |
| Søla | 200 | | 50 | 30 kr. |
| **Heilsøla** | | | | |
| Keyp | 200 | 50 | | |
| Søla | 240 | | 60 | 10 kr. |
| **Smásøla** | | | | |
| Keyp | 240 | 60 | | |
| Søla | 320 | | 80 | 20 kr. |
| **Avgjald íalt at rinda** | | | | **80 kr.** |

Samanlagda upphæddin av avgjøldunum goldin í øllum søluliðum er sostatt tann sama sum tað roknaða avgjaldið við seinastu sølu av vøruni.

Fevnir meirvirðisgjaldið um allar søluliðir, kemur avgjaldstrýstið fyri brúkaran soleiðis at svara til eitt avgjald í smásøluliði við sama avgjaldssatsi sum meirvirðisgjaldið. Verður smásøluliðið undantikið avgjald, svarar avgjaldsstrýstið á sama hátt til eitt heilsølu-avgjald, og verða bæði heilsølu- og smásøluliðið undantikin, svarar avgjaldið til eitt avgjald í framleiðsluliðinum. Meirvirðisgjaldið kemur tí at svara til eitt avgjald í einum liði.

Tað er av praktiskum orsøkum, at avgjaldið verður kravt í fleiri liðum og ikki í einum. Tá avgjaldið fevnir um allar liðir, hevur tað tann fyrimun fyri virkini, at avgjald skal roknast við allar sølur, soleiðis at seljarin ikki nýtist at ivast í, um hvør einstøk søla møguliga kann fara fram uttan avgjald.

Fyri at skilja meirvirðisgjaldsmeginregluna er umráðandi at hava í huga, at tá ið hvør einstøk vøra verður avgjaldsavgreidd, hevur virkið í praksis ikki møguleika fyri at rokna, hvussu mikið av hesari vørueind er goldið í avgjaldi í undanfarnum søluliðum. Skal virkið hava møguleika fyri hesum, má tað í hvørjum einstøkum føri kanna innkeyps-fakturan gjølla, og tað kann ofta vera torført at finna, frá hvørjari vørusending hvør einstøk vørueind stavar. Hjá framleiðsluvirkjum hevði hetta verið ein sera trupul uppgáva, sum ikki kann gerast til fulnar.

Tí kann avgjaldsskipanin ikki vera soleiðis tilrættisløgd, at frádráttir fyri avgjøld goldin av hvørjari einstakari vøru ella av hvørjari einstakari vørusending í undanfarnum liðum verða gjørdir í praksis. Í staðin má virkið gera upp avgjaldið av seldum vørum í einum ávísum tíðarskeiði á sama hátt sum við avgjaldi í einum liði, tað er avgjald av fulla sølu-prísinum, og síðani draga avgjald goldið av keyptum vørum, keyptar í sama tíðarskeiði frá hesari upphædd, hóast tær tá kanska ikki eru seldar.

## 4.3 Meirvirðisgjaldsneutralitetur

Stórur dentur hevur verið lagdur á meirvirðisgjaldsneutralitet í øllum londum, sum hava fingið sær meirvirðisgjaldsskipan. Tað merkir, at avgjaldið ikki skal ávirka atburðin hjá vinnulívi og brúkarum.

Fyri at avgjaldið skal verða neutralt fyri vinnulívsbygnaðin, er tað eitt krav, at avgjalds-skipanin er tilrættisløgd soleiðis:

- at sama avgjald skal rindast, uttan mun til hvussu nógvar handilsliðir ein vøra fer ígjøgnum,
- at avgjaldið í prosentum av prísinum á einari vøru er tað sama, uttan mun til hvørjum virki keyparin keypir frá, og

- at avgjaldstrýstið er tað sama, uttan mun til um ein vøra er handverksframleidd ella framleidd við størri ella minni maskinu.

Við øðrum orðum má ikki vera størri fyrimunur fyri keypara at gera síni keyp hjá einum ávísum latara fram um aðrar. Meirvirðisgjaldsskipanin skal ikki eggja brúkaranum at broyta brúkarasamansetingina. Tí mugu vørur og tænastur í størst møguligan mun vera avgjaldsskyldugar.

Ein meirvirðisgjaldsskipan, har eingi undantøk eru og har alt vinnuligt virksemi er avgjaldsskyldugt, er tí fullkomiliga meirvirðisgjaldsneutral. Ein slík meirvirðisgjaldsneutral skipan er tí rættiliga breið, og tí kann meirvirðisgjaldssatsurin vera væl lægri, men geva somu inntøku í landskassan sum ein smalri skipan við fleiri undantøkum.

Í sambandi við innflutning er kravið til neutralitet, at avgjaldið av innfluttari vøru skal vera tað sama sum av vøru, ið er framleidd innanlendis. Tí merkir neutralitetskravið eisini, at útfluttar vørur verða frítiknar fyri avgjald.

Í 2003 vóru meirvirðisgjaldsinntøkur landskassans 968 mió. kr. Hetta svarar til 70% av avgjaldsinntøkum landskassans.

## 4.4 Niðurstøða um meirvirðisgjaldslógina og tilmæli

Tað hevur sostatt stóran týdning fyri eina meirvirðisgjaldsskipan, at avgjaldsgrundarlagið er breitt og fá undantøk eru í meirvirðisgjaldslógini. Undantøkini máa støðið undan meirvirðisgjaldsskipanini. Undantøkini virka kappingaravlagandi, tí tey ganga út yvir meirvirðisgjaldsneutralitetin, sum hevur stóran týdning í sambandi við meirvirðisgjaldsskipanina. Meirvirðisgjaldið skal sostatt ikki ávirka atburðin hjá vinnulívi og brúkarum.

Mælt verður tí til at strika undantøk í meirvirðisgjaldslógini samstundis sum punktgjøld verða strikað, soleiðis at loysnin verður so útreiðsluneutral fyri landskassan sum gjørlig. Mælt verður somuleiðis frá at gera fleiri undantøk í meirvirðisgjaldslógina frameftir, uttan so, at heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi.

# 5. Undantøk sambært § 12 í meirvirðisgjaldslógini

Sambært § 12 í meirvirðisgjaldslógini kunnu ymiskar veitingar av vørum og tænastum haldast uttan fyri meirvirðisgjald. Talan er sostatt um meirvirðisgjaldsskylduga sølu, sum sleppur undan meirvirðisgjaldi, ella sølu har meirvirðisgjaldssasturin er null. Virki, ið hava slíka sølu fáa tó meirvirðisgjaldið av keyptum vørum endurrindað.

Í lógaruppskotinum til meirvirðisgjaldslóg frá 1992, varð meirvirðisgjaldsfría sølan skift í tríggjar bólkar:

1. Søla av vørum, sum verða fluttar út av landinum, og tænastur, ið verða gjørdar undir viðurskiftum, ið kunnu metast javnt við útflutning.
2. Søla, og fyri ein part útleiga av nøkrum vørum, sum ítøkiliga eru nevndar í lógini og av umvælingartænastum o.t. av ávísum av hesum vørum.
3. Søla av vørum, sum virki hevur fingið til vega ella tikið í nýtslu, einans til endamál, har meirvirðisgjald ikki kann roknast við í inngangandi avgjald (§ 16, 3. stk.).

§ 12 í meirvirðisgjaldslógini inniheldur eisini eina reglu um, at avhending av vøru-goymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum hjá einum skrásettum virki ikki kann roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið avhendingin fer fram sum ein liður í eini avhending av øllum virkinum ella einum parti av hesum, og nýggj handhavin rekur skrásett virki.

Harumuframt kunnu ávísar veitingar, t.d. sýnislutir, reklamutilfar og endurgjaldslatingar haldast uttanfyri meirvirðisgjald. Her er bæði talan um vørur og tænastur.

Upprunaliga vóru fylgjandi ásetingar undir § 12 í meirvirðisgjaldslógini skift soleiðis í høvuðsbólkarnar omanfyri.

## 5.1 Søla í sambandi við útflutning

Niðanfyri eru tær ásetingar um útflutning, sum vóru í upprunaligu lógini um meirvirðis-gjald, ið kom í gildi 1. januar 1993. Hetta er meirvirðisgjaldsfría sølan, sum í høvuðs-heitinum kemur undir bólk 1 omanfyri.

§ 12, 1. stk. a. Vørur, sum av virkinum verða útfluttar til útlond, og tænastur, sum verða gjørdar í útlondum.

§ 12, 1. stk. b.  Flutning av vørum her á landi, tá flutningurin fer fram beinleiðis til ella frá útlondum.

§ 12, 1. stk. c. Arbeiðstænastur á vørur, tá tænastan verður gjørd fyri útlendska rokning, og virkið eftir viðgerðina útflytur vørurnar til útlond, og konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá framleiðslan av vørunum skal fara fram uttanlands.

§ 12, 1. stk. d. Projekteringsarbeiði v.m. viðvíkjandi bygningum og aðrari fastari ogn uttanlands.

§ 12, 1. stk. e. Neyðuga útgerð, sum verður latin til nýtslu um borð á flogfari og skipi í uttanlandsferðslu (undantikið sportsflogfør og lystfør), og tænastur, sum verða gjørdar fyri slík flogfør og skip.

## 5.2 Meirvirðisgjaldsfrí søla, sum ítøkiliga er nevnd í lógini

Annar høvuðsbólkurin undir § 12 er meirvirðisgjaldsfrí søla av vørum og tænastum, sum ítøkiliga verður nevnd undir hesi grein. Hetta eru vørur og tænastur, sum ikki hava nakað ítøkiligt við útflutning at gera, men sum politisku myndugleikarnir við øðrum grundgevingum hava valt at hildið uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu. Upprunaliga vóru ikki so nógv undantøk av hesum slag í meirvirðisgjaldslógini, sum kom í gildi 1. januar 1993.

Í upprunaliga meirvirðisgjaldslógaruppskotinum frá 1992 og teimum uppskotum, sum eru komin eftir 1993, eru í flestu førum rættiliga fáar grundgevingar fyri, hví hesi undantøk skulu vera í merivirðisgjaldsskipanini. Í meirvirðisgjaldslógini frá 1993 vóru hesi undantøk,[21] sum koma undir bólk 2 omanfyri:

§ 12, 1. stk. f. Søla og útleiga av flogførum og av skipum, sum eru 5 GT og meira, undantikið sportflogfør og lystfør.

§ 12, 1. stk. g. Umvælingar-, viðlíkahalds- og ísetingararbeiði av fastari útgerð í tey flogfør og skip, sum eru nevnd í punkt f, og tilfar, sum er latið av viðkomandi virki í hesum sambandi.

§ 12, 1. stk. h. Søla av tíðindabløðum.

§ 12, 1. stk. i. Útlendsk tíðarrit í blaðhaldi, tá haldaragjaldið er fingið í lag millum haldaran og útlendska útgevaran.

Stykkið h og i er av praktiskum orsøkum seinni broytt, og er nú orðað soleiðis:
§ 12, 1. stk. h. Søla av tíðindabløðum og prenting fyri tíðindabløð.

Upprunaliga stk. j er tí eisini broytt til stk. i, og var upprunaliga orðað soleiðis, men er seinni broytt, sí punkt 5.5.

[21] Undantøk, sum eru komin eftir 1993 verða viðgjørd undir punkt 5.5.

§ 12, 1. stk. j. Søla undantikin søla til heilsølu ella smásølu av fiski og skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni).

## 5.3 Meirvirðisgjaldsfrí søla har inngangandi avgjald ikki kann roknast

Søla av vørum, sum virkið hevur fingið til vega ella tikið í nýtslu, einans til endamál, har meirvirðisgjald ikki kann roknast við í inngangandi avgjald er frítikin fyri meirvirðisgjald. Hetta kann t.d. vera matur, íbúð, naturaliusamsýning, summarhús og gávur til eigara og starvsfólk á virkinum.

## 5.4 Kunngerðir við heimild í § 12 í meirvirðisgjaldslógini

Umframt tey undantøk, sum beinleiðis eru ásett undir § 12 eru eisini fleiri kunngerðir um undantøk við heimild í § 12 í meirvirðisgjaldslógini. Kunngerðirnar við heimild í § 12 eru hesar:

Kunngerð nr. 130 frá 24.05.1993 um frítøku fyri mvg av vørum, ið verða útfluttar sum ferðagóðs.

Her er talan um vørur, ið hava eitt virði yvir 300,- kr., sum meirvirðisgjaldsskrásett virki selja til persónar, ið hava bústað í útlandi, og sum hesi taka við sær til útland sum ferðagóðs, kunnu verða frítiknar fyri meirvirðisgjald sambært reglunum í hesi kunngerð. Hetta er *tax-free* søla, sum øll lond hava.

Kunngerð nr. 109 frá 03.10.1994 um meirvirðisgjaldsskylduga sølu av bókum.

Bøkur, sum hoyra undir vøruflokk 4901 í toll- og vøruskránni, eru frítiknar fyri meirvirðisgjald. Hetta er í høvuðsheitinum allar bøkur.

Kunngerð nr. 118 frá 07.12.1994 um proviantering av skipum og flogførum til nýtslu umborð ella til sølu til ferðafólk.

Hetta er proviantur, sum verður nýttur umborð og seldur til ferðafólk í skipum og flogførum, ið fara í fremmanda havn uttan fyri tað føroyska tolløkið.

Kunngerð nr. 49 frá 17.04.1998 um meirvirðisgjald av ávísum tænastum, ið verða seldar til útlond ella keyptar í útlondum.

Hetta er søla av ávísum tænastum til skrásettar keyparar, ið reka virksemi ella hava bústað uttanlands.

Kunngerð nr. 50 frá 17.04.1998 um meirvirðisgjaldsfrítøku fyri sjóklæðir.

Søla av sjóklæðum til manning á meirvirðisgjaldsskrásettum fiskiførum er frítikin fyri meirvirðisgjald.

Henda kunngerðin er ógjørlig at umsita, tí sølubúðirnar skilja ikki í millum, um talan er um sjóklæðir ella ikki, tá tær selja til sjómenn við meirvirðisgjaldsskrásettum fiskiførum. Tað er eingin allýsing av sjóklæðum í kunngerðini. Kunngerðin skapar tí skeivleikar, tí nakrir borgarar kunnu keypa klæðir uttan meirvirðisgjald.

Kunngerðin eigur tí at vera tikin av ella broytt, soleiðis at tað verður gjørt fullkomiliga greitt í kunngerðini, hvat sjóklæðir eru fyri klæðir. Hetta kann gerast við at nýta toll- og vøruskránna, men hetta er ein loysn, sum verður tung at umsita hjá sølubúðunum. Mælt verður heldur til at taka kunngerðina av, tí talan er hóast alt um sølu av arbeiðsklæðum til manning við meirvirðisgjaldsskrásettum fiskiførum, sum fáa keypsavgjaldið afturgoldið. Reiðaríini fáa tí meirvirðisgjaldið afturgoldið, um tey sjálvi keypa arbeiðsklæðini til manningarnar.

Sjóklæði eru eisini undantikin meirvirðisgjald undir § 12, 1. stk. litra k í sjálvari meirvirðisgjaldslógini. Endamálið við kunngerðini er tí at gera greitt, hvør kann keypa sjóklæðir, men tað er ongastaðni gjørt greitt, hvørji klæðir eru sjóklæðir.

Tað skal viðmerkjast, at tað eisini eru aðrar kunngerðir um meirvirðisgjaldsfrítøkur. Kunngerð nr. 171 frítekur tað virksemið, sum rindar lønhæddargjald, fyri meirvirðisgjald. Kunngerð nr. 77 ásetur, at kommunur og kommunal virkir og stovnar fáa 75% av meirvirðisgjaldinum endurrindað úr landskassanum.

## 5.5 Undantøk undir § 12 eftir 1993

Síðan 1993 eru fleiri undantøk komin undir § 12, og tað koma næstan í hvørjari tingsetu uppskot um fleiri undantøk undir hesa grein. Tað eru serliga hesi undantøk, sum úthola meirivirðisgjaldsskipanina.

Undantøkini undir § 12, sum eru komin eftir 1993, verða lýst niðanfyri. Tað skal viðmerkjast, at tað í flestu førum eru fáar viðmerkingar til lógaruppskotini til undantøkini.

§ 12, 1. stk. h. Søla av tíðindabløðum og prenting fyri tíðindabløð. (Løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 1994, § 1, 1. stk., nr. 2).

Søla av tíðindabløðum var í meirvirðisgjaldslógini frá 1993 avgjaldsfrí. Henda broytingin hevði við sær, at eisini prentingin av tíðindabløðum gjørdist avgjaldsfrí.

§ 12, 1. stk. i. Søla av fiski og skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í Toll- og vøruskránni) og sølu av ídnaðarfiski (jvb. nr. 05.11.91.91 til 05.11.91.99 í Toll- og vøruskránni) frá skipi og/ella alibrúki til útflutningsfyritøkur, og ímillum útflutningsfyritøkur. Sum útflutningsfyritøkur er at skilja fyritøkur, hvørs søla beinleiðis ella óbeinleiðis í høvuðsheitum er til útlandið.

Henda áseting var upprunaliga litra j í meirvirðisgjaldslógini frá 1993, men er seinni gjørd meira nágreinilig uttan at endamálið við innihaldinum er broytt.

§ 12, 1. stk. j. Úleiga av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.t. (Løgtingslóg nr. 104 frá 16. august 1994, § 1, 1. stk., nr. 1).

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið í sambandi við hesa broyting, hevur endamálið við broytingini verið at veita hotellum og gistingarhúsum fíggjarligan stuðul umvegis meirvirðisgjaldslógina, tí við hesi ásetingini verður leigað út avgjaldsfrítt, samstundis sum hotell og gistingarhús fáa keypsavgjaldið av sínum útreiðslum endurgoldið úr landskassanum.

§ 12, 1. stk. k. Fiskireiðskapur til skip, sum eru yvir 20 GT, og tey, sum eru undir 20 GT, ið hava “Veiðiloyvi A”. Fiskireiðskapur, sjóklæði, agn, ísur, olja, proviantur, salt, pakkitilfar, kassaleiga, havnagjøld og uppboðsavgjøld til fiskifør, sum reka vinnuligan fiskiskap, harumframt søla av kvotum, fiskidøgum og –loyvum.

Sambært viðmerkingunum til hesa lógarbroytingina, var upprunaliga endamálið við lógarbroytingini at sleppa nevndu fiskiførum undan at binda gjaldføri í keypsavgjaldið, sum tey kortini fáa aftur, tá avroknað verður við landskassan. Broytingar eru fleiri ferðir gjørdar í hesi ásetingini síðan hon fyrstu ferð kom í meirvirðisgjaldslógina í 1994. Broytingarnar hava snúð seg um at seta fleiri vørur undir ásetingina, og broytingarnar hava verið hesar:

- Løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 1994, § 1, 1. stk., nr. 6. Hetta er upprunaliga lógarbroytingin, har sølan av fiskireiðskapi, agni, ísi, olju, provianti, salti og pakkitilfari verður frítikin fyri meirvirðisgjald.

- Løgtingslóg nr. 92 frá 6. juni 1997 § 1. Við hesari lógarbroytingini varð søla av sjóklæðum o.a. til manningar á skipum, ið reka vinnuligan fiskiskap frítikin fyri meirvirðisgjald.

- Løgtingslóg nr. 176 frá 30. desember 1997, § 1, 1. stk., nr. 2. Henda broytingin hevði við sær, at kassaleiga, havnagjøld, uppboðssøluavgjøld til fiskifør, sum reka vinnuligan fiskiskap, eins og søla av kvotum, fiskidøgum og –loyvum vórðu frítikin fyri meirvirðisgjald.

§ 12, 1. stk. l. Lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði. (Løgtingslóg nr. 176 frá 30. desember 1997, § 1, nr. 3).

Henda broytingin hevði við sær, at løn til bygging og umvæling av egnum bústaði varð frítikin fyri meirvirðisgjald. Frítøkan er treytað av, at tann, ið fær húsini bygd ella umvæld, sjálvur eigur húsini, antin einsamallur ella saman við øðrum. Undir bygging og umvæling kemur eisini umbygging og liðugtgerð. Umbygging skal skiljast sum, at húsini verða sett í stand, nútímansgjørd ella broytt.

Fyri at kunna nýta hesa frítøkuna skal arbeiði bert fevna um tað, sum verður fevnt av pantirættinum, so at innbúgv og annað leysafæ ikki kemur undir lógina. Við egnan bústað er at skilja verandi ella komandi skattligi bústaðurin t.e. miðdepilin fyri lívsáhugamálunum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at endamálið við uppskotinum er at hjálpa sethúsaeigarum, lækka kostnaðarstøðið og soleiðis seta gongd aftur á virksemi í landinum. Uppskotið skuldi eisini síggjast sum ein liður í arbeiðinum móti svørtum arbeiði. Í viðmerkingunum verður eisini nevnt, at slík undantøk gera meirvirðisgjaldslógina fløktari og torførari at umsita.

Hetta undantakið hevur verið sera trupult at umsitið, bæði fyri vinnu og umsiting. Vinnan hevur fleiri ferðir víst á hesar trupulleikar. Undantakið skapar eisini nógvar skeivleikar, tí tað fevnir bert um privatar húsaeigarar.

§ 12, 1. stk. m. Receptskyldugan heilivág til fólk. (Løgtingslóg nr. 176 frá 30. desember 1997, § 1, nr. 3.).

Tað eru ikki fleiri viðmerkingar til hesa lógarbroytingina enn almennu viðmerkingarnar um at lækka kostnaðarstøðið í landinum.

§ 12, 1. stk. n. Útleiga av festum og tilhoyrandi ognum hjá Føroya Jarðaráði. (Løgtingslóg nr. 176 frá 30. desember 1997, § 1, 1. stk. nr. 1 og nr. 3.).

Føroya Jarðarráð, sum er grunnur undir Føroya Landsstýri, umsitur landsjørðina og harvið ognir tess. Tá ið bygt verður á festini, byggir landið fyri egna rokning og fyri pening úr Jarðargrunninum fyri síðan at leiga festið við ognum til bóndan. Føroya Jarðargrunnur rekur útlánsvirksemi og verður tí í meirvirðisgjaldshøpi ikki roknaður sum meirvirðisgjaldsskyldugur.

Føroya Jarðargrunnur varð í 1997 gjørdur meirvirðisgjaldsskyldugur, og tað skilst av viðmerkingunum til lógaruppskotið, at endamálið var at stuðla Jarðargrunninum fíggjarliga umvegis meirvirðisgjaldslógini, tí tænasturnar hjá grunninum vórðu við hesum undantakinum undir § 12 gjørdar meirvirðisgjaldsfríar. Føroya Jarðargrunnur hevur sostatt einki søluavgjald, men bert keypsavgjald, sum hann fær aftur úr landskassanum.

§ 12, 1. stk. o. Gjald fyri ferðing og flutning gjøgnum tunlar, eftir brúgvum og vegum, sum hava samband við almenna vegakervið. (Løgtingslóg nr. 86 frá 18. november 2002).

Hetta er nýggjasta §-12 undantakið, sum kom í sambandi við, at Vágatunnilin varð tikin í nýtslu. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at undirsjóvartunnilsverkætlanir eru skipaðar soleiðis, at tað eru almenn partafeløg, sum standa fyri verkætlanunum. Tá ein undirsjóvartunnil so verður tikin í nýtslu, stendur viðkomandi partafelag fyri rakstrinum, líka til lánið í tunlinum er afturgoldið. Tá lánið er afturgoldið, verður

partafelagið upployst, og undirsjóvartunnilin fellur til landið sum ein vanligur partur av landsvegakervinum.

Bummgjaldið er tí í veruleikanum ein eykaskattur til at fíggja eina ávísa løguverkætlan, sum annars hevði verið fíggjað beinleiðis í løgtingsfíggjarlógini. Landsstýrið vil hava lánini í undirsjóvartunlunum afturgoldin yvir so stutt áramál sum gjørligt, soleiðis at undirsjóvartunlarnir verða partar av restini av vegakervinum, sum landið rekur.

Við lógaruppskotinum um at frítaka bummgjaldið fyri meirvirðisgjald, samstundis sum partafeløgini, ið standa fyri undirsjóvartunlunum, fáa inngangandi meirvirðisgjaldið endurgoldið úr landskassanum, verða lánini til undirsjóvartunlarnar skjótari afturgoldin, og bummgjaldið verður eitt brúkaragjald, sum fer beinleiðis til at fíggja tunlarnar. Endamálið við undantakinum er tí í høvuðsheitinum, at landskassin umvegis meirvirðisgjaldslógina skal vera við til at fíggja ein størri part av undirsjóvartunnilsverkætlanum enn tann partapening, sum landið setur í verkætlanirnar.

## 5.6 Avgjaldsfrítøka annars

Sambært § 27, 7. stk., í meirvirðisgjaldslógini kann landsstýrið í samráð við skatta- og avgjaldskærunevndina, undir heilt serligum umstøðum loyva avgjaldsfríum innflutningi av vørum, sum annars eru avgjaldsskyldugar. Tað er rættiliga sjáldan at innflutningur verður frítikin fyr meirvirðisgjald sambært hesi áseting. Siðvenjan er at § 27, 7. stk., verður tulkað strangt m.a. tí, at mvg-lógin í øðrum reglum nevnir, nær frítøka kann játtast.

Í viðmerkingunum til § 27, 7. stk. framgongur, at í metingini av um serligar umstøður fyriliggja, skal dentur m.a. leggjast á kappingarneutralitet, at talan er um gávu frá vælgerandi stovni ella felagskapi ella er útvegað fyri pening játtaður av slíkum felagsskapum, og at samsvarandi útgerð ikki verður framleidd her á landi.

Síðan meirvirðisgjaldslógin kom í gildi, er avgjaldsfríur innflutningur sambært § 27, 7. stk., loyvdur 5 ferðir. Hetta er ein MR-skannari og ein kálkskannari til Landssjúkrahúsið, sum vórðu latin sum gávur, ein veðurstøð, ið Føroya Jarðfrøðisavn skuldi nýta í einari altjóða granskingarverkætlan um veðurlagsbroytingar, sendarar, ið Føroya Náttúrugripasavn nýtti til hvalakanningar og ein sjúkrabilur, ið Vága Bjargingarfelag fekk sum gáva.

Henda ásetingin hevur sostatt hvørki stórvegis fíggjarligan týdning fyri landskassan ella meirvirðisgjaldsneutralitetin, men tað kann hava stóran týdning at hava eina slíka áseting, tí onkur verkætlan hevði ikki verið veruleiki uttan hesa áseting. Veðurlagskanningarnar hjá Føroya Jarðfrøðisavni í sambandi við altjóða granskingarverkætlanina um veðurlagsbroytingar hevði neyvan verið veruleiki, um meirvirðisgjald skuldi rindast av veðurstøðini, sum varð flutt inn til Føroyar. Danska granskingarráðið rindaði støðina, men ráðið gjørdi púra greitt, at skuldi meirvirðisgjald eisini rindast av støðini, so fíggjaði danska granskingarráðið ikki veðurstøðina.

Í Føroyum kemur tað fyri, at fólk sjálvboðin taka seg saman um at gera eitthvørt vælgerandi arbeiði, t.d. at varðveita eitthvørt fornminni, sum annars hevði forfarist. Talan er ikki um stórt virksemi, ið hevur stórvegis týdning fyri landskassan ella meirvirðis-gjaldsneutralitetin. Slíkt sjálvboðið arbeiðið kann harafturímóti hava stóran sam-felagsligan týdning. Tað hevði tí verið skilagott, eisini at havt eina áseting í meirivirðisgjaldslógini, har landsstýrið í samráð við skatta- og avgjaldskærunevndina, undir heilt serligum umstøðum kann loyva avgjaldsfrítøku í sambandi við slíkt arbeiði.

# 6. Samlað tilmæli um punktgjøld og undantøk o.a. í mvg-lógini

Samanlagt verður mælt til, at broytingar verða gjørdar samstundis í punktgjøldunum og meirvirðisgjaldslógini, soleiðis at loysnirnar verða so útreiðsluneutralar sum gjørligt fyri landskassan, tá ið punktgjøld og undantøk í meirvirðisgjaldslógini verða strikað.

Mælt verður til, at lóguruppskot verða løgd fyri Løgtingið skjótast gjørligt, ið strikað undantakið í meirvirðisgjaldslógini, sum frítekur lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði fyri meirvirðisgjald, samstundis sum punktgjøldini á hvítvørum, radiotólum, sjónvørpstólum v.m. og lampum verða strikað.

Fíggjarligu avleiðingarnar í 2005 verða mettar soleiðis:

| | |
|---|---:|
| **Punktgjøld íroknað MVG: Kapittul og vøruslag** | **Kr.** |
| 84 Hvítvørur | -4.000.000 |
| 85 Radiotól, sjónvarpstól o.a. | -12.000.000 |
| 94 Lampur | -5.000.000 |
| 33 Parfuma o.a. | -5.000.000 |
| **Undantak í meirvirðisgjaldslógini** | **Kr.** |
| § 12, 1. stk., litra l. Lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði | 30.000.000 |
| **Tilsamans** | **4.000.000** |

Mettu fíggjarligu avleiðingarnar fyri landskassan í 2005 av teimum báðum nevndu lógaruppskotunum er samanlagt ein inntøka uppá 4 mió. kr. At strika punktgjøldini á hvítvørum, radiotólum, sjónvarpstólum, lampum og parfumu verður mett at kosta landskassanum 26 mió. kr. í 2005. At strika mvg-frítøkuna av lønum til bygging og umvæling av egnum bústaði verður mett at kosta 30 mió. kr. í 2005.

Fíggjarligu avleiðingarnar av tilmæltu broytingunum í avgjaldslóggávuni eru ymiskar fyri ymiskar samfelagsbólkar. Tilmæltu broytingarnar í hesum lógaruppskotinum fara at gera tað nakað dýrari at byggja og umvæla hús, men lógaruppskotið um at taka av punktgjøld av hvítvørum, radiotólum, sjónvarpstólum og lampum fer harafturímóti at gera tað bíligari at keypa húsarhaldstól, sum øll húsarhald keypa. Hetta seinna fer tí at raka ein væl breiðari skara av borgarum, t.e. bæði tey, sum byggja og umvæla hús og eisini øll onnur húsarhald, sum skifta húsarhaldsvørur út, tá ið tær eru niðurslitnar.

At taka av punktgjøldini av parfumu o.ø. er ein dagføring af lóggávuni, sum hevur til endamáls at gera føroyska handilsvinnu betur kappingarføra. Punktgjøldini á parfumu hava við sær, at sølan av parfumu er lítil í Føroyum, tí føroyingar keypa heldur parfumu o.a. uttanlands. Við at taka av punktgjøldini á parfumu verður møguligt at flyta hesa sølu til Føroyar, umframt at hetta eisini stimbrar søluna generelt.

Mælt verður ikki til at strika fleiri punktgjøld, tí restin av punktgjøldunum eru sokallað gift-, heilsu- og umhvørvisavgjøld.

Í meirviðisgjaldslógini verður mælt til at strika meirvirðisgjaldsfrítøkuna av

- sjóklæðum,
- bókum,
- tíðindabløðum og prenting fyri tíðindabløð
- útleigan av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.t. og
- reseptskyldugum heilivági.

Ásetingin um at frítaka sjóklæðir fyri meirvirðisgjald er ógjørlig at umsita, tí sølubúðirnar skilja ikki í millum, um talan er um sjóklæðir ella ikki, tá tær selja til sjómenn. Tað finst eingin allýsing av sjóklæðum. Kunngerðin skapar tí skeivleikar, tí sjómenn í veruleikanum kunnu keypa øll síni klæðir uttan meirvirðisgjald.

Tað finst eingin góð grundgeving fyri at bøkur skulu frítakast fyri meiriviðisgjald. Hetta er ein óbeinleiðis stuðul til bókasølu umvegis meirvirðisgjaldslógina, sum ikki er ætlað at vera ein stuðulslóg. Bøkur er ein vanlig vøra, eins og disklar og ljóðbond, sum eru meirvirðisgjaldsskyldug. Sama er galdandi fyri tíðindabløð og prenting fyri tíðindabløð.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fyri útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi er eisini ein óbeinleiðis stuðul til føroysku gistingarhúsini umvegis meirvirðisgjaldslógina. Av tí at ein stórur partur av hesi útleigan er til ferðafólk, høvdu útlendsk ferðafólk givið størri inntøkur í landskassan, um hetta undantakið ikki var í meirvirðisgjaldslógini.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fyri reseptskyldugan heilivág er óbeinleiðis stuðul umvegis meirvirðisgjaldslógina til reseptskyldugan heilivág, sum sjúkrakassarnir og almannastovan annars rinda stóran part av. Tað hevði verið rættari at tikið hetta undantakið av og rinda allan stuðulin til reseptskyldugan heilivág beinleiðis umvegis sjúkrakassan og almannastovuna.

# 7. Skrásetingargjald á bilum o.a.

Lógin um skrásetingargjald á motorakførum er í nógvar mátar ógvuliga fløkjaslig og ótíðarhóskandi. Nýggir persónvognar til privata nýtslu rinda sera høgt skrásetingargjald[22] umframt meirviðisgjald. Lastbilar, bussar, neyðsendarakfør og aðrir vinnubilar rinda einki skrásetingargjald, men bert meirvirðisgjald. Skrásetingargjaldið á brúktum bilum, sum verða fluttir inn til landið, verður regulerað eftir aldrinum á bilinum.

Grundarlagið undir skrásetingargjaldinum av vanligum privat bilum stavar frá eini tíð, tá ið bilar vórðu mettir at vera marglætisvøra. Bilur er í dag eitt vanligt og sera týðandi nýtslutól hjá flestu húsarhaldum. Tí er skrásetingargjaldið rættiliga ótíðarhóskandi.

At skrásetingargjaldið verður rindað av CIF-virðinum[23] hevur eisini við sær, at sera lítið gjøgnumskygni er viðvíkjandi skrásetingargjaldinum. Fakturaprísirnir, sum bilhandlarar keypa bilarnar fyri, kunnu vera sera ymiskir, hetta veldst m.a. um, hvussu dugnaligir bilhandlarar eru at samráðast um prísir.

Niðanfyri er víst eitt tilvildarligt dømi um, hvussu skrásetingagjaldið o.a. verður roknað av einum bili, sum bilasølan keypir fyri 106.650,- kr. (fakturavirðið) og selur aftur fyri 255.770,- kr. Vinningurin hjá bilasøluni er 30.000,- kr. og gjøldini til landskassan eru 116.235,- kr. (skrásetingarjald, MVG og burturbeiningargjald):

| | | |
|---|---|---|
| **Fakturaprísur** | **106.650,-** | **kr.** |
| Farmagjald | 1.453,- | kr. |
| Trygging o.a. | 405,- | kr. |
| **CIF-virði** | **108.508,-** | **kr.** |
| GATT-tollur | - | kr. |
| Vørugjald | 725,- | kr. |
| Uppskipan | 222,- | kr. |
| Avgreiðslugjald | 80,- | kr. |
| Tilsamans | 109.535,- | kr. |
| | | |
| Skrásetingargjaldsgrundarlag = CIF-virði | 108.508,- | kr. |
| Frádráttir fyri trygdarútgerð smb. kunngerð | 0,- | kr. |
| Skrásetingargjaldsgrundarlag eftir frádrátt | 108.508,- | kr. |
| **50% av 70.000,- kr.** | **35.000,-** | **kr.** |
| **75% av restini** | **28.881,-** | **kr.** |
| Søluprísur uttan vinning og MVG | 173.416,- | kr. |
| **Vinningur** | **30.000,-** | **kr.** |
| Søluprísur uttan MVG | 203.416,- | kr. |
| **MVG** | **50.854,-** | **kr.** |
| Søluprísur við MVG | 254.270,- | kr. |
| Burturbeining | 1.500,- | kr. |
| **Endaligur søluprísur** | **255.770,-** | **kr.** |

[22] Avgjaldið er 50% av avgjaldsskylduga virðinum upp til 70.000 kr., tó ongantíð minni enn 10.000 kr. Av avgjaldskylduga virðinum yvir 70.000 kr. verður herumframt goldið 75% í avgjaldi.
[23] CIF-virðið er fakturaprísur + farmagjald + trygging.

Tað skal viðmerkjast, at fakturaprísirnir á bilum eru rættiliga ymiskir í teimum ymisku EU-londunum. Fakturaprísurin er lægstur í Danmark og hægstur í Bretlandi, har hann er næstan 50% hægri enn í Danmark.[24] Fakturaprísurin hongur saman við avgjøldunum á bilum í teimum ymisku londunum. Fakturaprísurin er lægstur í teimum londum, har avgjøldini eru høg.

Lógin um skrásetingargjald á motorakførum eigur tí at verða grundleggjandi broytt, soleiðis at skrásetingargjaldið frameftir verður lagt um til eitt umhvørvisgjald. Hetta er eisini í samsvar við umhvørvispolitikkin í nógvum framkomnum londum, sum í áravís hava roynt at ávirka bilverksmiðjurnar til at framleiða meira orkusparandi og umhvørvis-vinarligar bilar.

Tað er ymiskt, hvussu hetta hevur verið gjørt. Í nøkrum førum er tað gjørt við at eggja fólki at keypa meira orkusparandi og umhvørvisvinarligar bilar umvegis avgjaldslógir. Hetta eru sokallað grøn avgjøld.

Føroyar kunnu eisini luttaka í hesum við at leggja skrásetingargjaldið á motorakførum um til eitt umhvørvisavgjald, sum gevur landskassanum á leið somu inntøku, sum skrá-setingargjaldið gevur landskassanum í dag. Landskassin fekk góðar 75 mió. kr. inn í skrá-setingargjaldi í fjør.

Mælt verður tí til at broyta skrásetingargjaldið frá einum avgjaldi, sum verður lagt á CIF-virðið á bilinum til eitt avgjald, sum verður roknað eftir, hvussu nógv bilurin brúkar av brennievni. Skrásetingargjaldið verður soleiðis broytt frá einum lítið gjøgnumskygdum avgjaldi til eitt avgjald, sum er fullkomuliga gjøgnumskygt, tí allir bilar hava í dag eitt ES-normtal, ið vísir, hvussu nógv bilurin koyrir fyri hvønn litur av brennievni við blandaðari koyring.

ES-normtalið kann nýtast sum grundarlag fyri einum frymli við passaligari spjaðing at rokna nýggja grøna avgjaldið, soleiðis at landskassin fær á leið somu inntøku sum av skrásetingargjaldinum, men har avgjaldið verður tengt at, hvussu umhvørvisvinarligur bilurin er. Bilar, ið nýta nógv brennievni og sostatt dálka umhvørvið meira enn bilar, ið nýta minni brennievni, koma at rinda lutfalsliga størri avgjald. Hetta avgjaldið fer at minka sum frálíður, tí bilar verða alsamt gjørdir meira umhvørvisvinarligir. Tað finnast eisini bilar og fara at komar bilar, sum nýta annað brennievni enn bensin og diesel. Atlit má eisini verða tikið at hesum í sambandi við eitt nýtt grønt avgjald.

ES-normtalið vísir, hvussu nógvar kilometrar bilurin koyrir fyri hvønn kilometur av brennievni. Hetta talið kann roknast um til, hvussu nógvar litrar av brennievni bilurin brúkar fyri hvørjar 100 kilometrar, sum verður lyft upp í ein potens og faldað við einum konstanti. Frymilin fyri nýggja grøna avgjaldið kemur sostatt at síggja soleiðis út:

$$\text{Grønt avgjald} = (\text{l}/100\ \text{km})^{p} * k$$

[24] EU: Car prices differentials in the European Union.

Innfluttir brúktir bilar skulu eisini rinda grønt avgjald sambært hesum frymli. Ellisakfør eiga tó framvegis at verða frítikin fyri avgjald.

## 7.1 Eykaútgerð

Ein stórur partur av eykaútgerðini í bilum í dag er trygdarútgerð, sum núverandi skrásetingargjald verður lagt omaná. Grøna avgjaldið verður ikki lagt á eykaútgerð og fer tí ikki at gera tryggar bilar dýrari.

## 7.2 Vinnubilar o.a.

Skrásetingargjaldið er ymiskt á vørubilum, lastbilum, bussum, hýruvognum, neyðsendarakførum og øðrum bilum, ið ikki verða nýttir til privata nýtslu. Ásetingarnar viðvíkjandi skrásetingargjaldinum av vinnubilum eru rættiliga ógreiðar og eiga at verða gjørdar greiðari, soleiðis at tað heilt greitt er vinnuliga virksemi, ið er avgerandi fyri um ein bilur skal rinda skrásetingargjald ella ikki.

Tað er lítið at ivast í, at upprunaliga ætlanin við ásetingunum um vinnubilar í lógini um skrásetingargjald á motorakførum hevur verið, at vinnubilar ikki skulu rinda skrásetingargjald, men soleiðis er ikki. Keypir ein privatpersónur t.d. ein Offroadara við 2 setrum, skal hann bert rinda 15% í skrásetingargjaldi. Keypir ein privatpersónur ein bil undir 3.500 kg. við 10 setrum, skal einki skrásetingargjald rindast. Ein lastbilur undir 3.500 kg., sum tekur 5 fólk, men verður brúktur til vinnuligt virksemi, skal rinda fult skrásetingargjald.

Fyri last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar er skrásetingargjaldið 15%, tá ið totalvektin ikki er omanfyri 3.500 kg. og null um totalvektin er omanfyri 3.500 kg. Fyri vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar er skrásetingargjaldið 30%. Hetta er rættiliga fløkjasligt.

Ásetingarnar í skrásetingarlógini eiga at verða gjørdar fullkomiliga greiðar, soleiðis at bilar, ið bert verða nýttir til vinnuligt virksemi, eiga ikki at rinda skrásetingargjald.

Viðvíkjandi skrásetingargjaldinum á motorsúkklum eiga atlit at verða tikin at ferðslutrygdini. Stórar motorsúkklur, sum í dag rinda høgt skrásetingargjald, kunnu vera sera vandamiklar um t.d. ungir dreingir lættliga kunnu fáa slíkar súkklur at spæla við. Atlit eigur at verða tikið at hesum, áðrenn nakað verður gjørt við høga skrásetingargjaldið á motorsúkklum.

Sostatt verður mælt til rættiliga umfatandi broytingar viðvíkjandi avgjøldunum á motorakførum. Lógaruppskotini hesum viðvíkjandi er ein verkætlan í sær sjálvum, men tað er týdningarmikið longu nú at fáa greiðu á, um hetta er leisturin politiski myndugleikin ynskir at fylgja.

## 7.3 Vegskattur

Vegskatturin verður í dag goldin sum eitt fast hálvárligt gjald, uttan mun til hvussu nógv bilurin koyrir. Tað er stór umsiting av einum slíkum gjaldi, tí Bileftirlit Føroya skal hálvárliga senda girokort til eigaran av hvørjum einstøkum bili. Verður ikki goldið til tíðina skulu rykkjarar sendast út og verður kortini ikki goldið, verður løgreglan biðin um at klippa nummarspjøldrini av viðkomandi bili.

Tað hevði verið rættari at lagt vegskattin yvir á bensin- og dieselprísirnar, soleiðis at vegskatturin verður tengdur beinleiðis at nýtsluni av bilinum og harvið eisini, hvussu nógv hvør einstakur bilur slítir vegirnar. Hetta hevði eisini spart nógva umsiting umframt at útlendskir bilar koma at rinda fyri slit á føroysku vegirnar.

**Meginfelag Sjúkrakassa Føroya**
Magnus Heinasonargøta 20
Postsmoga 326
FO-110 Tórshavn

Telefon: 31 27 99
Telefax: 31 40 06
e-mail: msf@msf.fo

***Tórshavn, hósdagur, 9. september 2004***

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Traðagøta 39
Postsmoga 2039
FO 165 Argir.

Komið
- 9. SEP. 2004
Fíggjarmálaráðið

Við skrivi dagfest 10. august 2004 j.nr. 6410-0003/2003 / 36 hevur Fíggjarmálaráðið sent Meginfelag Sjúkrakassa Føroya eitt upprit við endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini til ummælis.

Sum tað framgongur av uppritinum so er eitt av endamálinum at rudda upp í meirvirðisgjaldsfrítøkunum herundir reseptskyldugum heilivági.

Meginfelagið skylir væl, at fíggjarmálaráðið ætlar at gera eina slíka broyting, tí hesi nógvu undantøk eru torfør at umsita, men tá talan er um MVG á heilivági, so er hetta munandi lættari at umsita, tí talan er bert um ein stovn – nevniliga Apoteksverkið – í umsitur allan heilivág í Føroyum.

Verður hetta broytt sum ført verður fram í uppritinum, so hevur hetta stóra fíggjarliga ávirkan, nevniliga eina meirútreiðslu uppá uml. 15 mill. kr.um árið.

Sum støðan er í dag so er heilivágur uttan MVG bæði til sjúkrahúsini og tann part sum sjúkrakassarnir endurrindað. Verður skipanin broytt sum mælt verður til í uppritinum so verða sjúkrahúsini framvegis frítikin fyri MVG eftir serligu endurgjaldsskipanini fyri almennar stovnar meðan sjúkrakassarnir skulu gjalda MVG.

Her kann verða ført fram, at tá heilivágurin gjørdist MVG fríur, so var hetta ein kompensatión fyri mistu inntøkurnar hjá sjúkrakøssunum, tá Landsstýrið við lóg broytti aldursmarkið fyri børn frá 16 ár til 18 ár. Hetta var ein inntøkumissur hjá sjúkrakassunum uppá uml. 3 mill.kr. um árið í 1993 tølum.

Sum tað framgongur av 1.3 Høvuðsniðurstøða 2: Tilmæli um lógaruppskot alt fyri eitt, so er hetta ein neutral loysn fyri landskassan.

Meginfelagið ynskir sama neutralitet og kann bert ganga við til slíka broyting, um hesar 15 mill. kr. koma aftur frá landskassanum í hækkaðum stuðuli, ella sum beinleiðis MVG-endurgjald eins og almennir stovnar.

Vinarliga

**MEGINGELAG SJÚKRAKASSA FØROYA**

Tórbjørn Mikkelsen, form

Herman J. Dam

- 9. SEP. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003 \ 40

Føroya Fiskimannafelag

Komið

07 SEP. 2004

Fíggjarmálaráðið

Tórshavn 07-09-04

Málsøki:Fiskimál

Fíggjarmálaráðið

**Viðv. uppriti um endurskoðan av punktgjøldum og MVG skipan.**

Víst verður til uppskotið um at avtaka MVG frítøkuna av sjókláeðum.

Vit duga ikki at síggja, at fortreytirnar fyri at henda skipan varð sett í gildi í sínari tíð eru broyttar. Tískil kunnu vit heldur ikki taka undir við hesa broyting.

Og grundgevingina skilja vit als ikki, nevniliga at skipanin skal vera ómøgulig at umsita og at eingin allýsing skal vera gjørd av sjókláeðum.

Vit hava sjálvir verið við til at gera ein lista yvir tær vørur, sum skulu roknast fyri at vera sjókláeði. Halda sølubúðir seg til henda listan er eingin trupulleiki við umsitingini. Eftirlitið við hesum kann ikki vera truplari enn tað eftirlit sum myndugleikarnir annars skulu hava av øðrum virksemi í landinum.

Við heilsan
FØROYA FISKIMANNAFELAG

10. SEP. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003\41.

Føroya Fiskimannafelag • Bryggjubakki • Postboks 58 • FO-110 Tórshavn
Tlf: (+298) 31.15.69 • Fax: (+298) 31.87.69 • e-mail: fo-fisk@post.olivant.fo

Komið

23. SEP. 2004

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
Postsmoga 2039
Fo-165 Argir

Att: Mortan Simonsen

Klaksvík,tann 20.09.2004

Viðv. viðm til endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini, j.nr:6410-0003/2003/13 pr. 9/8-2004

Nevndin í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag hevur hugt at uppskotinum, og hevur hesar viðmerkingar:

Vit taka ikki undir við : at taka av punktgjøld av hvítvørur,radiotól,sjónvørp lampir og parfuma o.annað líkt
Og seta MVG á arbeiðslønir til nýbygging og umælan av sethúsum ístaðin.

Grundin er, at hvítvørur, radiotól og annað keypa fólk kanska 10-20 hvørt ár, ímegan fólk sum seta búgv , ella skullu halda teirra sethús við líka, fáa eina nógv størri útreiðsla . Hettað fer at elva til svart arbeiði, og landskassin fær uppaftur minni inn, ella fólk gera minni av at umvæla, og harvið minka húsini í virði.

Politikkurin í Føroyum hevur verið , at flest øll skullu eiga síni egnu hús, tí skilja vit ikki , at Landi skal leggja tíðlíkar eykabyrðar á tey ungu , sum ætla sær at byggja, og tey sum ynskja at halda hús síni í góðum standi. Tí mæla vit frá at seta hettar í verk.

Eitt sum vit takað undur við er, at vegskatturin verður lagdur yvir bensin og dieselprísinir, soleiðis at tey sum koyra mest, koma at gjalda mest. Onkur sigur , at tað kemur at raka tey , sum hava langan veg til arbeiðis, men so vítt vit vita, so fáa tey hettar gottgjørt aftur pr. km. Ígjøgnum skattaskipanina?!.

Eitt annað gott uppskot hevði verið, at goldið sjúkrakassagjaldið ígjøgnum skattin.

Vit hoyra ofta um, at barnafamiljir ikki hava ráð at keypa mjólk til børnini, tí hon er so dýr, og keypa heldur bíliga saft ella sodavatn, hettar kann ikki verða rætt, tí mæla vit til, at MVG av mjólk,breyð og øðrum neyðugum matvørðum verður lækkað, hettað hevði verið til stóra hjálp til húsarhaldið.

Eisini oljuavgjaldið er blivin einn stór eykabyrða, hettað skuldi bert verða ein fyribilsloysn, fyri at fáa føroyingar at brúka minni olju, men vit hoyra ongan tosa um at takað hettar gjaldið avaftur, tað hevði hjálp øllum húsarhaldum í landinum.

Heilsan

Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

KLAKKSVIKAR ARBEIÐSKVINNUFELAG 1931
Postboks 325
FO-700 KLAKSVÍK
Tlf. 45 52 18
Fax 45 77 67

23. SEP. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003\42

# Føroya Handverksmeistarafelag
**Faroe Trade Masters Association**

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Komið

2 4. SEP. 2004

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 ARGIR

Att.:

Tórshavn 20. september 2004

Okkara tilv./Our ref.
1270-1042/Bjørg/F-ggja-FHMF--V
Tykkara tilv./Yourref.

## Viðv. endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini

Føroya Handverksmeistarafelag hevur móttikið uppskot til endurskoðan av punktgjøldunum og MVG-skipanini til ummælis.

Vinnan hevur áður í skrivum víst á sína áskoðan viðv. MVG-skipanini. Áskoðanin er ikki broytt og fara vit tí at vísa á hana aftur:

*Løgtingslógin um meirvirðisgjald kom í gildi 1. januar 1993. Vinnan var samd um, at meirvirðisgjaldslógin skuldi taka støði í tí donsku lógini, og at lógin skuldi verða so einføld sum til bar. Undantøkini í lógini skuldu verða so fá sum møguligt fyri at varðveita neutralitetin, og vinnan legði dent á at fáa stabilitet á lógarøkinum.*

*Síðan tá eru fleiri undantøk gjørd, og tosað verður javnan um at gera uppaftur fleiri undantøk. Undantøkini skapa oftast umsitingarligar trupulleikar bæði fyri vinnuna og umsitingina. Tann stóri trupulleikin fyri okkum er tó tann, at undantøkini máa støðið undan skipanini, soleiðis at hon ikki longur hongur saman. Tað kann tí vera hóskandi her at minnast aftur á viðmerkingarnar, sum landsstýrið hevði, tá ið mvg-lógin varð løgd fyri tingið (sitat):*

*Fyri at avgjald kann sigast at vera neutralt yvir fyir vinnulívsbygnaðinum, má tað krav setast til avgjaldsskipanina, at hon er soleiðis løgd til rætttis,*
- *at sama avgjald skal rindast, uttan mun til hvussu nógvar handilsliðir ein vøra fer ígjøgnum,*
- *at avgjaldið í prosentum av prísinum á eini vøru er tað sama, uttan mun til hvørjum virki keyparin keypir frá, og*
- *avgjaldstrýstið er tað sama, uttan mun til um ein vøra er handverksframleidd ella framleidd við størri ella minni maskinu.*

*Við øðrum orðum má ikki vera størri fyrimunur fyri keypara at gera síni keyp hjá einum ávísum latara fram fyri aðrar, og skipanin má ikki mótvirka rationaliseringum innan vinnulívið.*

Vinnuhúsið • Boks 1038 • R. C. Effersøesgøta 30 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 31 18 64 • Fax +298 31 72 78 • E-mail: industry@industry.fo

Í skrivi til Fíggjarmálaráðið tann 12. mars 1999 tók Føroya Handverksmeistarafelag fult undir við áskoðanin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag um MVG-skipanina. Henda støða er heldur ikki broytt og heldur FHMF:

- at mvg-skipanin skal vera so einføld sum til ber
- at vit skulu hava eina stabila skipan, sum ikki broytist í heilum
- at vit vilja ikki hoyra talan um royndir, sum finna uppá eina aðra skipan at avloysa mvg-skipanina, tí mvg-skipanin er, tað vit vita um, einasta avgjaldsskipan, sum leggur avgjaldið í síðsta lið, og sostatt loyvir vinnuni at framleiða avgjaldsfrítt. Hetta er neyðugt, um vit skulu standa okkum mótvegis okkara kappingarneytum, sum allir virka undir mvg-skipanum.

Tí tekur FHMF undir við, at punktgjøldini verða avtikin.

Tá ið lógaruppskotið um at undantaka lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði fyri MVG varð viðtikið, var vinnan ímóti hesum. Støðan hjá vinnuni var fylgjandi:

*Um Løgtingið heldur, at neyðugt er at lætta um hjá handverkarum, so eigur hetta heldur at verða gjørt við eini endurgjaldsskipan, har møguligt er hjá privatfólki at fáa endurgoldið mvg av umvælingum og bygging. Hetta hevði hildið mvg - skipanina intakta samstundis sum tað bleiv bíligari at byggja og umvæla.*

*Ein annar trupulleiki í samband við bygging av húsum er, at sniðhús verða verri stillaði enn hús sum eru smíðaði av handverkara, um uppskotið verður samtykt. Ein persónur kann sostatt spara fitt av peningi við at velja at fáa húsini smíðaði av handverkara, heldur enn at keypa sær eini sniðhús. Hetta er brot á prinsippi í meirvirðisgjaldsskipanini um at skipanin skal verða neutral. At skipanin er neutral merkir, at avgjaldið ikki skal ávirka vinnulívs- og brúkaradispositiónir*

*Ført hevur verið fram, at handverkarar hava trupulleikar av at umsita lógina. Hesar broytingar gera henda trupulleikan størri. Eftirlitsuppgávan hjá Toll og Skattstovuni verður nógv truplari, og kemur at krevja størri manning, samtundis sum funnist verður at, at almenna fyrisitingin er farin at veksa aftur".*

Vinnan hevur nú lagað seg eftir hesum viðurskiftum, sum nú hava verið í gildi í skjótt 7 ár. Tað fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri handverksvinnuni og sethúsabyggingina um MVG verður lagt á lønirnar aftur uttan at onnur tiltøk verða sett í verk. Tað verður væl dýrari at byggja eini sethús. Eini vanlig sethús koma at dýrka millum einar kr. 100.000 og kr. 130.000. Hetta eru nógvir pengar fyri eina familju og fer tí uttan iva at merkja, at væl færri hús verða bygd. Samstundis er samfelagssbúskapurin versnaður tey síðstu árini. Arbeiðsloysið er vaksið og fer óivað at hækka enn meira, um ætlanin hjá landsstýrinum verður sett í verk. Stutt sagt, so verður úrslitið minni virksemið, størri arbeiðsloysið og færri skattakrónir. Hetta er skeivur fíggjarpolitikkur í ringum tíðum.

Í uppskotinum á tingið, tá ið broytingar vórðu gjørdar í meirvirðisgjaldslógini (Løgtingsmál nr. 49/1997) varð víst á, at tað var neyðugt at lækka kostnaðarstøði sum heild, at fáa lønsemi aftur í vinnuna, skapa nýggj arbeiðspláss, lækka skattatrýstið, bøta um trupulleikarnar hjá sethúsaeigaru osv. Í hesum sambandi verður meirvirðisgjaldið á tænastuvinnuna og smáídnaðin lækkað. Hetta uppskotið skal eisini síggjast sum ein liður í arbeiðinum móti svørtum arbeiði.

Vit kunnu staðfesta, at vit stórt sæð eru í somu støðu í dag. Føroya Handverksmeistarafelag mælir tí til, at ein **endurgjaldsskipan verður sett í verk, har kundin (sethúsaeigarin) kann søkja um at fáa MVG av lønum endurrindað. Kravt eigur at vera váttan fyri, at rokningin er goldin, bæði løn, tilfar og MVG. Hetta hevði eisini verið eitt lið í at forða fyri svørtum arbeiði.**

Vinarliga
Føroya Handverksmeistarafelag

Magnus Magnussen, formaður.

2 4. SEP. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003\43

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
**Faroe Employers' Association**

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Komið
-1. OKT. 2004
Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 ARGIR

Att.: Mortan Simonsen

Tórshavn 28. september 2004

Okkara tilv./Our ref.:
2-1746/Jan Mort/F-ggja-FAG-B-P
Tykkara tilv./Your ref.:

## Punktgjøld og MVG skipanin

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fingið uppskot til endurskoðan av punktgjøldunum og MVG-skipanini til ummælis.

Arbeiðsgevarafelagið var við til at viðgera MVG-skipanina tá hon var innførd, og tá vísti vinnan á: At meirvirðisgjaldslógin skuldi verða so einføld sum til bar, at undantøkini í lógini skuldu verða so fá sum møguligt fyri at varðveita neutralitetin, og vinnan ynskir stabilitet á lógarøkinum.

Síðan tá eru fleiri undantøk gjørd. Undantøkini skapa oftast umsitingarligar trupulleikar bæði fyri vinnuna og umsitingina, samstundis sum tey máa støðið undan skipanini, soleiðis at hon ikki longur hongur saman. Vert er at minna á viðmerkingarnar, sum Landsstýrið hevði, tá ið mvg-lógin varð løgd fyri tingið:

*Fyri at avgjald kann sigast at vera neutralt yvir fyri vinnulívsbygnaðinum, má tað krav setast til avgjaldsskipanina, at hon er soleiðis løgd til rætttis,*

- *at sama avgjald skal rindast, uttan mun til hvussu nógvar handilsliðir ein vøra fer ígjøgnum,*
- *at avgjaldið í prosentum av prísinum á eini vøru er tað sama, uttan mun til hvørjum virki keyparin keypir frá, og*
- *avgjaldstrýstið er tað sama, uttan mun til um ein vøra er handverksframleidd ella framleidd við størri ella minni maskinu.*

Við øðrum orðum má ikki verða størri fyrimunur fyri keypara at gera síni keyp hjá einum ávísum veitara fram fyri aðrar, og skipanin má ikki mótvirka rationaliseringum innan vinnulívið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ferð eftir ferð, tá møguligar broytingar í lógini hava verið viðgjørdar, víst á síni megin sjónarmið viðvíkjandi skipanini:

- at mvg-skipanin skal vera so einføld sum til ber
- at vit skulu hava eina stabila skipan, sum ikki broytist í heilum
- at vit ikki vilja góðtaka royndir at finna uppá eina aðra skipan at avloysa mvg-skipanina, tí mvg-skipanin er, tað vit vita um, einasta avgjaldsskipan, sum leggur avgjaldið í síðsta lið, og sostatt loyvir vinnuni at framleiða avgjaldsfrítt. Hetta er neyðugt, um vit skulu standa okkum mótvegis okkara kappingarneytum, sum allir virka undir mvg-skipanum.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • R. C. Effersøesgøta 30 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 31 18 64 • Fax +298 31 72 78 • E-mail: industry@industry.fo

**Avtøka av punktgjøldum**
Tá mvg-lógin varð sett í gildi fyri meira enn 10 árum síðani, varð gjørt greitt, at meirvirðisgjaldið skuldi koma í staðin fyri toll og avgjøld. Føroysk vinna skuldi hava somu kor sum vinnur aðrastaðni.

Vinnan hevur síðani ferð eftir ferð víst á, at punktgjøldini á el-lutum o. ø. eru ótíðarhóskandi og kappingaravlagandi, og at tey tí áttu at verið tikin av.

Arbeiðsgevarafelagið tekur tí fult undir við, at bæði punktgjøldini á el-lutum og parfumu verða avtikin. Vit vilja tó samstundis vísa á, at neyðugt er við einhvørjari yvirgangsskipan ið tryggjar, at virkini ikki liggja inni við goymslum av vørum við avgjaldi, og harvið fáa meirútreiðslur, sum tey noyðast at avskriva.

**Undantøk í MVG-skipanini og ætlaðu broytingarnar**
Frá fyrsta degi tá MVG-skipanin var til viðgerðar hevur Arbeiðsgevarafelagið ávara móti undantøkum og tala fyri einari einfaldari og reinari avgjaldsskipan.

Politiski myndugleikin valdi tó at gera nøkur frávik í skipanini, og hesi eru síðani vorðin alt fleiri. At avtaka undantøk, sum eru gjørd, er nógv truplari enn um skipanin var eins fyri øll frá byrjan. Roknast kann við, at allar vinnugreinir sum hava fingið serskipanir, eru í móti at hesar verða avtiknar. Og hetta er skilja vit væl.

Vit vilja her bert viðgera tað broyting, sum ætlanin er at fremja nú (MVG undantakið fyri lønir í samband við bygging og umvæling av egnum bústaði), og mæla til at aðrar broytingar í MVG lógini verða sendar til hoyringar tá man ítøkiliga ætlar at fremja hesar.

Tá ið lógaruppskotið um at undantakið lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði fyri MVG varð til viðgerðar, vóru bæði Arbeiðsgevarafelagið og Handverksmeistarafelsgið ímóti hesum. Víst var á, at um Løgtingið vil fáa gongd í handverksvinnuna og samstundis lætta um hjá húsarhaldinum, so átti hetta heldur at verið gjørt við eini endurgjaldsskipan. Eisini var víst á, at ætlaða skipanin við MVG undantakið fyri lønir, fór at verða ógjørlig at umsita, og at hon virkar kappingaravlagandi tí munur verður gjørdur á sniðhúsum og húsum sum eru smíðaði av handverkara.

Nú hevur henda skipan virka í fleiri ár, meðan tíðirnar hava verið góðar, og nógv hevur verið bygt og umvælt. Spurningurin er, um tað er rætt at avtaka skipanina, nú tíðirnar eru verri, og byggivinnan merkir afturgongd. Vit vilja ístaðin mæla til at ein endurgjaldsskipan verður sett í verk, eins og vit upprunaliga skutu upp, og at sethúsaeigarin kann søkja um at fáa MVG av lønum endurrindað. Henda skipan kann síðani verða stigvíst avtikin yvir eitt áramál.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Jan Mortensen

- 1. OKT. 2004
44
FMR. j. nr. 6410-0003/2003

BRÚKARA samtakið

Komið

-1. OKT. 2004

30.09.04

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
Postsmoga 2039
165 Argir

## Viðmerkingar til endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini

Brúkarasamtakið er grundleggjandi samt í, at avgjaldslóggávan skal gerast so einføld og bílig sum gjørligt at umsita. Tí taka vit undir við, at stremba verður fram ímóti at avtaka øll undantøk í MVG-lógini, og at einans punktgjøld verða nýtt til at ávirka fólksins atburð á økjum sum t.d. rúsdrekka- tubbaks- og góðgætisnýtslu. Tó hava vit nakrar viðmerkingar til uppritið.

### MVG-undantak fyri bygging og umvæling av egnum bústaði

Vit mæla frá at avtaka MVG-undantakið fyri bygging og umvæling av egnum bústaði, uttan at onnur tiltøk verða sett í verk samstundis.

Tað er longu í dag ovurhonds dýrt hjá fólki at byggja sær sín egna bústað. Tí halda vit, at tað ber ikki til at gera byggingina enn og dýrari. Tað eru sum oftast ungar familjur, ið byggja sær bústaðin. Inntøkurnar hjá hesum familjum eru oftani heldur lágar, t.d orsaka av lestri ella læruplássi. Víðari hava hesar familjur størri útreiðslur til børn, og annars nýkeyp av ymiskum slagi. At byggingin av bústaði teirra afturat hesum skal gerast enn dýrari, er bert at veksa um ein longu kendan trupulleika.

Tí er neyðugt, at fyrst verður hugt at t.d. kappingini millum veitarar av tilfari til húsabygging. T.d. kann hyggjast at, hví tað er so trupult hjá nýggjum handlandi at taka kappingina upp við verandi veitarar (timburhandlar, vvs-handlar v.m.). Er tað møguliga gjørdar avtalur millum hesar veitarar og flutningsfeløg um serligan prís fyri flutning, sum nýggir veitarar ikki fáa lut í, e.a.

Tað er eisini alneyðugt frá politiskari síðu at skapa grundarlag fyri ørvísi íbúðar møguleikum. Í dag ber næstan bara til at byggja sær síni egnu hús, ella at leiga fyri okursprís. Fyri mong ber hetta ikki til, meðan tað fyri enn fleiri er ein sera stór byrða.

### MVG-undantak fyri bøkur, bløð og blaðprenting

Vit mæla frá at avtaka MVG-undantak fyri bøkur, bløð og blaðprenting.

Bøkur og bløð bera longu orð fyri at vera í dýrara lagi. Tí er ikki ráðiligt at prísurin hækkar enn meira.

Verður grundarlagi tikið undan virkseminum hjá bløðunum, er tað einki minni enn ein vanlukka fyri landið. Uttan bløð ber ikki til at fáa eitt væl virkandi fólkastýri.

Viðvíkjandi bókum, er støðan rættuliga lík. Um bókmentirnar gerast færri, kemur føroyskt mál í vanda. Og mál okkara á skrift er hornasteinurin í øllum fólksligum samskifti í dag.

BRÚKARA samtakið

30.09.04

Tað er sostætt neyðugt at finna aðrar møguleikar, t.d. mentunarligan stuðul, um MVG-undantakið skal takast av. Men hesum alternativu møguleikum má vera fingið greiðið á fyrst og fremst.

## Goymd avgjøld

Á síðu 4 í uppritinum er felt niður tey øki, sum verða roknaði sum avgjaldsøki. Tó meina vit, at hesin listi ikki er fullfíggjaður.

Nakrar almennar fyritøkur, sum t.d. Tjaldurs Apotek og Rúsdrekkasøla Landsins hava einkarrætt á sínum øki. Prísurin á vøruni verður ásettur eftir ikki vinnuligum viðurskiftum. Tí má hetta verða at roknað sum eitt avgjald, sum verður álagt borgaranum fyri vøruna.

Brúkarasamtakið mótmælir, at goymd avgjøld verða kravd inn á henda hátt.

## Motorsúklur

Tit mæla til at fasthalda høga skrásetingargjaldi á motorsúklum, tí tit vilja fyribyrgja, at ungir dreingir fáa hendur á ov stórum motorsúklum. Hetta er í andsøgn við tykkara egna ynski um einans at brúka punktgjøld til at ávirka fólksins atburð.

## Umhvørvisgjald á smyrjiolju o.ø.

Fyri at stimbra hugin hjá serliga vinnuni at lata brúkta smyrjuolju inn aftur, átti at verði umhugsa ikki einans at áleggja avgjald, men eisini pant. Hetta hevði ført til, at nógv meira olja hevði verðið latin inn. Men fyri at fáa eina slíka skipan at virka, mugu eisini fleiri móttøkustøðir til.

Tað er eisini vert at umhugsa umhvørvisgjøld á øðrum økjum.

## Punktgjald sum heilsufremjandi amboð

Viðvíkjandi punktgjøldunum á matvørum mælir Brúkarasamtakið til, at miðvísar kanningar og heildarætlanir verða gjørda áðrenn støða verður tikin til, hvussu punktgjøld kunnu setast í verk saman við øðrum tiltøkum, við tí endamáli, at fyribyrgja t.d. sukursjúku og øðrum vælferðarsjúkum. Brúkarasamtakið setur sostætt spurning við, um verandi punktgjøld røkka tí endamáli, ið tey eru sett at røkja.

Vinarliga,

Petur í Gong, formaður

1. OKT. 2004

FMR. j. nr. 640-0003/2003 45

FELAGIÐ FØROYSKIR SJÚKRARØKTARFRØÐINGAR

Komið

-4. OKT. 2004

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Traðargøta 39
160 Argir

30. september 2004

**Viðmerkingar til uppritið: Endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini!**

- **<u>Meirvirðisgjald á bøkur og tíðarrit</u>: Munur er innihaldsliga á bókum og tíðarritum annars, her verður sipað til skaldsøgur, uttan á nakran hátt at niðurgera hesar, og sokallaðan fakligan lesna. Seinna dømi hevur stóran týdning fyri fakligu menningina hjá m.a. limunum í okkara felag, tað veri seg bæði fyri lesandi og útbúnir sjúkrarøktarfrøðingar annars.**
**Geografiskt liggur Føroyar avbyrgt og limir okkara hava fíggjarliga avmarkaðar møguleikar at luttaka í skeiðvirksemi uttanlanda, innan heilsu-fakliga øki. Fyri limirnar í FFS, eins og ivaleyst onnur, hevur fakligi lesnaðurin alstóran mennandi týdning fyri fakbólkin og at lesnaðurin verður so ódýrur sum gjørligt.**
**At limir okkara eru fakliga væl fyri, kemur føryoska samfelagnum tilgóðar,**

- **<u>Meirvirðisgjald á reseptskyldugan heilivág:</u> Í flestu førum er resept-heilivágur lívsneyðugur, og tí kann sigast at brúkarin av resepheilivági kemur í eina veika støðu, tað veri seg í eina stutta tíð, ella fyri alt lívsskeiðið.**
**At resept-heilivágurin fær ein sokallaðan óbeinleiðis stuðul, via núverandi mvg-lóggávuna, við tað at sjúkrakassarnir og Almannastovan skulu rinda henda partin, er meiri ein umsitingarligur spurningur, frá okkara sjónarmiðið er tað umráðandi, og má tryggjast, at brúkarin <u>á ongan hátt</u> kemur at merkja nakra fíggjarliga tyngd av mvg –broytingum.**
**Spurningurin er tó, hvussu verður um uppskotið hjá almanna- og heilsumálaráðharranum, um at sjúkrakassarnir skulu avtakast og ístaðin koma beinleiðis undir vanliga skattin? Vónandi fær hetta ikki nakrar negativar avleiðingar fyri brúkarin?**

- **<u>Avgjald á bilar:</u> Í uppritinum er uppskotið framyvir at rokna bil-avgjald eftir hvussu nógv brennievni bilurin nýtir, ella hvussu umhvørvisvinarligur bilurin er. Verður hetta framt í verki, verður stórur mismunur framdur, millum landsins íbúgvar.**
**Tað eru tey, ið hava bil, tí tey hava ráð til tess, men ikki hava hann, bilin, absalut fyri neyðini og verður hetta tí eitt luksusfar. Tey menniskju, ið búgva m.a. í útjaðarinum og koyra til miðstaðarøkini, har flestu arbeiðsplássini eru, koma at gjalda stóran meirkostnað fyri at búgva á bygd, tí hesi koma at koyra fleiri kilometrar og harvið brenna meiri bensin/ dieselolju.**
**Bilurin er tó, hjá flest øllum øllum føroyingum ídag, eitt alneyðugt flutningsfar, serliga har óregluligt ferðasamband er.**
**Týdningarmikið er at eingin verður "straffaður" við meirkostnað, tí einum tørvar flutningsfar at koma til arbeiðis.**

**Vónandi verða hesar viðmerkingar tiknar til eftirtektar.**

**Vinarliga**

**Jana H. Dalsgaard, forkvinna**

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Lucas Debesargøta 14
Postboks 1285
FO - 110 Tórshavn

Telefon: (298) 311309
Fax: (298) 316272
E-mail: sff@sff.fo
www.sff.fo

-4. OKT. 2004

46

FMR. j. nr. 6410 - 0003/2003

Komið

-4. OKT. 2004

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Att: Mortan Simonsen, ráðgeva
Postsmoga 2039
160 Argir

Tórshavn 01.10.04

**Viðmerkingar til upprit um endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipani til ummælis**

Á aðalfundi hjá LISA, sum var tann 28. September, varð einmælt samtykt, at harðliga mótmæla, at meirvirðisgjald verður lagt á bøkur.

Vit minna á at listamarknaðurin er ein lítil marknaður, og at eitt meirvirðisgjald "ávirkar atburðin hjá vinnulívi og brúkarum, " (bls. 31. stk. 4.3) sum tað stendur, at eitt meirvirðisgjald *ikki* eigur at gera.

Listamarknaðurin í Føroyum er í løtuni í einari positivari menning, eisini frá politiskari síðu, hetta sæst aftur á, at Vinnumálaráðið hevur sett ein bólk, sum skal kanna møguleikarnar hjá rútmiskum tónleiki at menna seg uttanlands.

Í Danmark hava filantropar sum Jógvan Isaksen stovnað eitt forlag, sum gevur út føroyskar bøkur á donskum.

Tjóðpallurin stendur til at virka um ikki alt ov langa tíð. Vit meina at tað er burturvið, at seta MVG-gjald á atgongumerkið, sum skal gjaldast aftur av peningi, sum verður latin sum stuðul frá landinum.

Eisini halda vit at, onnur undantøk eiga at verða í meirvirðisgjaldslógini, um hon ikki skal "ávirka atburðin hjá vinnulívi og brúkarum":

- Vit meina, at tað er burtur úr vón og viti, at Norðurlandahúsið skal fáa 891. 000 kr. í stuðuli av fíggjarlógini fyri so at gjalda 800.000 kr. aftur í meirvirðisgjaldi av millum annað atgongumerkjum.
- Vit meina at fløgur, ljóðbond og sjónbond eiga at verða frítikin meirvirðisgjald. Í 1995 – 1996, tá ið punktgjaldið á 35 % varð tikið av, vórðu tvífalt so nógvar fløgur seldar.
- Downloading av útlendskum tónleikatilfari og brenning av føroyskum fløgum, eru ikki MVG-skrásett. Tann fysiska fløgusølan líður undir hesum og er minkað ein triðing.
- Prenting av bókum eigur at verða frítikin meirvirðisgjald. Vit peika aftur á tann avmarkaða marknaðin.
- Bøkur eiga framhaldandi at verða frítiknar meirvirðisgjald. Vit minna á at bókamarknaðurin er ein lítil marknaður, og at eitt meirvirðisgjald "ávirkar atburðin hjá vinnulívi og brúkarum, " sum tað stendur, at eitt meirvirðisgjald ikki eigur at gera.
- Verður meirvirðisgjald lagt á bøkur, versnar lesihugurin hjá fólki – serliga ungdómi og hetta kann fáa lemjandi fylgjur.

- Øll onnur lond, bæði í Evropu og í Norðurlondum, síggja burtur frá meirvirðisgjaldinum á bøkur, tí, at tað oyðileggur lesihugin.
- Vit mæla eisini til, at bøkur, sum ikki hava tekst, verða frítiknar meirvirðisgjald. Tað eru nógvir mátar at lesa uppá. Ein er at lesa kort – Atlas, kalendarar, Minn – meg – á – bøkur, ljóðbøkur, nótabøkur, o.a.
- Um meirvirðisgjald verður sett á skúlabøkur, skal peningur finnast til at gjalda meirvirðisgjald av bókum til skúlaverkið. Hetta er ein meirkostnaður, sum er kostnaðarmiklari enn inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum.
- Atgongumerki til tiltøk av listarligum slagi, eiga at verða frítikin meirvirðisgjald. Her er talan um atgongumerki til listaframsýningar, tónleikatiltøk, sjónleik, upplestur og nógv annað. (sí punktið um Norðurlandahúsið)

Vit halda, at alt listarligt virksemi eigur at verða frítikið fyri meirvirðisgjald. Hetta tí at listalívið í Føroyum er í einari støðugari menning. Henda menning er ikki komin av sær sjálvari. Tað hevur verið og er ein politiskur vilji fyri, at framhaldandi menna alt listarligt virksemið. Eisini kunnu vit takka tí sjálvbodna arbeiðinum millum annað á privata bókaforlagsmarknaðinum, sum fer fram bæði her á landi og aðrastaðnis. Varð alt listarligt virksemi frítikið MVG-gjaldið, høvdu vit sæð eina menning, sum allir føroyingar kundu notið gott av. Inntøkur av list, síggjast ikki beinanvegin. Tær síggjast millum annað aftur í ferðavinnuni, í ymisku skálunum, almennum og privatum stovnum og skeinkistøðum. List er og verður altíð ein av grundarsteininum fyri okkara samleika – ein spegil av samtíðini.

Vinarliga

Súsanna Holm

Súsanna Holm
skrivari

- 4. OKT. 2004 47

FMR. j. nr. 6410-0003 | 2003

Komið

07 OKT. 2004

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
165 Argir

Tórshavn, hin 1. oktober 2004

Viðv. Tykkara j.nr. 6410-0003/2003/10: endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini.

Vísandi til skriv tykkara dagfest 09.09.2004 skulu vit boða frá, at vit hava kannað tilfarið, sum tit sendu okkum og vit hava niðanfyri gjørt viðmerkingar til tilmæli tykkara.

Alment um skatt og gjøld, sum áløgd verða vanliga løntakaranum.

Vit kunnu staðfesta, at samlaðu almennu gjøldini (skattur, tollur, punktgjøld og mvg), sum ta almenna nú krevur frá vanliga løntakaranum, eru so stór at hetta ger tað trupult hjá einari vanligari familju við lág- ella miðalinntøku at fáa endarnar at røkka.

Vit kunnu staðfesta, at av hvørjari vunnari krónu, so krevur landskassin uml. 60 – 70 %, íroknað t.d. skatt og mvg-gjøld, og tað halda vit vera alt ov nógv.

Vit eru ikki samd við viðmerkingunum í uppritinum til Fíggjarmálaráðið, og vit skilja ikki hvat ætlanin er, tá nevnt verður á bls. 3, at arbeiðssetningurin er at gjøldini skulu endurskoðast "***so tey verða meira brúkara- og vinnuvinarlig***".

Einki ítøkjuligt verður nevnt, um hvat liggur í nevnda setningi, men vit kunnu staðfesta, at ætlanin hevur als ikki verið at hava atlit til teir persónar í samfelag okkara, sum dagliga stríðast fyri at forvinna nokk til at uppihalda familju sínari, hóast vit meta tað átti at verið tann mest týðandi parturin av møguligum broytingum, at skipa soleiðis fyri, at hesum familjum varð veittur ein fíggjarligur lætti.

Hetta er serliga galdandi, tá tey vælbjargaðu í samfelag okkara fara at fáa størsta fyrimunin av ætlaða skattalættanum hjá verandi samgongu, meðan tey við lág- og miðalinntøkum fara at fáa munandi minni burturúr hesum skattalætta.

Støða okkara er, at mvg-gjøld ikki eiga at vera áløgd dagligum matvørum, sum vit øll hava brúk fyri, tí ein slík skipan rakar fyrst og fremst tey sum frammanundan hava trong fíggjarlig kor.

Tað er fyri okkum greitt, at veruliga endamálið við tilmælinum er at fáa fleiri krónur í landskassan, og vit meta tað sum eina undanførslu, tá nevnt verður á bls. 4 og 31 í tilmælinum, at "***Umsiting-arliga er lættast fyri allar partar við sama avgjaldssatsi fyri allar vørur og tænastur....***". Hvussu ber tað til, at tey sum hava gjørt hetta tilmæli samstundis mæla til enn fleiri undantøk í lógini um punktgjøld ?? Gera somu atlit til umsitingina av skipanini seg ikki galdandi her ??

Vit halda tað eisini vera óheppið, at einki verður nevnt í tilfarinum, sum vit hava fingið, um hvørjir persónarnir eru, sum hava gjørt tilmælið, sum nú er sent út til hoyringar. Heitt verður á ráðið um at senda okkum upplýsingar, um hvørjir persónar hava orðað hetta tilmæli.

07. OKT. 2004

48

FMR. j. nr. 6410-0003/2003

Ítøkjuligu tilmæli tykkara.

Tá mælt verður til at mvg-gjald skal gjaldast av **arbeiðsløn** í sambandi við bygging og umvæling av egnum sethúsum, so vilja vit mótmæla nevnda uppskoti.

Tað er eftir okkara meting sera lítið umhugsað at mæla til nevndu broyting, tí hetta fer at fáa sera álvarsligar fylgjur fyri okkara ungdóm, sum skal seta búgv, og tað er fyri okkum óskiljandi, at tey sum hava orðað nevnda uppskot als ikki tykist at hava hugsað um hesar avleiðingar.

Vit skulu hava í huga, at arbeiðslønin í sambandi við bygging av einum sethúsum vanliga liggur uml. kr. 400.000,00 til 600.000,00 og ætlaða lógarbroytingin vil tí føra við sær ein meirkostnað, sum fer at liggja millum kr. 100.000,00 og 150.000,00.

Tá tilmælið á bls. 5 ber saman nevndu øktu útreiðslur við sparingar í sambandi við keyp av hvítvørum, sum eftir tilmælinum ikki longur skulu verða álagdar mvg-gjald, so er tað átaluvert, at einki verður nevnt um, at útreiðslurnar til vanligar hvítvørur eru rættuliga nógv lægri enn útreiðslurnar til arbeiðsløn, og at talan tí samanumtikið verður um eina munandi útreiðsluøking.

Hendan útreiðsluøking fer í stór mun at raka tey sum frammanundan eru ringast fyri fíggjarliga, tí ein tílík øking hevur ikki somu ávirkan á eina familju, sum hevur kr. 700.000,00 – 800.000,00 í ársinntøku, sum á eina familju, sum bert forvinnur kr. 200.000,00 - 300.000,00 um árið.

Enn meira asosialt verður tilmælið, tá vit kunnu staðfesta, at familjan við hægru inntøkuni harumframt fer at fáa størri fyrimun av ætlaða skattalættanum.

Somu viðmerkingar hava vit til uppskotið, um at áleggja mvg-gjald á **heilivág**.

Aftur her verður tað tey, sum frammanundan eru ringast fyri, sum fara at merkja sviðan av hesari útreiðsluøking. Enn meira ivasom er ætlaða broytingin, tá talan eisini í nógvum førum er um fólk, sum eisini dragast við heilsutrupulleikar.

Vit taka sum heild undir við, at **umhvørvisgjald** (grønt avgjald) verða løgd á dálkandi virksemi, men hetta eigur ikki at raka tilvildarligar persónar, sum t.d. arbeiðsfólk, sum ikki hava atgongd til kollektiva ferðslu og sum tí eru noydd at koyra í egnum bili til og frá arbeiði. Um broytingarnar verða gjørdar í **skrásetingargjøldum og vegskatti**, so er alneyðugt at ein skipan verður sett í gildi, sum gevur persónum, har bilurin er alneyðugur, møguleika at fáa endurgoldið part av útreiðslum teirra.

Viðvíkjandi **brennioljuavgjøldunum**, so skulu vit gera vart við, at tær fyritreytir, sum vórðu í 80-árunum als ikki eru tilstaðar í dag, og tí vilja vit staðiliga til at nevndu avgjøld verða strikaði

Um Landsstýrið ikki vil leggja uppskot fram um avtøku av avgjaldinum á brenniolju, so er hetta enn eitt tekin um, at ætlan landsstýrisins er í fyrstu atløgu at varðveita samlaða skatta- og avgjaldstrýstið, hóast fyritreytirnar í dag eru heilt øðrvísi enn tá reglurnar um slík gjøld vórðu sett í gildi.

Viðvíkjandi **ferðaavgjaldinum**, so verður á bls. 17 nevnt, at endamálið við at áleggja hesi gjøld upprunaliga var "*.. at minka um hugin til uttanlandsferðing føroyinga, minka um peningin teir høvdu til taks at nýta í útlandinum.*".

Hetta meta vit sum formyndarí av ringasta slag, tí fyri okkum er tað ein sjálvfylgja, at ta almenna ikki eigur at leggja seg út í hvussu borgarar landsins ynskja at brúka pening sín, og aftur her eru tað tey sum frammanundan hava lægstu inntøkurnar, sum verða rakt harðast, tí her telur hvør króna.

Endaligar viðmerkingar.

Samanumtikið, so meta vit at tann partur av ætlaðu broytingunum, sum fer at økja útreiðslurnar hjá vanliga løntakaranum ikki eiga at verða framdar.

Sum nevnt frammanfyri, so er tað fyri okkum greitt, at talan í veruleikanum er um ein dulda roynd at økja um inntøkur landskassans, og harvið ein øking av samlaða skatta- og avgjaldstrýstinum í samfelag okkara, og tað vilja vit staðiliga mótmæla.

Vit vænta heldur ikki at teir partar av samgonguni, sum siga seg vilja verja áhugamálini hjá vanliga løntakaranum, fara at taka undir við slíkum lógarbroytingum, sum fer at økja um útreiðslurnar hjá vanliga føroyinginum.

Hinvegin, so meta vit tað vera átaluvert, at tey sum hava orðað hetta tilmælið ikki melda greitt út, bæði um hvørjar avleiðingarnar av ætlaðu broytingum fara at verða og eisini, at veruliga ætlanin er at økja um inntøkur landskassans.

Vinarliga heilsan

Føroya Arbeiðarafelag | Havnar Arbeiðsmannafelag

07. OKT. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003-48

Faroe Islands

**Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya**
Tórsgøta 4
FO-110 TÓRSHAVN

*Att.: Uni Danielsen*

*Tykkara ref.:* *Okkara ref.: 4420-1112/Heri* *Tórshavn 4. oktober 2004*

## Viðv.: Endurskoðan av MVG-skipanini

Ferðaráð Føroya hevur fingið innlit í uppritið frá Fíggjarmálaráðnum (fyribils útgáva til ummælis) har m.a. verður mælt til, at strika frítøku fyri MVG á gistingum.

Sum kunnugt, er ferðavinnan ein valutaskapandi vinna burturav. Sigast kann, at føroysk ferðavinna er á einum útbyggingarstigi innan menning av ferðatilboðum og tænastum har roynt verður at fóta sær í sterkari altjóða kapping um tey ferðandi.

Fjarstøða Føroya, ósjónligheitin, vantandi altjóða kunnleikin til landið og kappingin gerð, at vit mugu brúka lutfallsliga størri orku fyri at gera vart við, at vit eru til, og hava nakað at bjóða ferðamanninum.

Úrtøkan hjá føroyskum ferðavinnufyritøkum er óstøðug og sera tíðaravmarkað har uml. 80% av ársinntøkuni fyri gistingar skal heintast inn í uml. 25% av ferðatíðini (háárstíð). Trupulleikarnir sum gistingarhúsvinnan í lágárstíðini hevur at dragast við eru m.a.

- lág nýtsluprocentir
- lítlar og ongar gistingarinntøkur
- vánalig kapacitetsútnyttan
- og harvið .... vánaligt gjaldføri

Sum heild kann sigast um búskapin í ferðavinnuni, at stutta ferðavinnutíðin gerð, at inntøkuvøksturin og harvið avlopið í vinnuni er avmarkað. Hettar hevur so aftur við sær, at lítlar og ongar nýíløgur vera framdar. Sórar íløgur eru tó gjørdar í flutningskervini seinastu árini og eru partar av hesari vinnu tí tyngd av stórari skuld.

6410 · 0003/2003 49

Orsaka av vantandi lønsemi í gistingarhúsvinnuni er onki gistingarhús bygt í Føroyum seinastu 20 árini. Uttan lønsemi í ferðavinnuni er vandi fyri ov nógvum viðlíkahaldskendum virksemi, har vit vegna vantandi orku eru passivir á nýggjum marknaðum, og lata vaksandi marknaðarpartin til kappingarneytarnir.

Føroysk ferðavinna arbeiðir við at menna og betra um ferðatilboðini, at útnyttað verðandi marknaðir betri, at finna nýggjar marknaðir og leggja seg eftir, at fremja hóskandi kombinatiónir av marknaði og ferðatilboðum.

Tá sagt verður í omanfyri nevnda uppriti (s. 41), at um MVG-undantakið fyri gistingar ikki var við í meirvirðisgjaldslógini so høvdu útlendsk ferðafólk givið størri inntøkur til landskassan, so vilja vit hervið vísa á kanningina frá Háskóla Islands frá februar 2004 har víst verður á hvussu stóra ávirkan ferðavinnan sum vinnugrein hevur á samfelagsbúskapin við sínum beinleiðis, óbeinleiðis og avleidda virksemi.

Við atliti til arbeiði okkara at menna Føroyar sum ferðamannaland, kunna um og marknaðarføra Føroyar sum ferðamál í støðugt harðari kapping við onnur eksotisk ferðamál, metir Ferðaráð Føroya ***ikki***, at tíðin er búgvin til at minka um ella at avtaka MVG-frítøkuna fyri gistingar.

Blíðar heilsur,
**Ferðaráð Føroya**

*Heri Niclasen*
*Stjóri*

Hjálagt: Avrit av kanningini hjá Háskóla Islands um árin av ferðafólki á íslendska búskapin.

**Faroe Islands Tourist Board · Undir Bryggjubakka 17 · P.O. Box 118 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands**
**Tel. +298 31 60 55 · Fax +298 31 08 58 · www.tourist.fo · www.visit-faroeislands.com**

Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya
Boks 3225, FO-110 Tórshavn, Tlf. +298 340040, Fax. +298 340031

Borið bræv
Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
FO-165 Argir

4. okt. 2004

**Viðv. Upprit frá FMR um at strika frítøku av MVG.**

Vísandi til omanfyri nevnda upprit, sum er sent okkum til ummælis, vilja vit við hesum gera fylgjandi viðmerkingar.

Eftir okkara bestu sannføring er gistingarhúsvinnan at sammeta við einhvønn annan útflutning, og skal tískil eins og annar útflutningur frítakast fyri MVG. Tey allarflestu sum nýta gistingarmøguleikarnar eru útlendingar, sum leggja nógv fremmant gjaldoyra eftir seg og eru sostatt við at betra um handils- og gjaldsjavnan. Okkara kappingarneytar eru ferðamøguleikarnir útlandið hevur at bjóða. Útboði av ferðum til onnur støð í heiminum er sera stórt, og tá skal ferðafólki sammeta prísir til Føroyar við prísir til onnur ferðamál. Av tí at føroyski ferðamarknaðurin er lítil, er trupult at fáa sett saman charterferðir, sum kunnu kappast við ferðir til onnur støð.

Við útflutning er vanligt at vørur verða útfluttar til keyparar uttanlands. Í ferðavinnuni skal keyparin flytast og njóta vøruna her á staðnum.

Tann tíðin fólk ferðast hendavegin, sum vit nevna háarstíð, avmarkar seg til hálvan maj, juni, juli og august . Henda tíðin gevur eitt gott íkast til raksturin restina av árinum, og er í fleiri førum við til at gera tað møguligt at halda opið alt árið.

Tað hevur seinni árini verið gjørt eitt ávíst átak at fáa føroyingar at ferðast í egnum landi. Hetta átak er eisini við til at betra um gjaldsjavnan, tá tað er betri at peningurin verður nýttur í landinum enn uttanlands.

Vit eru fullvís í at um tað verður veruleiki, at MVG verður lagt á gistingarnar, fer tað at minka um gistingarnar á gistingarhúsunum kring landið. Fara færri fólk at gera nýtslu av gistingarmøguleikunum, fer hetta at ganga útyvir alt virksemið sum hevur við ferðavinnuna at gera m.a. flutningsfeløgini, bussfeløg, útferðir, matstovur, handlar, ferðaleiðarar og mong onnur. Hetta fer eisini at gera møguleikarnar tyngri at gera fólk varug við ferðamøguleikarnar í Føroyum, og harvið minni ferðavinna.

Henda vinnan er sera arbeiðsskapandi. Vit meta tað vera uml. 300 fólk í starvi í vinnuni. Ein minking í gistingunum viðførir færri arbeiðspláss.

Fíggjarliga koyrir gistingarhúsvinnan sera tungt. Tað kann staðfestast, at seinasta gistingarhús sum bleiv bygt í Føroyum er Hotel Føroyar sum bleiv bygt í 1983. Núverðandi eigarin er triði eigarin eftir fleiri saneringar og tvingsilsølur. Fyri góðum mána síðan hoyrdist at sjómanheimið í Runavík ikki tók móti gestum meiri, tí tað fíggjarliga ikki var forsvarligt. Vit eru rættiliga vís í at tað verða fleiri sum geva somu boð um MVG verður álagt gistingarnar.

Tað verður ein fíggjarlig vanlukka fyri gistingarhúsini og ferðavinnuna í síni heild, um omanfyrinevnda uppskot verður sett íverk, somuleiðis verður hetta ein forðing fyri nýskapan og framburði innan hesa vinnu, sum avgjørt er við til og kann økja um tað avkast tað leggur eftir seg í samfelagnum.

Vit hava heitt á Ferðaráð Føroya, um at gera viðmerkingar til omanfyrinevnda upprit. Hesar viðmerkingar senda vit hjálagt.

Á fundinum 11. okt. við landsstýrismannin vilja vit siga meiri gjølla frá okkara sjónarmiðum.

Vinarligar heilsanir

Nevndin í Gistingarhús- og matstovufelag Føroya

Ann Petersen,
Johan Restorff,
Johannes Jensen,
Uni Danielsen, form.

KOPI

# 6. Búskaparlig árin av vøkstri í ferðavinnu

Í hesum kapitli er ætlanin at viðgera búskaparlig árin, sum ferðafólk hava á samfelagið, og eisini møgulig búskaparlig árin, sum ein vøkstur í ferðavinnuni fer at hava. Tá ið hugt verður at talinum á arbeiðsplássum innan ferðavinnu, eigur at vera havt í huga, at árin frá ferðafólki merkjast langt uttan fyri sjálva vinnugreinina, eins og víst hevur verið á frammanfyri.

## 6.1 Beinleiðis, óbeinleiðis og avleidd árin

Eyðsæð er, at mong hava beinleiðis inntøkur av at arbeiða innan ferðavinnu. Árinini eru kortini fleiri enn so. Vanliga verður talað um beinleiðis, óbeinleiðis og avleidd árin. Neyðugt er at lýsa hesi hugtøk betur.

1) **Beinleiðis árin** eru tey búskaparligu árin, ið standast av virksemi, sum hevur beinleiðis samband við ferðavinnuna. Her verður hugsað um beinleiðis búskaparliga árinið á fyritøkur, sum virka innan ferðavinnu. Tørvur er tí á at kortleggja ferðavinnuna til tess at gera greitt, hvat skal telja við sum beinleiðis árin av henni á samfelagsbúskapin.

2) **Óbeinleiðis árin** er virksemi, sum verður til uttan fyri ferðavinnuna orsakað av virksemi innan ferðavinnu. Dømi um hetta er m.a. vørur, sum nýttar verða í ferðavinnuni, men sum skapa inntøkur í fyritøkum uttan fyri hana. Hesar fyritøkur nýta eisini vørur frá øðrum fyritøkum, og soleiðis gongur samfelagsbúskaparliga ringrásin. Mangar ymsar fyritøkur hava beinleiðis ella óbeinleiðis samband við virksemi innan ferðavinnu, men tað kann vera ringt at fáa eyga á hesi sambond. Skal tað bera til, mugu viðskiftini millum fyritøkur kortleggjast á einhvønn hátt. Til slíka kortlegging krevst nágreiniligt spurnarblað, sum allar fyritøkur í ferðavinnuni mugu svara. Tó at tað ber til, hevði tað verðið sera dýrt, og ikki er vist, at allar fyritøkur høvdu viljað svarað øllum spurningum, tí upplýsingarnar snúgva seg um sjálvt grundarlag fyritøkunnar, og tað kundi skatt kappingarstøðuna at latið slíkar upplýsingar av hondum. Annar háttur at lýsa hesi viðurskifti er at líta at innkeyps- og sølutølunum og nýta tey sum grundarlag fyri at meta um óbeinleiðis árin.

3) **Avleidd árin.** Avleidd árin eru árin, sum verða til orsakað av beinleiðis og óbeinleiðis árinum. Lættast er at hugsa sær hesi árin soleiðis, at tá ið eftirspurningurin veksur eftir einari vøru ella tænastu, gerst neyðugt at vaksa framleiðsluna av vøruni ella tænastuni. Vaksandi framleiðsla krevur meiri arbeiðsmegi, og tískil vaksa inntøkurnar hjá húsarhøldum. Hesin inntøkuvøkstur hjá húsarhøldum økir nýtslu teirra, eftirspurningurin veksur og harvið framleiðslan hjá fyritøkunum.

Beinleiðis árin hava eyðvitað mestan týdning, og tí skulu tey kannast nærri.

## 6.2 6.2 Beinleiðis árin av ferðafólki

Dømi um búskaparlig árin av ferðafólki er virksemi, sum verður til fyri at nøkta tørvin hjá ferðafólki, og tann skattur sum ríkið fær av hesi virksemi. Hesi árin kunnu skiftast sundur í tveir flokkar:

- Rakstur av fyritøkum sum ferðafólk hava tørv á (eins og borgarar landsins).
- Rakstur av fyritøkum sum ferðavinnan leiðir av sær.

Henda virksemi sýnir beinleiðis árinið, sum ferðafólk hava. Harumframt eru onnur árin, t.e. óbeinleiðis og avleidd árin, sum sýna, at heildarárinini eru meiri enn bara beinleiðis árinini. Óbeinleiðis og avleidd árin eru eins verulig og beinleiðis árin. Tey síggjast aftur um alt samfelagið og kunnu vera eins stór ella størri enn beinleiðis árin, men tað veldst um, hvussu útgjøld frá ferðafólki koma inn í samfelagsbúskaparligu ringrásina. Búskaparlig virksemi kann málast á ymsan hátt í mun til beinleiðis, óbeinleiðis og avleidd árin. Best er at meta um beinleiðis árin við at líta at:

- • søluinntøkum ella framleiðslu í fyritøkum innan ferðavinnu,
- • lønarútgjaldingum innan ferðavinnu,
- • ársverkum innan ferðavinnu,
- • skatti frá ferðavinnu.




Mynd 6.1 Búskaparlig árin av ferðafólki

Afturat hesum verður hugtakið virðisøking (meirvirði ella framleiðsluvirði) vanliga nýtt í sambandi við áringsgreiningar. Virðisøkingin sigur okkum nakað um "reina" virðið á búskaparligu virksemini, sum verður funnin við at draga kostnaðin á innkeyptum vørum frá søluinntøkunum hjá fyritøkunum. Virðisøking ber í sær gjøld fyri framleiðslutættirnar, fæfeingi og arbeiðsmegi. Hugtakið virðisøking verður ofta nýtt, tí tað tá ber til at bera saman við landsframleiðsluna, sum er samanlagda virðisøkingin í øllum samfelagsbúskapinum. Eittnú søluinntøkur kunnu ikki berast saman við landsframleiðsluna, tí vandi er fyri at telja tað sama tvær ferðir. Tá verður sølan hjá

einari fyritøku til aðra tald við eina ferð afturat, tá ið vøran verður seld triðja parti. Eins og viðgerðin frammanfyri sýnir, er týdningarmikið at greina búskaparligu árinini eftir uppruna, t.e. beinleiðis árinini av ferðafólki. Hinvegin er neyðugt at gera sær greitt, hvat borið verður saman við í slíkari greining, áður enn til ber at síggja, hvørji árin ferðafólk hava ella hava havt í Íslandi.

Til tess at kunna greina árinini av ávísum fyribrigdi, má á einhvønn hátt verða mett um, hvussu umhvørvið (í hesum føri Ísland) hevði sæð út, um fyribrigdið ikki var. Sjálvsagt ber illa at svara hesum spurningi, og tó at svar verður funnið, er ikki vist, at tað hevur hagfrøðiligt gildi. Í teimum útlendsku kanningum, sum starvsfólk Hagfræðistofnunar hava hugt eftir, verður vanliga ikki farið so langt. Heldur verður bara hugt eftir, hvørja vekt virksemin hevur í samfelagsbúskapinum. Roynt verður ikki at spáa, hvat hevði hent, um vinnugreinin datt niðurfyri, og vinnulívið lagaði seg eftir nýggju støðuni.

Á ymsan hátt er gagnligari at gera grein fyri tí, vit nevna *marginalárin* av vøkstri ella afturgongd í ferðavinnuni, heldur enn at líta at heildarárinum av virksemini. Tað er nógv torførari at greina slík marginalárin enn at greina heildarárin. Í teimum rannsóknum, sum hugt hevur verið eftir, er vanliga ikki farið longri enn til at rokna heildarárin og leggja fast, at marginalárin eru tey somu sum meðalárin (soleiðis at 10% vøkstur í ferðavinnuni svarar til 10% vøkstur í meðalárinum, eins og áður er víst á).

Greiningin í frágreiðingini er tískil avmarkað við sonevndari partsjavnvág (t.e. *partial equilibrium*). Ætlanin er ikki at siga, hvat ið fer at henda, um ferðavinnan dettur niðurfyri, heldur verður roynt at meta týdningin, sum vinnugreinin hevur í samfelagsbúskapinum, sum nú er. Vinnuligu og búskaparligu árinini, sum ávíst eru í hesari frágreiðing, skulu skiljast sum árin, ið hava samband við tilveruna hjá ferðafólki. Multiplikatorar frá innkeyps- og sølugreiningum vera ofta mistulkaðir tann veg, at teir siga, hvussu mikið framleiðsla ella vinna minka, um vinnugreinin ikki var til. Men soleiðis ber ikki til at hugsa, tí um vinnugreinin var ikki til, hevði búskaparskipanin ment seg á annan hátt. Framleiðslutættirnir høvdu verið nýttir øðrvísi. Siga vit, at vinnugreinin verður rikin á sama stigi sum nú, tá siga niðurstøðurnar okkum, hvussu nógv virksemi, ið ferðavinnan skapar, og soleiðis eisini hvørja vekt hon hevur í samfelagsbúskaparligu heildini.

### 6.3. Multiplikatorar og niðurstøður

Við tølum fyri hvussu nógvan pening útlendskir ferðamenn leggja eftir seg í Íslandi og við vísindaligum háttalag, sum lýst er í fylgiskjali, ber til at gera mátistokk fyri styrkina á árinunum á íslendska búskapin, máld í krónum. Sum fyrr er frágreitt, ber til at samantvinna beinleiðis og óbeinleiðis búskaparligu árinini við multiplikatorum.

Vit nevna beinleiðis árin $V_B$, óbeinleiðis árinini $V_Ó$ og avleiddu árinini $V_A$. Margfaldarin $M$ er tá samanlagda broytingin í óbeinleiðis og avleiddum árinum, tá ið beinleiðis árinini broytast eina krónu. Um vit rokna við, at sambandið teirra millum er linjulíkning, verður hon tí soleiðis:

$$V_B + V_A + V_Ó = M \times V_B \qquad (3.1)$$

Nú ber til at rokna út ymsar multiplikatorar, sum lýst er í fylgiskjali. Multiplikatorarnir, sum lýstir eru, eru sonevndir framleiðslumultiplikatorar og eru roknaðir fyri hvørja vinnugrein sær, sambært flokking av framleiðslugreinum hjá ISIC við hjálp frá keyps- og søluvørutalvutalvu, sum Hagstofa Íslands gjørdi fyri árið 1997. Myndilin, sum her er nýttur, er tvíbýttur: øðrumegin er talan um

myndil, sum vísir til beinleiðis og óbeinleiðis árin, sonevndan opnan myndil, og hinumegin er talan um myndil, sum vísir til beinleiðis, óbeinleiðis og avleidd árin, t.e. lokaðan myndil í mun til húsarhøld.

## 6.4 Multiplikatorar og niðurstøður um óbeinleiðis árin

Niðurstøðurnar av myndlinum, sum sýndar eru niðanfyri, vísa sambandið millum beinleiðis og óbeinleiðis árin av øktum eftirspurningi í samfelagsbúskapinum.

Talva 6.1 Framleiðslumultiplikatorar

| | *Vinnugrein* | Multiplikator |
|---|---|---|
| *1* | Landbúnaður og fiskivinna | 1,85 |
| *2* | Ídnaður | 1,87 |
| *3* | Ravmagns-, hita- og vatnveiting | 1,74 |
| *4* | Byggivinna | 2,30 |
| *5* | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 1,70 |
| *6* | Samferðsla | 2,15 |
| *7* | Peningastovnar, trygging og tænasta í sambandi við vinnuvirksemi | 1,53 |
| *8* | Tænastuvinna av ymsum slag | 2,73 |

Framleiðslumultiplikatorurin fyri eina vinnugrein vísir, hvussu mikið heildarframleiðslan í samfelagsbúskapinum veksur, um eftirspurningurin eftir framleiðslu vinnunnar veksur eina krónu. Verður hugt at tølunum í hesi talvu sæst, at hvørja ferð eftirspurningurin eftir samferðslu veksur eina krónu, veksur heildarframleiðslan 2,15 krónur.

Við at skifta ferða- og gistingarútreiðslur hjá útlendskum ferðafólki í Íslandi árið 2002 sundur eftir einstøkum vinnugreinum kann hesin eftirspurningurin umroknast til framleiðsluárin. Sundurbýtið í greinar fæst frá gjaldskanningini, sum ferðamálaráðið gjørdi, og sum áður er nevnd.

Talva 6.2 Búskaparlig árin av gjøldum frá ferðafólki innanlands, beinleiðis og óbeinleiðis árin

| | Framleiðsla (milliardir krónur) |
|---|---|
| Beinleiðis árin | 22,8 |
| Óbeinleiðis og avleidd árin | 22,5 |
| Samanlagt | 45,3 |

Útrokningar: Hagfræðistofnun

Hesi tøl vísa, at heildarvirksemin - roknað sum umsetningur – í samfelagsbúskapinum, sum stendst av peninganýtslu ferðamanna, er 45,3 milliardir krónur. Tølini kunnu ikki tulkast sum minkingin í heildarvirksemi, um ferðafólk ongan pening nýttu. Heldur er ætlanin við tølunum at vísa, hvønn týdning, ferðavinnan hevur fyri samfelagsbúskapin, sum nú er. Til tess at geva eina mynd av, hvørja vekt henda støðd hevur í búskapinum, ber til at hyggja at hesum framleiðsluárini í mun til heildarframleiðsluna ella umsetningin í búskapinum. Hetta svarar til 2,45% av heildarframleiðsluni og umsetninginum fyri 2002. Tá ið hugt verður at framleiðslutølunum, skal verða havt í huga, at her er øll framleiðsla íroknað, t.e. er framleiðslan í øllum vinnugreinum. Tí er vandi fyri at telja sama

virði tvær ferðir, tá ið vøran í einari vinnugrein verður nýtt sum rávøra í aðrari vinnugrein. Tí ber ikki til at bera hesi framleiðslutøl saman við t.d. við bruttotjóðarframleiðsluna, sum er heildarframleiðslan av endaligari vøru. Eisini skulu havast í huga tær strongu fortreytir, sum nevndar eru í fylgiskjali, og sum eru grundarlag undir útrokningunum, um alið í framleiðsluni í fyritøkum. Uttan hesar fortreytir, bar ikki til at gera slíka greining.

## 6.5 6.5 Multiplikatorar við niðurstøðum um óbeinleiðis og avleidd árin

Eins og áður er nevnt, ber til at lata multiplikatorarnar vísa beinleiðis, óbeinleiðis og avleidd árin. Ætlanin við tí er at vísa, at árin av eftirspurningi eru ikki bara, at viðskiftini millum fyritøkur økjast, men eisini lønargjaldingar og harvið eisini privata nýtslan. Í talvuni niðanfyri eru multiplikatorar útroknaðir við grundarlag í myndli, sum er lokaður í mun til húsarhøld.

Talva 6.3 Framleiðslumultiplikatorar – óbeinleiðis og avleidd árin

| | *Vinnugrein* | Multiplikator |
|---|---|---|
| *1* | Landbúnaður og fiskivinna | 4,07 |
| *2* | Ídnaður | 3,33 |
| *3* | Ravmagns-, hita- og vatnveiting | 3,06 |
| *4* | Byggivinna | 4,04 |
| *5* | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 4,20 |
| *6* | Samferðsla | 4,26 |
| *7* | Peningastovnar, trygging og tænasta í sambandi við vinnuvirksemi | 2,92 |
| *8* | Tænastuvinna av ymsum slag | 4,86 |

-

Bera vit saman talvu 6.2 og talvu 6.4 sæst, at multiplikatorarnir eru meiri enn tvífaldaðir, nú avleidd árin eru tikin við.

Við at skifta ferða- og gistingarútreiðslur hjá útlendskum ferðafólki í Íslandi árið 2002 sundur eftir einstøkum vinnugreinum kann hesin eftirspurningurin umroknast til framleiðsluárin, eins og áður hevur verið gjørt.

Talva 6.4 Búskaparlig árin av gjøldum frá ferðafólki innanlands, beinleiðis, óbeinleiðis árin og avleidd árin

| | Framleiðsla (milliardir krónur) |
|---|---|
| Beinleiðis árin | 22,8 |
| Óbeinleiðis og avleidd árin | 69,4 |
| Samanlagt | 92,2 |

Útrokningar: Hagfræðistofnun

Hesi tøl vísa, at heildarvirksemin í samfelagsbúskapinum, sum stendst av peninganýtslu ferðamanna, er 92,2 milliardir krónur. Árinið er meiri enn tvífaldað, tí at multiplikatorarnir tvífaldaðust í mun til áður, tá ið avleidd árin ikki vóru tald við. Hetta svarar til uml. 5% av heildarframleiðsluni og umsetninginum fyri árið 2002. Áhugavert er at bera hesi tøl saman við talið á ferðafólki. Árið 2002 var ferðafólkatalið 279.600. Beinleiðis árinini av teimum eru 82 túsund

krónur í nýtslu fyri hvørt ferðafólk. Taka vit hinvegin búskaparligu árinini av gjøldum innanlands fyri hvørt ferðafólk í mun til umsetning og framleiðslu, er upphæddin 330.000 kr. fyri hvørt ferðafólk. Í hesum tølum eru inntøkur frá ferðaseðlakostnaði, sum ferðafólk gjalda fyri at koma til Íslands. Her skulu eisini havast í huga tær strongu fortreytir, sum eru grundarlag fyri at skilja hesi búskaparligu árin, og sum greitt er frá í kapitli 6.4.

Virksemin, sum ferðavinnan hevur við sær í Íslandi, er verulig, uttan mun til um hugt verður at beinleiðis, óbeinleiðis ella avleiddum árinum. Um vit bera saman hesi tøl við aðrar uppgerðir, skal sigast, at Thjóðhagstofnun gav út frágreiðing fyri árið 2000, har roynt varð at greina íkast ferðavinnunnar til heildarlandsframleiðsluna árið 1999. Niðurstøðan av hesari frágreiðing bar á tann bógv, at parturin var uml. 4,5 %, t.e. við at skilgreina tær vinnugreinar í tjóðarroknskapinum, sum stóðu fyri veitingum til ferðafólk. Tað ber ikki til til fulnar at bera saman hesa støðd við ta lutfalsstøðd, sum roknað er út her frammanfyri, tí inntøkur frá ferðaseðlasølu til útlendsk ferðafólk eru ikki tiknar við; men hinvegin eru árin frá ferðavinnuni á aðrar vinnugreinar rættað. Verða inntøkur frá ferðaseðlasølu til útlendsk ferðafólk tiknar við, verða árin frá útlendskum ferðafólki á sølu og umferð í samfelagsbúkapinum við hesum roknihátti 8,22%. Tá er atlit tikið til útgjøld frá útlendskum ferðafólki í sambandi við flutning higar til lands, peninganýtslu annars - beinleiðis, óbeinleiðis og avleidd árin. Tískil er greitt, nú sølan av ferðaseðlum til og úr Íslandi er roknað við, at ferðavinnan hevur væl størri vekt í samfelagsbúskapinum, enn niðurstøðurnar hjá Thjóðhagsstofnun vístu.

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Jekaragøta 10, Boks 248, FO-110 Tórshavn. Tlf. 316973 Fax: 318516 E-mail: fsn@post.olivant.fo**

Komið
-5. OKT. 2004
Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
Postsmoga 2039
165 Argir

Tórshavn, tann 4-10-2004
J. nr.: 2004056-2
Viðgjørt: EMA/ÁJ
Tykkara J. nr.:

**Viðv. uppriti við endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini, tykkara J.Nr. 6410-0003/2003/16**

Víst verður til bræv tykkara, dagfest 10. august 2004.

Sagt verður hervið frá, at Føroya Skipara- og Navigatørelag kann ikki taka undir við, at kunngerð nr. 50 frá 17.04.1998 um meirvirðisgjaldsfrítøku fyri sjóklæðir, við tí grundgeving, at kunngerðin er ógjørlig at umsita.

Mælt verður tí til, at reglur verða gjørdar, soleiðis at kunngerðin verður gjørlig at umsita, og orðað soleiðis, at hon verður galdandi fyri ella øll sjófólk t.v.s bæði á fiski- og handilsskipum.

Tað er felagsins fatan, at tað er ikki nakar trupulleiki at gera eina allýsing av, hvørji sjóklæðir koma undir lógina, ella hvørji klæðir ikki koma undir lógina.

Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Ellintur M. Abrahamsen
Ellintur M. Abrahamsen

6410-0003/2003 50

**Bileftirlit Føroya**
**Faroes' Vehicle Inspection**

Komið
-5. OKT. 2004
Fíggjarmálaráðið

**Tórshavn, tann:** 04. oktober 2004
**BF. J. nr.:** 200400241/2
**(at tilskila í svari)**
**Viðgjørt:** JAJ/ADM - 07.02
**Tygara skriv:** 6410-0003/2003 / 34

**Fíggjarrmálaráðið**
**Taðagøta 39**
**Postsmoga 2039**
**165 ARGIR**

**Viðvíkjandi uppriti um endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini til ummælis.**

Bileftirlitið hevur lisið uppritið og serliga fest seg við punkt. 7. Skrásetingargjøld á bilum o.a., sum er umsitingarøkið stovnsins.
Sum tað gongur fram av uppritinum, yvirtók Bileftirlitið umsitingina av vektgjaldi á akførum í 2001 frá Føroya Gjaldstovu og 1. oktober í ár, yvirtók stovnurin umsitingina av skrásetingargjøldum av akførum frá Toll- & Skattstovu Føroya. Tað er tí avmarkað, hvønn kunnleika stovnurin hevur í skrivandi løtu til sjálva umsitingina av skrásetingargjøldunum. Vit vilja tó gera viðmerkingar til ætlaða umhvørvisvinarliga útrokningarháttin á skrásetingargjøldum.

**Ad 7. Skrásetingargjald á bilum o.a.**
Uppskotið um eitt umhvørvisgjald á bilum, í staðin fyri eitt skrásetingargjald í tí týdningi, sum vit kenna í dag, er áhugavert og um tað verður rætt ásett, kann tað verða við til, at eggja fólki, til framhaldandi at keypa nýggjar umhvørvisvinarligar bilar.

Allir bilar, ið eru meginfloksgóðkendir í ES, hava uppgivið brennievnisnýtsluna í km/l, men hava harumframt eisini uppgivið útlátið av $CO_2$ (koltvítiltu) í gram pr. km. Hetta seinna er úttrykk fyri hvussu nógv bilurin dálkar umhvørvi við $CO_2$ í gram pr. koyrdan kilometur. Jú fleiri kilometrar, ið koyrast kunnu pr. litur brennievni, jú minni verður útlátið av $CO_2$ í gram pr. koyrdan kilometur og jú færri kilometrar, ið koyrast kunnu pr. litur brennievni, jú størri verður útlátið av $CO_2$ í gram pr koyrdan kilometur.
Møguliga kundi verið umhugsað, eisini at latið útlátið av $CO_2$ í gram pr. koyrdan kilometur, at gingið inn sum ein faktor í útrokningarháttin?
Í sambandi við grønu avgjøldini í Danmark, sum verða útskrivað sum árligir skattir afturat vektgjaldinum, hevur Ferðslustýrið í Danmark, latið gjørt eitt uppbýti í 7 orkubólkar, har A stendur fyri minstu brennievnisnýtslu pr. koyrdan kilometur, meðan G stendur hægstu brennievnisnýtslu pr. koyrdan kilometur. Í hvønn orkubólk, innganga bæði brennievnisnýtsla í kilometur pr. litur og $CO_2$ útlát í gram pr. kilometur.
Møguliga kundi eisini verið umhugsað, at nýtt hesar orkubólkar í ætlaðu útrokningini av grøna avgjaldinum?

Sambært § 19, í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desembur 1992 um skrásetingargjald, rindar nýggi eigarin við umskráseting kr. 600 til landskassan. Inntøkan til landskassan fyri umskrásetingargjaldið liggur um 2,5 mió kr. árliga og er helst við í talvu 2.1 á síðu 18 í uppritinum undir Skrásetingargjøldum.

POSTSMOGA 3206 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 04 00 • TELEFAX 35 04 01 • E-MAIL: BFF@BFF.FO

Sum er krevur Bileftirlitið umskrásetingargjaldið inn í sambandi við eigaraskifti á bili. Spurningurin er hvussu og á hvønn hátt, Fíggjarmálaráðið hevur hugsað sær at hetta gjald skal verða kravt inn framyvir?

**Ad 7.1 Eykaútgerð**
Ein vansi, ið vístur kann verða á, við einum grønum avgjaldi, ið "premierar" bilar við lítlum motori og lágari brennisevnisnýtslu er, at trygdarútgerðin kann verða niðurprioritera í mun til ein bil við størri motori. Tað er ein sannroynd, at bilframleiðarar leggja seg eftir, at útgerða teir bilar, sum hava størri motorar, við enn meiri trygdarútgerð. Hesir bilar brenna meir enn bilar við minni motori og sambært uppskotinum, koma teir at gjalda eitt hægri grønt avgjald, sjálvt um bæði tann passiva og aktiva trygdin í bilinum, er á einum hægri støði enn í minna bilinum. Sostatt kann vandi verða fyri, at tryggari bilar koma at gjalda eitt lutfalsliga hægri grønt avgjald og spurningurin er, um tað var ætlanin?

**Ad 7.2 Vinnubilar o.a.**
Bileftirlitið tekur fult undir við, at neyðugt er at rudda upp í møguligum blandi millum vinnuligt virksemi og privata nýtslu. Eru reglurnar fløkjasligar á pappírinum, eru tær ikki minni fløkjasligar at umsita og eru ein spíri til afturvendandi konfrontatiónir við borgaran, sum roynir at sleppa við at rinda lægst møguligt skrásetingargjald, sjálvt um hetta kanska ikki er "berættiga".

Tað er eisini ein sannroynd, at lastbilar og bussar eru óivað tey akfør, ið dálka umhvørvið mest og tá ætlanin er, at avgjaldið framyvir skal vera eitt grønt avgjald, er spurningurin um hetta skal síggjast aftur í ásetingini av grøna avgjaldinum fyri hesar bilar, ið reka vinnuligt virksemi?

**Ad 7.3 Vegskattur**
Tað verður ført fram, at tað er stór umsiting av at krevja vektgjaldið inn. Prosessirnar eru somikið automatiseraðar, at stovnurin bert nýtur eitt hálvt ársverk til uppgávuna. Væntandi kann innkrevjingin og bókhaldið automatiserast enn meira, tá krøvini ætlandi verða send út og kravd inn gjøgnum GjaldSkipanina hjá peningastovnunum.

Hinvegin hava vit onki ímóti, at vektgjaldið verður lagt yvir á bensin- og dieselprísirnar, soleiðis at gjaldið frá at verða eitt vektgjald, verður eitt nýtslugjald í mun til hvussu nógv, bilurin verður nýttur og harvið slítur vegirnar. Hetta fer í fyrsta umfari at spara stovninum eitt hálvt ársverk og nakað av útreiðslum til EDV og postgjald.
Hinvegin verður sýnsgjaldið, sum er kr. 250 árliga fyri hvønn bil, hvørs heildarvekt er í mesta lagi 3.500 kg og kr. 350 árliga fyri akfør yvir 3.500 kg, í dag kravt inn saman við vektgjaldinum. Fyri stovnin er henda skipan sera ómakaleys og krevur lítla og onga umsiting.
Verður vektgjaldið broytt til eitt nýtslugjald, ið verður lagt á bensin- og dieselprísirnar, má ein loysn finnast á innkrevjingini av árliga sýnsgjaldinum.

Væntast kann eisini ein ávís mótstøða frá fólki í útjaðaranum, ið arbeiða í miðstaðarøkinum og sum nýta bilin sum flutningsamboð millum heim og arbeiðspláss.

Vinarliga

Jákup Jacobsen, stjóri

- 5. OKT. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003\51

Komið

-5. OKT. 2004

Fíggjarmálaráðið

Føroya Forngripafelag
Postsmoga 1173
110 Tórshavn

Hoyvík 4. oktober 2004

Fíggjarmálaráðið
Postsmoga 2039
165 Argir

Viðv. : Endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini.

Vit hava við brævi dagf.10. august 2004 móttikið oman fyri nevnda skriv til ummælis.

Felagið tekur sjálvsagt fegið undir við uppskotinum í grein 5.6 seinasta petti og grein 1.6 fyrsta petti og vónar, at uppskotið verður samtykt.

Hetta vil fáa stóran týdning fyri tey antikvarisku varðveitingararbeiðini, ið fara fram ymsa staðni í landinum.

Nevnast kann, at tá vit fluttu Gamla Hospital máttu vit gjalda um kr. 150.000,- í MVG, og er hetta nógvur peningur í slíkum høpi, hvar lítið er til frammanundann. Vit søktu um at sleppa undan at gjalda, men tað bar tíverri ikki til.

Nevnast kann eisini, at tá vit arbeiddu í Koltri, var upp á tal, at Ny Carlbergfonden vildi stuðla arbeiðinum við tveimum milliónum. Á fundi í Landsstýrinum um sama mál segði stjórin fyri fondinum Hans Edvard Nørgaard Nielsen, at fondurin als ikki vildi lata studning um 25 % fóru í landskassan, tí í Danmark slapp slíkur stuðul undan avgjaldi. Av øðrum orsøkum fall hesin stuðulin tíverri burtur.

Vit ætla at søkja danskar grunnar um stuðul til Gamla Hospital, og vil tað økja møguleikarnar, um MVG ikki verður kravt, tá tað snýr seg um antikvariskar varðveitingar og endurbyggingar.

Við heilsu

f. Føroya Forngripafelag

Mortan Winther Poulsen

Mortan Winther Poulsen, formaður

-5. OKT. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003\52

VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 04. oktober 2004
J.Nr.: 200400420 / 3
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: AP

Tygara skriv: 6410-0003/2003

Fíggjarmálaráðið
Traðargøta 39
Postsmoga 2039
165 ARGIR POSTSMOGUR

Komið
-5. OKT. 2004
Fíggjarmálaráðið

**Viðvíkjandi endurskoðan av føroysku avgjaldslógunum**

Vinnumálaráðið hevur fingið upprit um endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini til ummælis.

Arbeiðssetningurin fyri endurskoðanini var, at "Punktgjøldini og meirvirðisgjaldsskipanin skulu endurskoðast, so tey verða meira brúkara- og vinnuvinarlig". Endamálið við endurskoðanini er ikki at fremja lættar ella at skapa fleiri inntøkur til landskassan, og skulu tilmælini til broytingar í avgjaldslógunum helst vera útreiðsluneutral.

Vinnumálaráðið hevur í fleiri umførum mælt til, at nógv av punktgjøldunum verða avtikin, og snúgva tey seg í høvuðsheitinum um tey sokallaðu mærglætispunktgjøldini, sum tíðin er farin frá, og verður tí tikið undir við tilmælinum í uppritinum viðvíkjandi avtøku av umrøddu punktgjøldum.

Viðvíkjandi teimum sokallaðu eiturevnis-, umhvørvis- og heilsuskattunum verður mælt til, at umhugsað verður væl , áðrenn teir verða ásettir, og at teir javnan verða endurmettir, so teir ikki gerast ótíðarhóskandi eins og marglætisgjøldini.

Tá tað snýr seg um mvg-undantøkini so vil Vinnumálaráðið mæla frá, at undantøkini einvegis verða strikað, men at neyvari metingar verða gjørdar um, hvussu tiltøkini raka.

Vinaliga

Bjarni Djurholm
landsstýrismaður

/Arne Poulsen

-5. OKT. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003 53

# MENTAMÁLARÁÐIÐ
**Aðalskrivstovan**



Fíggjarmálaráðið
Postrúm 2039
165 Argir


**Dagfesting: 04. oktober 2004**
**Tygara ref.:**
**Máltal: 21100/040618/2 -/SBE**

Mælt verður frá at leggja MVG á bøkur, tí hetta viðførir, at allar skúlabøkur sostatt gerast 25 % dýrari.

Mett verður, at tað er skeivt at strika MVG-frítøkuna av bókum, serliga orsakað av at tað verður ein eyka kostnaður hjá næmingunum á vinnu- og miðnámsskúlunum, sum sjálvir gjalda bøkurnar, sum nýttar verða í undirvísingini. Bókastuðulin, sum verður latin næmingum undir 18 ár, dekkar sum er ikki bókaútreiðslurnar hjá næmingunum í vinnu- og miðnámsskúlunum.

Mentamálaráðið er ikki samt í niðurstøðuni, at tað finst eingin góð grundgeving fyri, at bøkur skulu frítakast fyri mvg. Viðmerkjast skal, at í fleiri stórum evropeiskum londum verður stór mentanarpolitisk áherðsla løgd á ikki at tyngja bókaframleiðslu við avgjøldum m.a. sum liður í at styrkja móðurmálið. Hetta verður gjørt antin við differentieraðum mvg ella mvg-frítøku. Mentamálaráðið mælir til at varðveita mvg-frítøkuna av bókum.

Mælt verður eisini frá at leggja mvg á tíðindabløð. Føroysk tíðindabløð fáa ongan almennan stuðul, t.d. útberingarstuðul, soleiðis sum vanligt er í øðrum Norðanlondum. Útlitini fyri at tíðindabløð fara at fáa almennan stuðul eru vánalig, og eiga tey at fáa mvg-frítøku, hóast hetta møguliga er í andsøgn við endamálið við mvg-lógina.

Mentamálaráðið tekur undir við tilráðingini, at sjálvboðið mentanarligt arbeiðið er frítikið fyri mvg. Harafturat mælir Mentamálaráðið tó til, at øll søla av atgongumerkjum til mentanarlig tiltøk (tónleik, yrkis- so væl sum áhugasjónleik, framsýningar, ítrótt osfr.) eigur at vera mvg-frí.

Viðvíkjandi MvG av "e-keypi", saknar Mentamálaráðið eina lýsing av og støðutakan til avgjøld (mvg) av tí vaksandi handli, ið fer fram um alnótina.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Petur Petersen
*aðalstjóri*

6410-0003/2002 54.


*Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta-, og kirkjumál*
MENTAMÁLARÁÐIÐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • MMR@MMR.FO

# STARVSMANNAFELAGIÐ

**Fíggjarmálaráðið**
**Traðargøta 39**
**boks 2039**
**165 Argir**

**att.: Mortan Simonsen, ráðgevi**

Komið
8. OKT. 2004
Fíggjarmálaráðið

**Tórshavn t. 07.10.2004**

**Við. endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini, J.nr.: 6410-0003/2003/17, skriv dagfest 10. august 2004.**

Av ymsum orsøkum hevur ikki verið gjørligt at hildið okkum til tíðarfreistina at gera viðmerkingar til uppskotið (04.okt.), men vóna vit tó, at sjónarmið okkara kunnu takast við í framhaldandi viðgerðini av hesum máli.

Starvsmannafelagið tekur undir við, at spurningurin um avgjaldskipanir og – lóggávu eigur at vera so einføld og gjøgnumskygd sum gjørligt og eisini rakstraliga bílig at umsita, sum til seinast eisini vil koma brúkaranum og øðrum til góðar.

Tí eigur høvuðsreglan at vera, at øll undantøk í MVG skipanini eiga at takast av, meðan aðrar ásetingar fyri at lætta um ella krevja meira inn, eigur at verða við øðrum skipanum ella lóggávum.

Tað ein royndur lutur, at týdningarmiklar tænastur og bólkar, njóta gott av MVG frælsinum . ml.a. kann nevnast bygging og umvæling av egnum bústaði/húsum, sum hevur verið ein týðandi táttur í strembanin hjá fólkum at seta føtur undir egið borð. Her má skynsamliga farast til verka og neyvar kanningar gerast, áðrenn hendan byrðan verður løgd á fólk, ml.a. við at hyggja eftir hvussu innflutningur av byggitilfari kann gearst bíligari og at farið verður undir at skipa "nýggj" bústaðarmynstur í sambandi við bygging av íbúðum.

Tá talan er um bløð, bøkur og annað virksemi í hesum sambandi, má og kann ein MVG áseting ikki standa einsamøll. Tað ber stutt sagt ikki til, at leggja størri byrðar á hetta øki, uttan at hetta fær álvarsligar avleiðingar. Gerast bøkur og bløð dýrari enn tey eru í dag, kemur hetta álvarsliga at taka grundarlagi undan tí frammaundan lítla marknaðarøki, sum er her hjá okkum og týdningur av tí frælsa orðinum og mentanligu ávirkanini, kemur út fyri einum álvarsligum bakkasti og fólkaræði kemur eisini at líða undir hesum. Tí er neyðugt at tryggja hetta "virksemi" á einhvønn skilagóðan hátt, t..d. við mentunnarligum og øðrum upplýsingarstuðli.

6410-0003/2003 \55

Eisini eigur spurningar um gjøld á vørum, í sambandi við heilsu og umhvørvið, at verða tiknir við í viðgerðini av ætlaðu broytingunum. Men eisini her krevst, at neyvar og grundleggjandi kanningar verða gjørdar, áðrenn nakað verður sett í verk, soleiðis at slík gjøld veruliga koma eini betri heilsu- og umhvørvistøðu til gagns.

Framlagda uppskotið er drúgt og í flestu førum rættuliga tekniskt, men vit hava tó valt at gera nakrar "yvirordnaðar" viðmerkingar, sum vit vóna kunnu gerast ein partur av víðari viðgerðini av uppskotinum.

Vinarliga

f.v.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður

J. H. Schrøtersgøta 9 • Postsmoga 165 • FR-110 Tórshavn • Tlf. +298 14868 • Fax +298 11092

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Komið

12. OKT. 2004

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
Postsmoga 2039
165 Argir
*Stílað Mortan Simonsen*

**Tórshavn, tann** 07. oktober 2004

**J.Nr.:** 0.02-200400585/2
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:**bs/jans

**Tygara skriv:** 6410-0003/2003/31

**Viðvíkjandi uppriti vegna endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini til ummælis**

Fíggjarmálaráðið hevur sent Almanna- og heilsumálaráðnum upprit vegna endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini til ummælis.

Sagt verður frá, at um meirvirðisgjaldsfrítøkan verður strikað av reseptskyldugum heilivági verður, við óbroyttum umstøðum, neyðugt at hækka játtanina til høvuðskontu 8.20.2.01. Sjúkrakassar, sum hevur játtanarslagið stuðulsjáttan. Somuleiðis verður neyðugt at hækka játtanina til høvuðskonturnar 8.21.7.01 Vanlig forsorg, 8.21.8.01 Fólkapensjón og 8.21.8.05 Fyritíðarpensjón, sum hava játtanarslagið lógarbundin játtan.

Sambært upplýsingum frá Apoteksverkinum og Almannastovuni, verður neyðugt við nøkrum umprogrammeringum í teirra EDV-skipan, um allur heilivágur skal hava meirvirðisgjald, kortini verður tað ikki mett at verða kostnaðarmikið.

Sagt verður frá, at Almanna- og heilsumálaráðið arbeiðir í løtuni við, at broyta tilskotsskipanina tilsvarandi donsku og svensku skipanini, har sjúkrakassin einki letur í stuðli til stuðulsheimilaðan heilivág, íroknað sertilskot, fyri tær fyrstu umleið 500 kr. (tó 50% fyri fólk undir 18 ár). Tilskotið økist so til 50%, til 75% og til 85% tá keypt verður fyri meir enn umleið 4000 kr. árliga. Møguligt er tó eftir umsókn at sleppa undan hesum seinastu 15 prosentunum. Hetta tilskotið nevnist t.d. í Danmark "kronikertilskud", og tá verður tilskotið frá sjúkratryggingini 100%.

Politiska endamálið við eini tílíkari skipan, er at lata tey sum nýta lítið av tilskotsheimilaðum heilivági gjalda meira sjálvi, og so heldur nýta ein størri part av samlaða tilskotinum til tey, sum hava størri tørv. Tó er ætlanin at tillaga tilskotið soleiðis, at tað samlaða tilskotið til heilivág lækkar nakað.

Ætlanin hjá Fíggjarmálaráðnum um at leggja MVG á reseptskildugan heiligvág kann fáa óhepnar avleiðingar á ætlanina um at broyta skipanina. Fyri tað fyrsta vil tað raka tey, sum við broytingini skulu gjalda meira serliga meint, og fyri tað næsta vil tað eisini raka tey, sum hava ein størri tørv á heilivági. Tí kann spurnaðartekin verða sett við, um politiska endamálið verður

6410-0003/2003\56.

nátt við at broyta tilskotsskipanina um Fíggjarmálaráðið ger álvara av sínum ætlanum um at leggja MVG á reseptskildugan heilivág.

Vinarliga

Turid Arge
deildarstjóri

Birna Steingrímsdóttir
ráðgevi

12. OKT. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003-56

# SJÁLVSOGNARSTOVNURIN BERJABREKKA 3

*Stýrislimir*
*Bjarni Wilhelm, formaður*
*Jóannes Dalsgarð*
*Leivur Hansen*
*Heðin Mortensen*
*Jóhann Mortensen*

Fíggjarmálaráðið
Stílað: Mortan Simonsen

Tórshavn 10.10.2004

Vísandi til okkara samrøðu seinasta sunnudag, so kann eg upplýsa tær, at vit taka fult undir við ætlaða broytingini í MVG-lógini at javnstilla MVG-afturrindan av arbeiðsløn, tá ið byggt verður sethús at búgva sjálvur í, ella býli at leiga út, líka mikið, um tað verður gjørt við at taka MVG-afturrindanina burtur ella at geva báðum pørtum atgongd til MVG-afturrindan.

Vinarliga

Bjarni Wilhelm

13. OKT. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003 57.

bjarni@umms.fo; joannes@post.olivant.fo; leivur@torshavn.fo; hemorten@post.olivant.fo; jomo@uf.fo

Faroe Islands

Komið

01 DEC. 2004

Fíggjarmálaráðið

**Fíggjarmálaráðið**
Traðarvegur 39
FO-165 Argir

*Att.: Bárður Nielsen*

*Tykkara ref.:* *Okkara ref.: 4420-1140/Heri* *Tórshavn 30. november 2004*

**Viðv.: Endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini**

Vísandi til uppritið frá Fíggjarmálaráðnum í oktober 2004 viðvíkjandi endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini, gjørdi Ferðaráðið sínar viðmerkingar til uppskotið um at strika frítøku av MVG á gistingum. Viðmerkingarnir vóru sendar umvegis Gistingarhús- og matstovufelagið.

Ferðaráðið gjørdi tá ikki aðrar viðmerkingar til punktgjøldini, tí vit vóru ikki biðin um at gera tað. Kortini loyva vit okkum nú eisini at mæla til, at punktgjøldini á sokallaðar marglætisvørður s.s. radio- og sjónvarpstól, parfuma o.l vera avtikin.

Hetta meta vit fer at hava við sær, at ferðafólk fara at leggja munandi meira pening eftir sær í landinum um slíkar vørur kunnu keypast til kappingarførar prísir.

Blíðar heilsur,
**Ferðaráð Føroya**

*Heri Niclasen*
*Stjóri*

09. DEC. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003/2003\64.

**Faroe Islands Tourist Board** · Undir Bryggjubakka 17 · P.O. Box 118 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 355 800 · Fax +298 355 801 · www.tourist.fo · www.visit-faroeislands.com

Komið

23. NOV. 2004

# Àhugabólkurin hjá El-innleggjarum í Tórshavn

**Postboks nr. 321-Fo 110 Tórshavn.**

**Fíggjarmálastýrið**
**Postboks nr. 347**
**Fo 110 Tórshavn**
*Att: Bárður Nielsen Fíggjarmálaráðharri*

**Tórshavn 22 nov.2004**

**Viðv.Fyrispurning um punktgjøldini á lampum,hvítvørum & sjónvarpstólum**

Áhugabólkurin hjá El-innleggjarum kundi hugsa sær at frætt nærri hvussu gongur við málinum um frítøku av punktgjaldinum av lampum v.m.

Hetta punktgjaldsmálið hevur tikið nú fleiri ár, men seinast hetta var til viðgerðar í landstýrinum, var tað vinnumálastýrið v/ Bjarna Djurholm landstýrismanni, sum við sínum viðmælið sendi hetta víðari til Fíggjarmálastýrið, har hetta mál hoyrir undir.

Málið kom fyri løgtingið, men bert punktgjaldið av spariperum bleiv avtikið, hetta hevur stórt sæð ongan tídning haft, tí hvussu við lampunum sum skulu nýta hesar spariperur ? Hesar eru framvegis heftar við punktgjaldi og har afturat eru hesar lampurnar væl dýrari enn vanliga lampur sum nýta vanliga perur.

Vit skulu annars siga frá, at áhugabólkurin í ár, hevur verið í Danmark á skeiðferð,hetta fyri at seta seg inn í tað seinasta nýggja innan ljós & ljósarmaturir.

Á vitjan hjá m.a. Philips Lys & Solar, tað nýggjasta innan ljósarmaturum við orkusparandi tunnum ljósrørum, led & fiburljós sum hoyrir tíðini til.
Alt hetta hevur ongan møguleika hjá okkara komandi ættarliðum, tí hesi eru rættuliga dýr í innkeypi og so heft við punktgjaldi, um ikki hesar vørur verða keyptar uttanlanda og innflutt m.a. sum ferðagóðs o.l. sum ger at samfelagið alt meira missur hesar inntøkur eitt nú sum mvg av seldum el-vørurum.

**Hvussu við tí fíggjarliga ?** Vit duga so ikki síggja, at hetta skal føra við sær útreiðslur á komandi fíggjarlógini, tá ið hugsast skal um, at landið skal gjaldað stuðul til ymiskar íløgur har hesar hava íroknað punktgjald til m.a. komandi íløgur so sum:

1. Ellis & røktarheimið sum skal byggjast í Norðstreym.
2. - - - - - Rúnavík.
3. - - - - - Kirkjubø.
4. Ítrottarhøll - - - Kollafjørð.
5. Heimið fyri Minnisveik - - Tórshavn.
6. Teir ymisku dagstovnar - - kring landið.
7. Komandi Norðoyara tunnilin.

*Vit vilja sum yrkisbólkur føra fram, um løgting ella landstýrismenn nakrantíð gjørt sær far um teir økjandi sjúkradagar, sum eru millum tey starvsfólk sum sita á skrivstovu, ella børnini í eru í skúla ella barnagarð, vegna skeiva nýtslu av kunstigum ljósi, sum er runt har tey eru dagliga ?*

Ráðgevarnir mugu ofta ganga uppá kompromis, tí rættar lampur til sítt umhvørvið eru ov dýrt vegna punktgjald og tí verður sum Philips úttalar seg og ofta siga, at í Føroyum verður nógv " kjallaraljós" nýtt.

**At enda** sær áhugabólkurin hjá el-innleggjarum,at teir ymisku handalarnir sum vanliga ikki selja lampur ( og tí tey ikki vita betri) eru farnar at senda faldarar við m.a. lampum og prísum, sum ikki hava innroknað punktgjald.
Vit halda hetta kemst av m.a. sjálvtolling og møguliga kanningin frá almennari síðu ikki eru nøktandi fyri at fáa hetta støðga, soleiðis at eins tolling & punktgjald er fyri allar fyritøkur og persónar í hesum landið !

Áhugabólkurin er nú farin ígong við at samlað tilfar, sum vísur hvussu ymiskt hesi vørubólkar verða viðgjørdir frá almennari síðu, alt eftir hvørju innflytarnir eru .

Vónandi fáa vit eina frágreiðing, um hvussu gongur við omanfyri nevnda punktgjaldsmálið !

**Vegna umboð**

**fyri Áhugabólkin hjá El-innleggjarum í Tórshavn**

H. Mikkelsen

*Høgni Mikkelsen El-innleggjari*

NB! Avrit sent til Vinnuhúsið:att Jan Mortensen Leiðara til kunningar.

23. NOV. 2004

FMR. j. nr. 6410-0003 | 2003 \ 63